# ÁLIT UM

# MJÓLKNEYTAHALDIÐ

# Í FØROYUM

## 1. partur

Gunnar Bjarnason

Búnaðargrunnurin og Búnaðarstovan

Tórshavn

- 2005 -

# I. Formæli

Landbúnaðurin er ein týðandi partur av mentanararvinum í Evropa og Miðeystri, og neytahaldið er ein týðandi partur av honum. Somuleiðis er í Føroyum. Síðan fólk komu higar, hevur landbúnaðurin havt ómetaliga nógv at siga fyri samfelagið, bæði mentanarliga og fyri lívskorini. Tann, sum á einhvønn hátt megnaði at hava kúgv, hevði kúgv, og hon bjargaði húsinum. Tað var støðan til fyri 30-50 árum síðan. Síðan tá eru neytini savnað meira og meira saman í færri og færri fjós, og færri og færri fólk koma í námd av neytum. Tann gongdin er ikki steðgað.

Neytahaldið í vesturheiminum mennist við stórari ferð, fjósini verða færri og færri í tali. Tað ávirkar eisini neytahaldið her á landi. Krøvini til bøndurnar, fjósini og bøin verða tí bara størri og størri.

Flestu fjósini í Føroyum eru um 20 ár og eldri, og flestøll eru siðbundin fjós – faststøðufjós – við um 20 básum. Tíðin er við at fara frá teimum. Skulu tey nýtast í 15-20 ár afturat, er neyðugt við stórum ábótum á fleiri teirra, og tá eru tey framvegis gomul ótíðarhóskandi fjós – fjós, sum eingin annar í vesturheiminum nýtir.

Flestøll fjós í Føroyum hava ov smáar køstar, og nøkur hava at kalla ongan køst. Tað kemur neyvan at ganga nógv ár afturat. Krøvini frá restini av samfelagnum økjast støðugt, – tøðini skulu nýtast á skilabesta hátt, og dálkingini skal minkast mest møguligt, sjálvt frá útluftingini úr fjósunum!

Einasta fóður, vit kunnu fáa til vegar sjálv, er gras og hoyggj, restin má keypast. Nógv fjós hava í minna lagi av bøi til neytini, og í nøkrum bygdum fer stórur partur av bønum undir bygging og vegir. Tí verður neyðugt at velta nýggjan bø. At velta nýggjan bø kostar nógv, bæði í pengum og í arbeiði. Vantandi bøur og vantandi gott lendi at velta kann skjótt beina fyri møguleikanum fyri mjólkneytahaldi í Føroyum, og í ringasta føri eisini minka nógv um møguleikarnar fyri seyðahaldi.

Nógvir trupulleikar eru við ognar- og ábyrgdarbýtinum millum bøndurnar og Búnaðarstovuna sum eigara og Búnaðargrunnin sum fíggingarstovn. Serliga er trupulleikar við fíggjarliga ábyrgdarbýtinum.

Fyri uml. 3 árum síðan vendi fleiri bøndur sær til Føroya Jarðarráð við fyrispurningum og umsóknum um fígging til nýggj fjós. Men Føroya Jarðarráð útsetti avgerðirnar til støða varð tikin til ein íløgupolitikk fyri mjólkneytahaldið komandi árini.

Sum partur av hesum varð eg biðin um at greina núverandi neytahaldið og at meta um, hvussu fram skal farast. Eg havi við hesum álitinum roynt at lýsa neytahaldið, so ráðið kann hava eitt breiðari grundarlag at taka støðu út frá.

Tíverri hevur ikki ligið fyri at viðgera fíggjarliga partin av neytahaldinum. Fyri at fáa tað síðuna betur lýsta, skjóti eg tí upp, at Búnaðarstovan og Búnaðargrunnurin skipa fyri eini ráðstevnu um mjólkneytahaldið í heyst, har fyrilesarar leggja fram tankar og útrokningar um, hvussu vit kunnu menna eitt nútímans fjós til okkara viðurskifti, og hvussu nógv tað í minsta lagi kemur at kosta føroyska samfelagnum at hava mjólkneytahald í Føroyum.

Skal neytahaldið vera ein natúrligur vinnupartur av føroyska samfelagnum komandi árini, verður neyðugt við avgerðum, sum ikki allar verða lættar at taka, og neyðugt verður eisini við politiskum avgerðum og vælvild, sum ikki verður løtt at vinna. Verða tær avgerðirnar ikki tiknar, verður neytahaldinum neyvan lív lagað her á landi.

í Tórshavn 2. mai 2005

Gunnar Bjarnason

# Takk

Eg vil takka Corneliusi Reinert og Aksali á Bøgarði í Kaldbak, Eriki Mortensen í Øravík, Jóan Peturi Hentze í Uttastovu á Sandi, Magnusi Magnussen í Húsavík og Marini S. Hansen fyri áhugaverdar upplýsingar um neytahaldið fyri 50-70 árum síðan. Harumframt vil eg takka MBM, Peder Haahr og Einari Ellingsgaard á Royndarstøðini, Landsverki og SEV fyri teirra tol við at svara mínum spurningum og Ottari Hentze á Sandi fyri góðar viðmerkingar og Marjuni A. Simonsen fyri málsliga leiðbeining og rættlestur. Eisini vil eg takka Jóhan Hendriki W. Poulsen fyri orðagerð.

# II. Innihaldsyvirlit


1. Inngangur ... 9
2. Hví skulu vit hava mjólkneyt í Føroyum? ... 11
   2.2. Krøvini í framtíðini ... 11
   2.3. Núverandi fjósini og bøurin ... 12
   2.4. Møguleikarnir at velta upp úr nýggjum ... 12
   2.5. Menningin í útheiminum ... 13
   2.6. Hetta álitið ... 14
   2.7. Skjalprógv ... 14
3. Støðan í dag ... 15
   3.1. Altjóða marknaðurin ... 15
   3.2. Mjólkneytahaldið í vesturheiminum ... 17
      3.2.1. Menningin ... 17
      3.2.2. Avrokningarprísirnir fyri mjólk í ES, Nýsælandi og í Føroyum ... 20
      3.2.3. Almennur stuðul ... 21
      3.2.4. Stuðul – eingin stuðul ... 22
      3.2.5. Stødd og úrslit, bóndin er avgerandi ... 22
      3.2.6. Stór fjós, húskallar og frítíð ... 23
      3.2.7. Felagsfjós ... 24
   3.3. Neytahaldið í Føroyum síðan 1948 ... 27
      3.3.1. Menningin ... 27
      3.3.2. Nývelting og skrásett stráfóður seinnu árini ... 29
      3.3.3. Stráfóður til hvørja mjólkkúgv ... 33
      3.3.4. Fóðurvirknið og innflutningurin av fóðri ... 34
4. Nýggj fjós og nývelting ... 38
   4.1. Íløgutørvur komandi árini ... 38
   4.2. Stráfóður og bøur ... 38
      4.2.2. Prísurin fyri at velta upp úr nýggjum – eitt hugsað dømi ... 39
      4.2.3. Stráfóður, so nógv neytini klára at eta ... 42
      4.2.4. Veltistuðul ... 43
      4.2.5. Hvør skal velta? ... 44
      4.2.6. Leiga øki ella makaskifta um hagalendi? ... 44
      4.2.7. Lendi at velta ... 44
      4.2.8. Aðrir vegir og SEV ... 45
   4.3. Fjósslag og stødd ... 46
      4.3.2. Nýggj fjós ... 46
      4.3.3. Óbjálvað, sjálvútluftandi leysgongufjós, rennigarðar – ella út um summarið ... 48
      4.3.4. Stødd á fjósum og prísur fyri hvønn básin ... 49
      4.3.6. Fyrireiking til fjósbygging ... 50
      4.3.7. Ráðgeving og royndir ... 51
      4.3.8. Mettur íløgutørvur ... 52
   4.4. Súrhoysbrunnar, koyribrunnar ella rullur í plasti ... 55
   4.5. Køstar og tøðbreiðsla ... 56
      4.5.2. Innflutningurin av áburði ... 57
      4.5.3. Nýggir køstar ... 60
      4.5.4. Køstatak ... 61
      4.5.5. Køstaprísurin ... 62

4.5.6. Útgerð at breiða tøðini við ... 63
5. Annað ... 65
5.1 Flutningur av mjólkini til mjólkarvirkið ... 65
5.2. Áhugin fyri landbúnaði og útbúgvingar ... 67
5.2.2. Áhugin fyri landbúnaði í Danmark ... 67
5.3. Einsemi ... 68
5.4 Annar studningur til bøndur ... 68
5.3. Eftirløn til bøndurnar ... 69
5.5. Gomul húsdýrasløg og gróðurseting av trøum ... 69
5.6. Røktarlandslagið ... 69
5.7. Bygg ... 70
5.8. Rossavist og rossagøtur ... 70
5.9. Vistfrøðilig mjólk ... 71
6. Niðurstøða ... 73
6.1. Álitið ... 73
6.2. Føroyska mjólk? ... 73
6.3. Dugnaligir bøndur ... 73
6.4. Nýggj fjós ... 73
6.4.2. Hvussu skal hoyggjast? ... 74
6.4.3. Køstar ... 74
6.4.4. Fígging og veðhald ... 75
6.4.5. Fyrireiking av fjósbygging ... 76
6.4.6. Bøgrundarlagið og tøðbreiðslugrundarlagið ... 76
6.4.7. Hvar skal byggjast og veltast ... 76
6.4.8. Sáttmálar fyri felagsfjós ... 77
6.4.9. Bjóða fjós út at byggja og lendi at velta? ... 77
6.4.10. Eftirlit ... 77
6.4.11. Velting ... 78
6.5. Undirvísing, ráðgeving, royndir og gransking ... 78
7. Tilmæli ... 79
8. Áhugaverdar heimasíður ... 82

# Yvirlit yvir talvur


| Talva | | síða |
|---|---|---|
| 1 | Neytahald í Danmark, 1990 – 2010 ................................................................ | 18 |
| 2 | Danskt neytahald 1993 – 2002 ....................................................................... | 19 |
| 3 | Inntøkan hjá vanligum donskum mjólkneytabóndum, eftir neytatalinum ......... | 23 |
| 3.1 | Lyklatøl fyri felagsfjós, íognarfeløg, og einstaklingafjós... .............................. | 25 |
| 4 | Lutfallið millum ársneytatalið skrásett hjá Føroya Neytaeftirliti ...................... | 27 |
| 4.1 | Árliga økingin av skrásettum stráfóðuri hjá 4 bóndum við mjólkneytum ........ | 33 |
| 4.2 | Árliga %-vísa økingini av skrásettum stráfóðuri hjá 4 bóndum ...................... | 33 |
| 5 | Innflutt kraftfóður ........................................................................................... | 34 |
| 6 | Mett nýtsla av fóðuri og ástøðiligur fóðurtørvurin ......................................... | 36 |
| 7 | Hoyggj, grasperlur og hálmur*, innflutt ........................................................ | 36 |
| 7.1 | Rúmmetrar av húsdýraáburði, sum í mesta lagi kann breiðast á bøin... .......... | 39 |
| 8 | prísinum at velta 60 ha av “sera góðum lendi” úr nýggjum – uttan... .............. | 40 |
| 9 | Rentur og avdrøg fyri at velta 60 ha, 20 ára avdráttartíð ................................ | 41 |
| 9.1 | Prísurin fyri grevstur, skerv og slangur til afturlagdar veitir ........................... | 41 |
| 10 | Tørvurin av bøi, fyri at neytini skulu fáa tað av stráfóðuri, tey klára at eta ..... | 42 |
| 11 | Tørvurin at velta úr nýggjum, fyri núverandi bøi, sum verður lagdur burtur.. . | 42 |
| 12 | Lutfallið millum stuðul til bø og vegir 1999-2002 .......................................... | 43 |
| 12.1 | Mettur tørvur á veltistuðli tá 16 ella 28 ha verða veltir árliga ......................... | 43 |
| 12.2 | Gjaldið fyri liturin til rentur og avdrøg av fjóslánum ..................................... | 55 |
| 13 | Innflutt handilstøð, NPK og annar áburður .................................................... | 58 |
| 14 | Samanburður millum NPK og flottøð, eftir taðsøltunum í tøðunum ............... | 59 |
| 15 | Køstaprísurin uttan flutning til garðin og uttan uppsetan ............................... | 61 |
| 16 | Køstaprísur í Tórshavn, uttan uppsetan, útgrevstur og tak, men við botni ...... | 62 |
| 17 | Fluttningsútreiðslurnar úr Suðuroy... ............................................................ | 65 |

# Myndayvirlit


| | Mynd nr. | síða |
|---|---|---|
| 1 | Framleiðslumenningin í landbúnaðinum | 13 |
| 2 | Menningin í altjóða handlinum og framleiðsluni | 15 |
| 3 | Menningin í altjóða handlinum og altjóða handlinum við landbúnaðarvørum | 15 |
| 4 | Menningin í lønini í íðnaðinum og prísurin fyri landbúnaðarvørur | 16 |
| 5 | Lutfalsligi parturin av lønini, vanligur nýtari hevur nýtt til matvørur | 17 |
| 6 | Mjólkakvoturnar í Evropu | 18 |
| 7 | Mjólkneytabóndurnir í Danmørk og ætlaða talið í 2010 og 2015 | 19 |
| 8 | Íslendskir bóndur, sum lata mjólk, og vantaða talið í 2013 | 19 |
| 9 | Mjólkaprísirnir í EU, Ný Sælandi, Noregi, Íslandi og í Føroyum | 20 |
| 10 | Gongdin í mjólkaprísinum í Danmark, Hálandi, Usa og í Ný Sælandi | 21 |
| 11 | Parturin av inntøkuni hjá bóndum, sum er almennur stuðul | 21 |
| 12 | Úrslitið fyri fjós, Dk, greinað eftir støðd | 22 |
| 13 | Fjósstøddirnar, FR, í 1948/49, 1969/70, 1997 og í 2001 | 27 |
| 14 | Meðal tal av stuðulsneytum/bónda | 28 |
| 15 | Menningin í talinum av bóndum, sum lata bjólk 1985 – 2005 | 28 |
| 16 | Mjólkakvoturnar skiftar eftir støðd, MBM | 29 |
| 17 | Skrásett mongd av stráfóðuri, lendi velt úr nýggjum og ætlað mongs stráfóður | 29 |
| 17.1 | Hoygg/dekar, lutfalsliga í mun til fyrsta slátturin aftaná velting | 31 |
| 17.2 | Skrásett stráfóður og skrásett lendi velt úr nýggjum hjá 4 bóndum | 32 |
| 18 | Stráfóðurmongd/(stuðulneyt/bónda) | 34 |
| 19 | Skitsa yvir mynsturbø | 40 |
| 20 | Eftirgjørt dømi um prísin á neytaplássi (í fjósi) | 49 |
| 20.1 | Restskuld hjá einum fjósið, frá tí at lánið er tikið, til øll lán eru goldin | 53 |
| 20.2 | Restskuldin, kr, hjá nýggjum fjósum, bygd yvir 20 ár, við umvælingum | 53 |
| 20.3 | Útlánini hjá Búnaðargrunninum til nýggj fjós, umvæld 10 og 20 ára gomul | 54 |
| 20.4 | Útlánini til nýggj fjós, 10 og 20 árs umvælinig, endurnýggja tá fjósini eru 30 ár eisini við 10 og 20 árs umvælingum og við gomlu útlánunum | 54 |
| 20.5 | Rentur og avdrøg fyri Liturin frá tí at fjós er bygt við 10- og 20-ára umvæling | 55 |
| 20.6 | Innfluttur áburður og skrásett stráfóður | 58 |
| 21 | Køstaprísur, kr/m³ | 63 |
| 22 | Áhugin fyri jarðarbrúki millum hálvvaksin í Danmørk | 68 |

# Yvirlit yvir "Gulu kassarnar"


| Gulur kassi | síða |
|---|---|
| Felagsfjós- og arbeiði | 25 |
| Mett skrásett stráfóður, 1991+ 25 m³ ha | 30 |
| Kanning av økjum at velta | 45 |
| Nýggj tøkni | 47 |
| Brynning | 48-49 |
| Áhugafelagsskapir, felags royndir | 51 |
| Donsk ráðgeving | 51 |
| Innflyting í nýggj fjós | 51 |
| Mannatrekkur sum áburður | 59-60 |
| Felags køst til eldri fjós | 61 |
| Lastbil til at spræna flottøð | 64 |
| Um øll mjólkin kom av meginøkinum | 66 |

# 1. Inngangur

Ófatiliga nógvar broytingar eru hendar á øllum samfelagsøkjum seinastu 50-100 árini. Í landbúnaðinum eru eins nógvar broytingar hendar sum í restini av samfelagnum. Einki bendir á, at broytingarnar eru komnar at enda ella fara at minka komandi árini, heldur tvørturímóti.

Nógv ymisk viðurskifti gera, at broytingar koma í.

Fyri landbúnaðin eru tað serliga tann økta vitanin í arvafrøði, lívfrøði og tøkni, sum ávirka fyritreytirnar.

Vitanin um arvafrøðilig viðurskifti verður størri og størri hvønn dag, sum gongur. Tað ganga helst bert fá ár, til vit vita, hvar allar ílegur (gen) eru á arvastreinginum hjá øllum húsdýrum. Vitanin um, hvussu hvør einstøk ílega er háttað, økist við nógvari ferð. Tann nýggja vitanin ger, at neyt og onnur húsdýr kunnu verða kynbøtt meira miðvíst.

Í dag vita vit betur enn nakrantíð, hvussu dýrini skulu røkjast fyri at kunna geva sum mest og liva sum longst. Mett verður, at heldur størri parturin av øktu mjólkini, sum neytini í dag lata samanborið við fyrr, kemur av øktu vitanini um fóður og røkt – og minni parturin av tí, at neytini eru kynbøtt at lata meiri mjólk.

Menningin á telduøkinum ávirkar eisini fjósini. Eitt nútímans fjós virkar als ikki, um teldan í fjósinum ikki er í lagi.

Onnur tøkni mennist við somu ferð. Í bønum verður tað serliga møguleikarnir, ið GPS gevur, sum koma at broyta jarðarbrúkið nógv. (GPS: útgerð, sum vísir neyva knattstøðu við metur- ella cm-neyvleika)

Flutningur millum lond og heimspartar gongur skjótt fyri seg, og prísurin lækkar støðugt. Tøknin ger tað t.d. møguligt at flyta kjøt úr Nýsælandi ófryst allan vegin heilt til Føroyar. Uttan iva ber heilt væl til at fáa spilfeska mjólk úr einhvørjum landi í Evropa flutta til Føroyar, uttan at hon kemur at kosta føroyska samfelagnum meiri enn heimamjólkin.

Oman á ávirkanina frá øktu vitanini, koma krøvini frá nýtarunum – og teir seta ikki smá krøv. Nýtarin vil hava góðan og ikki ov dýran mat framleiddan á burðardyggan og djóravinaligan hátt. Eisini verður tað meir og meir eitt krav, at nýtarin kann finna fram til, úr hvørjum landi maturin kemur, og stundum eisini av hvørjum garði. Tað setur krøv til allar liðirnar frá bónda til nýtara.

Nýtararnir vilja ikki hava, at moldin verður oydd meira enn neyðugt ella dálkað við óynsktum evnum, at maturin er dálkaður, hvørki við restum av heilivági, bakterium ella øðrum, og at drekkivatnfeingið verður hótt. Eisini vilja nýtararnir hava, at røktarlandslagið (t.d. bøur, bøgarðar, vegir, bitin hagi o.m.a.) er í góðum standi og áhugavert at síggja. Aftur at tí vilja nýtarar heldur ikki hava stinkandi flottøð breidd á øki, sum eru so tætt við bygt øki, at tøðlukturin er til ampa.

Tann økta frítíðin hjá nýtarunum ger, at fleiri og fleiri krøv verða sett fram um, at fólk skulu kunna sleppa út í náttúruna, bæði “uppruna”náttúruna og út í røktarlandslagið.
Tað er vanliga ikki so, at tann einstaki nýtarin beinleiðis setur bóndanum hesi krøv. Serliga eru tað handilsfeløg, áhugafeløg og onnur feløg, sum seta krøvini og fáa politikarnar at lova seg burtur við vallyftum. Handilsfeløgini hava ongan áhuga í, at viðskiftafólk teirra ivast í, hvussu vørurnar í handlinum verða framleiddar. Tað ringasta, sum kann henda handilsfeløgunum, er, um fjølmiðlarnir fáa frænir av, at tey selja vørur, sum eru ivasamar á onkran hátt.
Øll hesi viðurskiftini gera, at vit støðugt mugu taka støðu til, hvussu vit skulu menna okkara samfelag og okkara landbúnað.

“*Eingin grund er at halda, at alt tosið um: hvussu húsdýrini hava tað, vantandi álit á matinum, heilsa og umhvørvi, bara er nakað, sum fyribils er frammi millum fólk. Teir mest ágrýtnu bøndurnir og teir framfýsnu partarnir í vinnuni rundan um landbúnaðin hava langt síðan fatað álvarað í hesum og hava tikið støðuna til eftirtektar*.” (Ole P. Kristensen, stjóri á Statens Jordbrugs- og Fiskeriøkomisk Institut, Landsbladet, 30. nov. 2001, bls. 17)

# 2. Hví skulu vit hava mjólkneyt í Føroyum?

At flestøll lond vilja verja egnan landbúnað, sæst aftur í sáttmálunum hjá teimum stóru handilssamgongunum millum lond, t.d. NAFTA (Norðuramerika) og EFTA. Í sáttmálunum er ásett, at ikki ber til at handla við landbúnaðarvørum eins frítt og við ídnaðarvørum. Eitt undantak er sáttmálin hjá ES, tí har ber til at handla næstan heilt frítt við landbúnaðarvørum innanhýsis.

Á sama hátt er við handilssáttmálunum, ið Føroyar hava við onnur lond. Ávísar føroyskar landbúnaðarvørur eru undantiknar handilstreytunum, serliga seyðakjøt og mjólk.

Náttúran í Føroyum er ikki nýtilig til nútímans stórlandbúnað, sum kann kappast við onnur lond og øki, har betur liggur fyri. Tað noyðast vit bara at góðtaka. Men støðan verður ikki betri av fastløstu ognar- og brúksviðurskiftunum til jørðina. Steinrunnu miðaldarkendu nýtsluhættirnir kvala flestallar nýhugsanir í føðingini.

Skulu vit halda fram við neytahaldi í Føroyum, mugu vit spyrja okkum sjálv: "Hví skulu vit drekka mjólk undan neytum í Føroyum ella hava føroyskt smør?"

- Fyri at hava betri mjólk ella smør?
- Fyri at spara valuta?
- Av trygdarpolitiskum ávum?
- Av bústaðarpolitiskum ávum ella
- vilja vit røkta okkara land á ein ávísan hátt?

Vit mugu eisini gera støðuna greitt upp:

- Hvussu nógv vilja vit gjalda meira fyri "føroyska" mjólk heldur enn skotska, danska ella hálendska?
- Hvar í landinum skulu fjósini vera?
- Hvussu skulu ognarviðurskiftini/ fíggjarligu ábyrgdarviðurskiftini vera?
- Hvørji umhvørviskrøv vænta vit í framtíðini?
- Hvussu sjálvbjargin skulu/ kunnu vit vera við fóðri?
- Hvussu stór inntriv skulu vit gera í náttúruna fyri at fáa neytunum fóður?

Eru nógv ivamál um hesar spurningarnar, verður neyvan nøkur miðvís útbygging av neytahaldinum, men heldur útbygging við fyribils loysnum, sum verða tiknar so hvørt trupulleikar stinga seg upp – ella á nútíðarmáli *ad hoc*-loysnir.

Um neyðugt er við politiskum avgerðum fyri at bøndurnir og Búnaðargrunnurin trygt kunna gera íløgur í neytahaldið, er umráðandi, at talan er um breiðar politiskar semjur, sum tryggja støðugar fyritreytir.

## 2.2. Krøvini í framtíðini

Tað, sum fyrst og fremst tvingar okkum at taka støðu til, hvat vit í Føroyum vilja við neytahaldinum, ella við landbúnaðinum sum heild, er, at matvøruprísurin fylgir ikki við prís- og lønarvøkstrinum í samfelagnum annars. Mjólkar- og neytakjøtprísirnir falla støðugt, um somu tíð sum krøvini til fjós, fóður og tøkni støðugt økjast. Tað ger aftur, at skal bóndi hava løn til sín sjálvs, sum hevur sama keypsvirði, skal hann lata meiri mjólk og meiri kjøt enn frammanundan. Tað krevur aftur bæði størri og betri fjós, størri og betri bø, betri amboð og nógv meir fígging.

Fyri at fáa tað peningaliga at hanga saman, er neyðugt, at neytini mjólka so nógv sum ráðiligt, og at tey fáa so bíligt fóður, sum til ber, og at dagligu rakstrarútreiðslurnar ikki eru eitt oyra ov dýrar. Hetta økir alt um fakligu krøvini til bóndan.

Fyri at bøndurnir fakliga skulu kunna fylgja við menningini, hava teir meira og meira brúk fyri góðari ráðgeving og at verða kunnaðir á ymsan hátt, eins og tørvur er á eini royndarstøð, sum fær møguleikar at vera meira virkin, t.e. størri játtan til Royndarstøðina, ráðgeving og undirvísing. Ikki minni umráðandi er, at politiska støðan viðvíkjandi landbúnaði er støðug, ikki bara eina ella tvær tingsetur, men í fleiri tíggjuáraskeið.

## 2.3. Núverandi fjósini og bøurin

Nógv av fjósunum í Føroyum eru nú 20 ár og eldri. Fleiri av fjósunum eru illa fyri við køstum, og hjá nøkrum - **fleiri** - er meira enn ivasamt, um tey hava nakran líkinda køst ella ikki. Tað fer ikki at bera til nógv ár afturat. Flestøll ment lond krevja meira og meira, at áburðurin undan húsdýrum verður gagnnýttur sum best og dálkar sum minst, tá ið hann verður “borin” á bøin. Fólk, sum búgva tætt við fjósini og bøin, finna seg minni og minni í dálkingini og ringum lukti í tíð og ótíð.

Bøurin, sum liggur til nógvar garðar, er ikki hóskandi til tað tøknið, sum er komin, og sum bóndin noyðist at nýta, um arbeiðsbyrða hansara skal verða rímilig í mun til lønina. Verða ikki nútímans amboð nýtt, gongur arbeiðið seinni, neyðugt er at nýta fleiri hjálparfólk, at nýta ivadagar at sláa í. Verða ivadagar nýttir, gongur tað út yvir bøin. Hann verður kleyraður av traktorinum. Tað ger aftur, at minni gras fæst av bønum, súrhoyggið verður ikki so gott, bøurin krevur meiri tøð fyri at bera gras, og bøurin verður enn vátari.

Flestallir bøndur í dag hava ov lítlan bø í mun til neytini, og teir fáa ofta alt ov lítið av grasi av bønum, teir hava. Skulu fjósini í framtíðini vera størri enn tey nú eru, er neyðugt at velta nógv upp úr nýggjum, bæði fyri tað, sum vantar í nú, og fyri bø, sum teir mugu gevast at nýta. Og fyri at sleppa undan at velta meira haga enn neyðugt, eigur tað eisini at verða gjørt lættari/ tryggari hjá bóndum at nýta bø hjá øðrum, sum ikki verður nýttur og at teir fáa sum mest av grasi av bønum á skilabestan hátt.

Ikki minni umráðandi er, at bøndur og onnur, sum hava bø um hendi, broyta hugburð um, hvussu seyðurin skal klára seg um veturin. Tað, at seyðurin hevur ræðisrættindini til bøin í 7 av 12 av ársins mánaðum, ber ikki til í dagsins samfelag, um vit skulu hava ein bara nøkulunda kappingar-føran landbúnað.

## 2.4. Møguleikarnir at velta upp úr nýggjum

Rættiliga avmarkað er, hvussu stórur partur av Føroyum kann veltast til bø, og ein rættiliga stórur partur av gamla bønum hjá nógvum bóndum er í vanda fyri at fara undir bygging.

Støðan er rættiliga ymisk frá bygd til bygd, og frá bónda til bónda.

Í onkrum bygdum er alt/ næstan alt velt, sum kann veltast, og størsti parturin av stráfóðrinum verður nýttur til neytini. Tað merkir, at har ber ikki til at økja um neytatalið og enn minni at leggja seyðahaldið um, so seyðurin fær meira hoyggj um veturin. Um nakað neytahald skal vera í hesum bygdunum, mugu felagsfjós skipast og neytahaldið minkast nakað.

Í øðrum bygdum, har mjólkneyt eru, hava nakrir bøndur møguleikan av velta upp úr nýggjum í haganum og at økja um neytatalið. So er tað spurningurin, um teir vilja vera fyri seg sjálvar, ella kasta saman til eitt felagsfjós. Tað eru tó teir fæstu bøndurnir, sum hava nóg mikið av lendi til stórt fjós einsamallir.

Í fleiri bygdum, har eingi neyt eru í dag, er fitt av lendi, sum er nýtiligt til at velta, men ofta er tað reinir óðalshagar, ella hagar, har bert eitt ella 2 smærri festi eru.

Skulu 20-25 stór fjós vera í Føroyum um 15-20 ár, slepst ikki undan óvanligum loysnum við makaskiftum og leigan av lendum fyri at fáa nóg mikið av bøi til komandi stóru fjósini. Neyvan slepst heldur undan, at onkur bóndi, sum vil sleppa at halda fram við mjólkneytum, má flyta í aðra bygd, har øki eru, sum kunnu veltast.

## 2.5. Menningin í útheiminum

Tað eru ikki bara viðurskiftini her, sum gera, at mjólkneytahaldið má leggjast nógv um. Í útheiminum gongur menningin nógv skjótari fyri seg. Kappingin er hørð, og fyri at fáa tað at hanga saman, verða fjósini størri og størri, meira og meira nýggj tøkni kemur inn í myndina, og røktin verður meira sjálvvirkin.

Roknað verður við, at ein maður dagliga røktar 120 mjólkneyt (Lars Erik Ruud, 2001). 1. mynd vísir, hvussu skjótt menningin gongur í landbúnaðinum, so talið á neytum, ið ein maður røktar, uttan iva eisini broytist.

Í teimum londunum, har kappingarførið er best, verður bøurin ofta sligin fleiri ferðir árliga av eini maskinstøð, og fóðrið verður hølt í bíligum goymslum. Harafturat kemur, at munandi partur av fóðrinum er avlop frá øðrum landbúnaðarvørum, t.d. frá sukurframleiðsluni. Prísurin á teirra “stráfóðri” er **langt** niðan fyri tað, vit eru von við. Í øðrum londum er ikki neyðugt at hava fjós til neytini heldur.




**1. mynd.** Framleiðslumenningin í landbúnaðinum, í matvøruídnaðinum, í øðrum vinnum og hjá tí almenna. 1990 = 100.

## 2.6. Hetta álitið

Við hesum álitinum havi eg roynt at kunna Búnaðarstovuna og Búnaðargrunnin, so tær avgerðir, ið stova og grunnur taka, virka fyri, at vit í Føroyum ikki um nøkur ár vakna við kaldan dreym og noyðast at staðfesta, at tað als ikki longur ber til at hava mjólkneyt í Føroyum, og at flestallar íløgurnar eru farnar fyri einki, eftir at samfelagið hevur:

- gjørt stórar íløgur í fjós og mjólkarvirki
- lagt nógv arbeiði og nógvar pengar í at velta bø og gera vegir, og
- latið fólk brúkt tíð og orku upp á at fyrireika seg til landbúnaðin

Henda støðan kann tíverri rættiliga skjótt gerast veruleiki. Tann dagurin kann skjótt vera, at einki skilafólk longur vil fáast við mjólkneyt tí:

- avlopið í pengum er so lítið
- krøvini til arbeiðið eru stór
- frítíðin er lítil
- restin av samfelagnum vil ikki longur gjalda yvirprís fyri mjólk, sum longu hevur fingið stuðul og
- aðrir borgarar kæra bøndurnar fyri myndugleikunum, hvørja ferð tøð verða breidd í grannalagnum

Tað er ikki bara tað, at minni og minni fæst fyri framleiðsluna. Um somu tíð verður mentanarliga frástøðan millum bónda og nýtara størri. Vanligi nýtarin í dag kennir einki til landbúnaðin uttan gjøgnum fjølmiðlarnar, og hann hevur ikki aðrar kenslur fyri landbúnaðinum enn fyri øðrum vinnum.

## 2.7. Skjalprógv

Arbeiðsumstøðurnar hava gjørt, at eg ikki kann skjalprógva alt í hesi frágreiðingini. Har tað hevur ligið fyri, havi eg viðmerkt heimildina inni í tekstinum. Eftir bestu sannføring havi eg roynt at lýsa neytahaldið so væl sum til ber og roynt at meta um, hvussu fram skal farast, um neytahaldið skal hava eina framtíð í Føroyum.

# 3. Støðan í dag

## 3.1. Altjóða marknaðurin

Gongdin í nógv ár hevur verið, at størri og størri partur av allari framleiðslu verður handlaður á altjóða marknaðinum, sí 2. mynd.




**2. mynd. Menningin í altjóða handlinum og í framleiðsluni í síni heild.**
**Henning Otte Hansen: Internationalisering af landbruget og fødevareindustrien**

Hetta er serliga galdandi fyri ídnaðarvørur. Gongdin er tann sama fyri landbúnaðarvørur, um enn broytingarnar ganga seinni, sí 3. mynd. Einki bendur á, at henda gongd er steðgað.




**3. mynd. Menningin í altjóða handlinum og í handlinum við landbúnaðarvørum í síni heild. Henning Otte Hansen: Internationalisering af landbruget og fødevareindustrien, bls. 12.**

Grundirnar fyri, at minni partur av landbúnaðarvørunum verður handlaður á altjóða marknaðinum samanborið við ídnaðarvørur, eru fleiri:

- Matvørur halda sær ikki so leingi
- Matvørur eru dýrar og truplar at flyta langar leiðir
- Í flestum londum er møguleiki fyri, at ein partur av teirra matvørum verður framleiddur hjá teimum sjálvum
- Fyri at tryggja, at ein rímiliga stórur partur av matvørutørvinum í landinum verður nøktaður av egnum bóndum, verða ymsar avmarkingar settar móti innflutningi, og nógvur stuðul latin egnum landbúnaði

Menningin í landbúnaðinum hevur havt við sær, at matvøruprísurin er fallin nógv í mun til tímalønina, sí 4. mynd.




**4. mynd. Menningin í lønini í ídnaðinum og prísurin fyri landbúnaðarvørurDanmark. Lønin er sett = prísin í 1966. Upplýsingarnar um heimildina eru tíverri misfarnar.**

Henda gongd hevur havt við sær, at vanligi nýtarin nýtir minni og minni part av síni inntøku til matvørur, sí 5. mynd.




**5. mynd. Lutfalsligi parturin av lønini, ið vanligur nýtari hevur nýtt til matvørur. Upplýsingarnar um heimildirnar eru tíverri misfarnar.**

At prísurin fyri landbúnaðarvøru fellur í mun til lønina hjá restina av borgarunum hevur havt við sær, at landbúnaðurin skal lata meira og meira fyri at fáa somu løn.

## 3.2. Mjólkneytahaldið í vesturheiminum

### 3.2.1. Menningin

Fyri betur at skilja gongdina í neytahaldið í Føroyum, er neyðugt at kunna eitt sindur um støðuna í altjóða høpi. Neytahaldið í Danmark verður her nógv nýtt sum dømi um eitt nógv ment neytahald, har menningin gongur skjótt fyri seg – eisini mett í altjóða høpi.

Í evropeiskum samanhangi er miðalstøddin av mjólkarkvotunum í Føroyum lítil, sí 6. mynd.




Talið á bóndum í Danmark, sum hava neyt, er fallið sera nógv seinastu árini, 1990-2000, frá næstan 22.000 til stívliga 10.000. Donsku myndugleikarnir vænta, at gongdin ikki er steðgað, og at teir færru bøndurnir, sum eftir verða, vilja lata eins nógva mjólk, sum allir gera í dag, men heldur minni av kjøti, tí væntandi fellur talið á neytum rættiliga nógv, sí 1. talvu og 7. mynd.

**1. talva, Neytahald í Danmark, 1990–2010. (Landsbladet 25.01.2002, bls. 10)**

| Ár | **1990** | **2000** | **2010** |
|---|---|---|---|
| Bøndur við mjólkneytum | 21.935 | 10.327 | 4.800 |
| **Mjólkneytatal, 1.000 stk.** | 753 | 636 | 522 |
| **Miðalneytatal/ fjós** | 34 | 62 | 109 |
| **Latin mjólk, mió. kg** | 4.742 | 4.720 | 4.721 |
| **Neytakjøt, 1.000 tons** | 202 | 156 | 131 |
| **Mjólk/ fjósið (egin útrokn.)** | 216.184 | 457.054 | 983.541 |

Heimild: Danmarks statestik, Kødbrancens Fællesråd, Landboforeningerne




* Tal á mjólkneytafjósum í 2005 og 2015: Økologisk Jordbrug 25. feb 2005, bls. 2.

Gongdin seinastu 10 árini í Danmark hevur verið, at fjósini eru vorðin størri, tey lata nógv meira mjólk hvørt, og hava meira vídd tilsamans, men tó er minni vídd undir kúnna í meðal. Av tí at prísirnir fyri søluvørurnar eru mest sum óbroyttur hesi árini og fíggjarútreiðslurnar eru vaksnar, er úrslitið tað sama, sjálvt um fjósini lata nógv meira vøru. Sí 2. talvu.

**2. talva. Danskt neytahald 1993-2002. Landbrugsavisen, Agro, bls.7, 17.10.2003.**

| Ár | 1993 | 1994 | 1995 | 1996 | 1997 | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2003 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Fjós | 13.913 | 13.016 | 12.678 | 12.321 | 10.783 | 10.056 | 9.170 | 8.675 | 8.330 | 7.534 |
| Neyt | 46,2 | 48,9 | 49,6 | 52,3 | 56,1 | 59,5 | 63,2 | 70,1 | 76,4 | 77,6 |
| Vídd, ha | 50,7 | 53,1 | 54,4 | 57,8 | 61,8 | 64,1 | 68,4 | 73,8 | 77,9 | 82,0 |
| Skiftisavlop | 734 | 760 | 792 | 840 | 943 | 982 | 1.020 | 1.180 | 1.290 | 1.296 |
| Rakstrarútreiðslur | 245 | 266 | 289 | 325 | 364 | 364 | 402 | 453 | 511 | 531 |
| Avskrivingar | 105 | 109 | 117 | 126 | 137 | 148 | 165 | 186 | 200 | 205 |
| Fíggjarkostnaður | 199 | 194 | 206 | 225 | 247 | 261 | 274 | 334 | 404 | 383 |
| Úrslit | 185 | 191 | 180 | 164 | 195 | 209 | 179 | 207 | 175 | 177 |

Í Íslandi er gongdin tann sama. Í 1990 lótu 1.558 bøndur mjólk, nú eru teir 890, og væntað verður, at í 2013 verða teir bert 500-600, sí 8. mynd.



### 3.2.2. Avrokningarprísirnir fyri mjólk í ES, Nýsælandi og í Føroyum

Í Landsbladet, nr 22, 31. mai 2001 stóð ein áhugaverd stabbamynd av mjólkarprísinum í londunum í ES. Eg havi útbygt myndina við prísunum í Nýsælandi, Noregi, Íslandi og Føroyum, sí 9. mynd.




**Viðmerking til 9. mynd:** Landsbladet, nr 22, 31. mai 2001, bls. 11 Agro. Prísurin fyri Nýsæland er úr sama blaði, bls. 35 í høvuðsblaðnum, og er mettur eftir miðal av strikumyndini "Mælkeprisens udvikling" (GB). Prísurin fyri Føroyar er frá MBM, stuðulin 0,5 kr. fyri liturin. Harafturat kemur flutningsstuðulin 0,4 kr. fyri liturin, sum ikki er við í stabbamyndini.
Prísurin fyri Noreg er frá http://www.aksent.no/tine2002/p_ba/s_beretning/key.htm
Prísurin fyri Ísland er frá Erlu Bjarnadóttir, Bóndafelag Íslands, við telduposti 30.06.2003.

Trupult er at samanbera mjólkarprísir millum lond, tí ofta liggur nógv fjalt, t.d. lagalig fígging, gransking, ella t.d. ókeypis jørð í Føroyum! Ikki hevur ligið fyri at kannað, hvat fyri stuðul bøndurnir í ES, sum hava mjólkneyt, fáa. Týðiligt er, at prísirnir í Føroyum, Íslandi og Noregi eru nakað fyri seg, bæði við og uttan stuðul.

Í teimum stóru landbúnaðarlondunum broytist mjólkarprísurin rættiliga fitt yvir nøkur ár. Í Landsbladet/ Landbrugsavisen stendur í hvørji útgávu ein strikumynd yvir mjólkarprísin í nøkrum londum. Sí 10. mynd.




**10. mynd. Mjólkarprísir í Danmark, Hálandi, USA og í Nýsælandi 1966-2001**

Sum 10. mynd vísir, sær tað út til at bøndurnir í Hálandi og í Danmark fáa mest sum sama prís fyri mjólkina, um 2,5 kr. fyri liturin, og bøndurnir í USA fáa meira skiftandi prís. Bøndurnir í Nýsælandi fáa bert 1,1-1,5 kr. fyri liturin. Ein grund til, at tað letur seg gera, er, at har eru umstøðurnar so góðar, at neytini fyri tað mesta kunnu ganga úti alt árið.

### 3.2.3. Almennur stuðul

Ymist er, hvussu nógvan stuðul lond lata til landbúnaðin, sí 11. mynd




**Mynd 11. Partur av inntøkuni, sum er stuðul, %**

OECD s. f. "Agri*future*, for European Business Farmers" Max-Eyth-Verlagsgesells-schaft mbH, Frankfurt/Main, autumn 3/03, bls. 5
Føroyar: Beinleiðis stuðul, Føroya Jarðarráð, Sjúrður Knudsen.

Av inntøkuni hjá føroyskum mjólkneytabóndum er beinleiðis almenni stuðulin um 19%, sí 11. mynd frammanfyri. Tað er heldur lægri enn stuðulin í OECD-londunum, men væl hægri enn tað, sum bøndurnir í Avstralia og Nýsælandi fáa. Aðrar stuðulskipanir eru ikki tiknar við.

### 3.2.4. Stuðul – eingin stuðul

Donsku landbúnaðarfeløgini hava roknað út, at um allur stuðul og allar avmarkingar falla burtur, vil mjólkarprísurin hjá dønum falla og heimsmarknaðarprísurin hækka. Úrslitið fyri teir hevði verið, at bøndurnir við mjólkneytum í Danmark høvdu havt trupult við at klára seg í kappingini (Landsbladet, 25. jan. 2002, bls.11).

Í maimánaði 2002 stóð at lesa í Landsbladet (mín týðing): *"at støðan í Danmørkini skjótt kann gerast tann, at tað ikki longur loysir seg hjá teimum at hava neyt, sum lata mjólk til smør og ost, tí tað loysir seg betur at nýta jørðina til annað enn neytahald og heldur innflyta smør og ost"*.

Tá danir siga soleiðis, eiga vit í Føroyum at vera rættiliga varin við at gera íløgur í neytahaldið.

### 3.2.5. Stødd og úrslit, bóndin er avgerandi

Gongdin um allan heimin er, at garðarnir gerast størri og størri. Somuleiðis er við mjólkneyta-fjósunum. Fyrimunirnir við størri fjósum eru fleiri, men hvussu er við úrslitinum?

Donsk kanning vísir, at avlopið roknað fyri hvørja kúgv er tað sama, uttan mun til hvussu nógv neyt eru í fjósinum. Tað ger, at ársúrslitið hjá fjósunum lutfalsliga ikki broytist millum bólkarnar, sjálvt um fjósini verða størri - teir dugnaligu fáa mest burturúr fyri hvørja kúgv, um teir hava færri ella fleiri neyt. Tað sama kann sigast um teir minnu dugnaligu - teir fáa ikki meira burturúr fyri hvørja kúgv, sjálvt um teir fáa fleiri neyt. Sí 9. mynd. (Landsbladet 1. nov. 2002, bls. 8 Agro, sum aftur hevur tað úr faldaranum: **Produktionsøkonomi Kvæg 2002**).




Í kanningini, sí 12. mynd, hava teir tikið:

- 20% av fjósunum í ymsum støddum, sum klára seg best, og roknað miðaltalið út fyri hvørja stødd fyri seg
- 20% av fjósunum í ymsum støddum, sum klára seg ringast, og roknað miðaltalið fyri hvørja stødd fyri seg
- og miðaltalið av øllum fjósunum í ymsum støddum

Samanumtikið sigur Landsbladet, at tað eru bøndur, sum duga sítt yrki og fáa pening burturúr, og tað eru aðrir, sum ikki duga sítt yrki og tí einki fáa burturúr.

12. mynd vísir eisini, at av teimum 20% av fjósunum, sum klára seg ringast, fellur úrslitið ikki meira, tá ið tað verða um 150 neyt og fleiri. Í greinini verður einki víst til hetta. Um hugt verður at muninum millum teir 3 bólkarnar, sæst, at hann er tann sami. Tey 20% av fjósunum, sum klára seg best, økja avlopið enn meira, tá ið neytatalið fer upp um 110-150, og tað passar við, at tá steðgar niðurgongdin hjá teimum 20%, sum ikki klára seg.

Tað samsvarar væl við, at tað hevur sínar fyrimunir, at fjósini hava 110 - 150 neyt ella meira.

Í Landbrugsavisen, Agro bls. 7, 17.10.2003 er uppgjørt miðalúrslitið hjá mjólkneytabóndum í Danmark skift sundur eftir stødd, á nakað sama hátt sum í 12. stabbamynd, sí 3. talvu.

**3. talva**. Inntøkan hjá vanligum (ikki vistfrøðiligum), donskum mjólkneytabóndum skiftum eftir neytatalinum. Landbrugsavisen, Agro, bls.7, 17.10.2003.

| Ársneyt | < 50 | 50 - 80 | 80 – 110 | 110 - 150 | 150 – 200 | > 200 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tal á roknskapum | 772 | 1.000 | 759 | 463 | 76 | 29 |
| Tal á gørðum | 2.119 | 2.378 | 1.348 | 953 | 218 | 80 |
| Tal á neytum | 34,4 | 62,6 | 93,3 | 124,6 | 168,1 | 256,2 |
| Vídd, ha. | 41,0 | 66,0 | 94,3 | 114,2 | 163,9 | 221,3 |
| Úrslit | 129 | 183 | 161 | 169 | 192 | 400 |

Úrslitið vísir seg at vera betri, tá ið garðarnir eru stórir.

Upplýst verður eisini í greinini, at spreiðingin í úrslitinum er rættiliga stór í hvørjum einstøkum bólki. 400.000 kr. eru á muni millum besta fimting og ringasta fimting hjá bóndum við 25-50 neytum, og heilar 1,8 mió. kr. millum ringasta fimting og besta fimting hjá bóndum, sum hava fleiri enn 200 ársneyt.

Niðurstøðan í greinini var, at tað er bóndin sjálvur, sum er nógv mest avgerandi tátturin, um mjólkneytafjósini bera seg ella ikki og at tað loysir seg betur at hava neyt, tá ið fjósini eru stór.

### 3.2.6. Stór fjós, húskallar og frítíð

Nógvir danskir bøndur royna at fáa fjósini stór fyri at fáa so nógv avlop, at teir kunnu hava húskall. Sambært Troels Præst og Ane O. Andersen loysir tað seg ikki peningaliga (Landbrugsavisen, 41, 10. okt. 2003, bls. 29). Tey “smærru” fjósini hava fult so gott úrslit sum tey miðalstóru fjósini. Tað vísir seg nevniliga, at tá ið fjósið verður tað størri, økjast arbeiðstímarnir so nógv, at familjan framvegis hevur eins nógvar arbeiðstímar eftir at taka sær av, sum tá ið fjósið var minni, sjálvt um tey hava húskall.

Føroyskir bøndur, sum hava hug at økja um sítt virksemi, grundgeva ofta sínar ætlanir um størri fjós við, at teir vilja hava so stór fjós, at teir verða førir fyri at hava húskall.

### 3.2.7. Felagsfjós

Rættiliga vanligt er, at bøndur taka seg saman á ymsan hátt at samstarva, alt frá samstarvi um smáting, til samstarv við felags fjósi og bøi.

Fyrimunirnir eru nógvir við at samstarva. Sambært Ole C. Hallesby, ið er norskur búskaparfrøðingur (hevði skeið hjá Bóndafelagnum í febr. 2003), eru nógv viðurskifti, sum gera seg galdandi, tá ið felagsrakstur kemur upp á tal, men leggjast má doyðin á ikki at gera viðurskiftini meira fløkt enn allarhægst neyðugt.

Rættiliga vanligt er, at bøndur, sum hava mjólkneyt, taka seg saman at byggja fjós fyri at fáa fyrimun av støddini, og fyri at fáa meira skipaða frítíð.

Men tað er ikki bara sum at siga tað. Hóast samstarvið kann hava gingið heilt væl í 30 ár, kunnu trupulleikar brádliga stinga seg upp. T.d. um annar garðurin/ ein av gørðunum verður arvaður til næsta ættarliðið, sum ikki hevur hug at halda fram.

Ein trupulleiki í øðrum londum við felagsfjósum er, at felagsfjósini ikki altíð peningaliga eru heft beinleiðis at jørðini. Bøndurnir eiga sjálvir jørðina, og fjósið er oftast eitt felag fyri seg sjálvt. Tað ger, at um bøndurnir fara hvør til sín, er skjótt, at fíggingarstovnurin stendur eftir við einum fjósi, sum einki virði hevur (Ole Christen Hallesby 2003, pers.).

Í Føroyum skuldi trupulleikin við veðhaldinum ikki verið so ringur at loysa við núverandi ognar-viðurskiftum. Føroya landsstýri eigur fyri nógv tað mesta bæði jørð og fjós, og Búnaðargrunnurin fíggjar í stóran mun allar bøndurnar í landinum. Fyri at minka mest møguligt um undannevnda trupulleika eigur sáttmáli at verða skrivaður, sum er fyrireikaður upp á, at festari/ festarar gevast við sínum samstarvi ella verða ósamdir og tí ikki fáa samstarvað.

Búnaðarstovan og Búnaðargrunnurin mugu tryggja sær, at fjósið altíð sleppur fram at bønum at sláa og breiða, og at fjósið ikki verður læst úti frá veltimøguleikum, sum vórðu ávístir í sambandi við at velti- og byggiloyvini vórðu givin.

Áðrenn nakað verður gjørt við felagsfjós, eigur at verða kannað betur, hvussu royndirnar hava verið í grannalondunum við slíkum felagsskapum.

Eg eri komin fram á tvær heimildir í Noregi um felagsfjós/-rakstur:

Bókin: "*Samarbeid som drivkraft i næringsutviklingen*", 110 bls., apríl 1999, sum Det kgl. Selskab for Norges Vel gav út, lýsir evnið væl sambært Ole Chr. Hallesby (pers. 2003).

Á heimasíðuni http://www.hint.no/prosjekt/melkesamdrift/ ber til at finna upplýsingar um eitt dømi um felagsfjós frá fyrireikingini og til í dag, og har liggur væl fyri at kanna tilfar um felagsrakstur.

Í marsmánaði 2005 hevði Tor Breen, ráðgevi hjá Norges Vel fyrilestrarøð, 1½ dags skeið á Hotel Føroyum í Tórshavn um felagsrakstur og felagsfjós. Hann vísti á ymsar hættir at samstarva við maskinum. Eisini greiddi hann frá um felagsfjós, bæði um hvussu umráðandi góð fyrireiking er og hvørji fyrimunir og vansar eru við felagsfjósum. Hann vísti fleiri ferðir á, hvussu nógv greiðar og einfaldar avtalur høvdu at siga fyri gott samstarv.

Felagsfjós og -arbeiði

Nógv felagsarbeiði var í tí gamla føroyska samfelagnum, m.a. útróður, fuglaveiða. Men minni kent er, at langt upp í 19. øld varð bøurin, ið hvussu so er í tveimum bygdum, bæði veltur og hoyggjaður í felag. Um heystið varð hoyggj og kornskurður skift millum eigararnar. (Sands søga eftir Edvard Hjalt, 1943 og Jóannes Dalsgarð, Velbastað, pers.).

Fyri gott 20 árum síðan vórðu 2 felagsfjós bygd til mjólkneyt, men tey steðgaðu tíverri rættiliga skjótt upp sum felagsfjós. Eingin formlig frágreiðing er um, hví tað so var.

Fyri 1 ári síðan løgdu tveir yngri bøndur síni fjós og sínar kvotur saman. Tað er so stutt fráliðið, at teir tora onga niðurstøðu at gera, men higartil hevur tað gingið væl. Teir eru mest glaðir um at vera minni bundnir at fjósinum, serliga um vikuskiftini – og konurnar eru ikki minni glaðar um teirra avgerð.

Royndirnar við felagsfjósum ella felags rakstri við mjólkneytum í Danmark hava verið góðar seinastu árini. Felagsfjós, sum hava fleiri enn 150 neyt, geva meira av sær enn tilsvarandi fjós hjá einstaklingum (Arne Oksen, Landbrugsavisen, nr. 47, 2004 bls. 29).

Í Danmark eru fleiri enn 1.000 neytahald, sum hava 2 ella fleiri eigarar. Samarbeiðið er skipað á ymsan hátt, men teir flestu eru felags um alt, bæði bø og fjós. Teir flestu hava lagt virksemið í íognarfelag.

Felagsfjós, sum hava 190 mjólkneyt í miðal, hava eitt úrslit, ið er næstan 250.000 DKK betri enn tilsvarandi fjós hjá einstaklingum. Úrslitið áðrenn fíggjarkostnað og aftan á løn síggjast í talvu 3.1. Sjálvt um úrslitið verður rættað fyri feilin, sum kemur av, at felagsfjósini hava størri kvotur enn einstaklingsfjósini, er útslitið hjá felagsfjósunum betri.

Talva 3.1. Lyklatøl (2003) fyri felagsfjós, íognarfeløg og einstaklingsfjós við meira enn 150 neytum. (Arne Oksen, Landbrugsavisen, nr. 47, 2004 bls. 29)

| | Felagsfjós, íognarfeløg | Einstaklingsfjós |
|---|---|---|
| Tal á fjósum | 39* | 167 |
| Neyt | 190 | 187 |
| Vídd, ha | 184 | 173 |
| Kg mjólk/ kúgv, orkujavnað | 8.548 | 7.938 |
| Egið arbeiði, normtímar | 4.614 | 3.144 |
| Rakstrarúrslit áðrenn rentur, DKK | 1.644.000 | 1.211.000 |
| Arbeiðsløn** DKK | 630.000 | 439.000 |
| Avlop til fíggjargjald, DKK | 1.014.000 | 772.000 |
| Munur | uml. 242.000 | |
| Rakstrarúrslit, DKK pr. normtíma | 118 | 91 |

* av tí at bert 39 felagsgarðar eru við í greiningini, skal úrslitið takast við eitt sindur av fyrivarni
** løn fyri tíðina bøndurnir og teirra hjúnafelagar arbeiða á garðinum

Sum talvan vísir, arbeiða eigararnir 1.500 tímar meira árliga á garðinum við felagsrakstri. Men sjálvt á teimum gørðunum, har tað verða arbeiddir eins nógvir tímar, fáa felagsfjósini betri úrslit, m.a. 100 tons meira av mjólk, tí hvør kúgvin letur 500 kg meira av orkujavnaðari mjólk árliga.

Eisini á teimum gørðunum við felagsrakstri, sum hava færri neyt og minni av jørð enn víst í talvu 3.1, vinna garðarnir við felags rakstri meira enn teir, sum einstaklingar reka (Arne Oksen, Landbrugsavisen, nr. 47, 2004 bls. 29).
Men tað er ikki bara samarbeiði, sum gevur úrslit, leggur Arne O. afturat. Nakrir mjólkneytabøndur klára at fáa gott úrslit, uttan mun til støðd.

# 3.3. Neytahaldið í Føroyum síðan 1948

## 3.3.1. Menningin

Nógvar broytingar eru hendar í mjólkneytahaldinum í Føroyum seinastu hálvthundrað árini. Tey, sum vóru í Mjólkareftirlitinum í 1948/49 høvdu flestøll 1-2 kýr. Nú er miðaltalið um 15-20 neyt, sí 4. talvu og 13. mynd. Einki bendir á, at gongdin er steðgað.

**13. Mynd. Fjósstøddirnar í 1948/49, 1969/70, 1997 og í 2001**




4. talva. Lutfallið í % millum hvussu nógv ársneyt, bøndur høvdu skrásett hjá Føroya Neytaeftirliti árini 1948/49, 1969/70, 1997 og í 2001.

| Ár / árs-neyt/ bónda | 1948/49 | 1969/70 | 1997 | 2001** |
|---|---|---|---|---|
| < 5 | 95,9* | 77 | 13,5 | 4,75 |
| 5-10 | 4,1 | 16,4 | 10,8 | 20,9 |
| 10-15 | | 6,6 | 13,5 | 11,6 |
| 15-20 | | | 35,1 | 30,2 |
| 20-25 | | | 16,2 | 14 |
| 25-30 | | | 5,4 | 14 |
| >30 | | | 5,4 | 4,7 |

* 74,3% høvdu minni enn 1½ árskúgv
** 43 fjós

Um hugt verður at, hvussu nógv neyt eru skrásett í sambandi við stráfóðuruppmátingina, sæst, at gongdin er enn tann sama, fjósini verða støðugt størri og størri, sí 14. mynd (R = 0,968). Verður gongdin tann sama, koma bøndurnir, sum søkja um stráfóðurstuðul, at hava skrásett 42 – 43 stuðulsneyt í miðal í 2015.




Í 2003 lótu 60-70 bøndur mjólk til Meginfelag Búnaðarmanna, MBM. Í 1985 vóru teir 107. Gongdin er greið. Sí 15. mynd. (R = -0,978)




Eftir hesum at døma gevast 2,4 bóndi í miðal um árið. Verður tað gongdin fram til 2015, verða tað 36 bøndur/ fjós, sum tá lata smáar 200.000 litrar av mjólk árliga.

Í 2002 lótu bøndurnir í miðal 108.550 litrar. Ymist er, hvussu nógva mjólk teir lata, alt frá fáum 1.000 litrum til upp ímóti 300.000 litrum. Tó lata teir flestu 100.000-150.000 litrar, sí 16. mynd.




3.3.2. Nývelting og skrásett stráfóður seinnu árini

Seinnu árini hevur minni og minni av nýggjum bøi fingið veltistuðul, sí 17. mynd (**korkalittu stabbarnir**). Í 1991 fingu bøndur stuðul fyri at hava velt knappliga ½ millión fermetrar (50 ha). Fyrra partin av nítiárunum var tað um 1/4 mió. fermetrar (25 ha), og nú seinastu árini er tað um 100.000 fermetrar (10 ha) og minni.

**17. mynd.** Skrásett mongd av 1) stráfóðri, m³ súrhoyggj (**grønu stabbarnir**) 2) skrásett lendi velt úr nýggjum (**reyðu stabbarnir**) og 3) ætlað skrásett stráfóður, m³ 1992 + 25 m³/ha (**grønu + hvítu stabbarnir**).



Ein grund til fallið 1992/1993 av skrásettum lendi veltum upp úr nýggjum (**grønu stabbarnir**) er uttan iva tann, at tá kom kravið um, at bóndi skal hava roknskap fyri raksturin og vera meirvirðisskrásettur fyri at fáa landbúnaðarstuðul. Tá duttu fleiri av teimum smærru bóndunum og allir teir smáu ognarmenninir burturúr.

Men hinvegin er tað er undranarvert, at tann nýggi bøurin ikki økir um mongdina av skrásettum stráfóðri.

Ár 2000 hækkar skrásetta mongdin tó nakað aftur. Hetta kemur møguliga av, at Føroya Jarðarráð hevur yvirmett mongdina av stráfóðri í hvørji rulluni. Men síðan lækkar mongdin aftur, í miðal 250 m³ árliga, og at vísitalið er $r^2$= -0,606 sigur, at tølini samsvara nøkulunda við eina linju. Hví skrásetta mongdin at stráfóðri fellur, er ikki lætt at siga. T.d. var veðrið gott í hoyna árini 2001, 2002 og 2003. Møguliga er tað tunga útgerðin til rullurnar, sum kleyrar bøin.

Siga vit, at tann víddin, sum hevur fingið veltistuðul eitt ár, gevur 25 m³/ha av súrhoyggi árið eftir og komandi árini, og tann gamli bøurin gevur tað sama, sum hann gav í 1991, hevði skrásetta stráfóðurmongdin fyri 2002 verið oman fyri 22.454 m³, **grønu + hvítu stabbarnir,** - skrásettir vórðu bert 16.983 m³.

Ongar kanningar eru gjørdar fyri at finna fram til, hví stráfóðurmongdin ikki økist í tann mun, sum bøndurnir fáa meira bø. Grundirnar kunnu vera fleiri:

1) Ein stórur partur av teimum, sum hevur fingið veltistuðul, hevur bert seyð
2) Bøndurnir taða bøin minni
3) Long tíð er fráliðin, síðan bøurin varð veltur
4) Bøndurnir lata seyðin fáa meira og meira av bønum
5) Bøndur hava lagt gamlan bø burtur fyri tann nýggja
6) Bøndur, sum hava sligið læntan bø, eru givnir við tí, so hvørt teir hava velt upp úr nýggjum
7) Bøndur eru givnir at hava neyt og søkja tí ikki eftir stráfóðurstuðli, og eingin annar mjólkneytabóndi nýtir teirra bø
8) Bøndur eru givnir at søkja um stráfóðurstuðul
9) Bøurin gevur minni gras samanlagt, tí hann er illa farin av "tungum amboðum".

Eftir míni meting greiða grundgevingarnar 1-3 bert í minni mun frá, hví munurin er so stórur millum væntaða og skrásetta grasmongd.

At nakað av tíð er fráliðið, síðan bøurin var veltur og sáddur, kann neyvan vera annað enn ein lítil partur. Tað, sum bøurin gevur meira fyrstu 3 árini aftaná at hava verið veltur, vegar ikki upp ímóti tí, sum mist verður í sambandi við veltingina. (Magnus Jente, Gras og grasdyrkning, Landbruksforlaget 1981 ISBN 82-529-0490-4, bls. 222.

**17.1 Mynd**. Lutfalsliga mongdin av hvussu nógv hoyggj fæst av bønum, aftan á at hann er veltur og sáddur av nýggjum .




Eg meti, at orsøkin til, at føroysku bøndurnir fáa heldur lítið gras av bønum, er eitt samanspæl millum grundgevingarnar 4-9.

17. mynd vísir greitt, at tað er ikki nóg mikið bara at lata veltistuðul og stráfóðurstuðul við núverandi treytum. Tað má fáast nógv betri trygd fyri, at veltistuðulin kemur landbúnaðinum til nyttu, og at jørð, sum hevur fingið veltistuðul, ikki bara verður løgd undir seyðatraðk ella sleppur at falla aftur í haga.

Fyri at fáa eina fatan av, hvussu nógv stráfóður tann einstaki bóndin fær skrásett, havi eg sett skrásetingarnar av stráfóðri og av nýlendi hjá 4 hampiliga góðum bóndum, sum allir høvdu um 10 ha av bøi, yvir nøkur ár inn í eina talvu og gjørt stabbamyndir av úrslitinum, sí mynd 17.2.

## 17.2 Mynd. Skrásett stráfóður og skrásett nýlendi hjá 4 bóndum,sum hava neyt



Við at seta *árstølini* 1994-2004 sum brigdil (x) (da. variabel) og *skrásett stráfóður* fyri hvørt árið sum úrslit (y) og rokna linjuvísa sambandið millum tey, sæst, at toluliga gott samband er millum tíðina og úrslitið. Vísitalið (da. korrelation) er millum 0,53 og 0,87 fyri framgongdina, og halltalið er 1 – 29,7 m³/ár, sí talvu 4.1.

**Talva 4.1**. Økingin av skrásettum stráfóðri, m³ í mun til %-økingina av bønum hjá 4 bóndum við mjólkneytum

| Bóndi | A | B | C | D |
|---|---|---|---|---|
| **Halltal, m³/ár** | 29,7 | 4,8 | 6,5 | 1,0 |
| **Vísital** | 0,784 | 0,530 | 0,596 | 0,870 |

Tað vil siga, at hesir fýra bøndurnir økja sína mongd av skrásettum stráfóðri við millum 1 og 29,7 m³ árliga hesi árini fyri hvørt % bøurin er øktur.

Í talvu 4.2 sæst, hvussu nógv bøurin hjá hesum somu bóndum er øktur hesi árini í %, eins og hvussu nógv meira teir hava fingið skrásett av stráfóðri í %.

Við at seta %-økingina av bøi sum brigdil (x) og %-økingina av skrásettum stráfóðri sum úrslit (y) inn í frymil fyri linju, fæst, at fyri hvørt %, ið bøurin verður størri, økist mongdin av stráfóðri við 0,973%, og vísitalið er 0,645.

**Talva 4.2.** %-økingini av skrásettum stráfóðri í mun til %-økingina av bønum hjá 4 bóndum við mjólkneytum

| Bóndi | A | B | C | D |
|---|---|---|---|---|
| **bøur øktur, %** | 55 | 27 | 19 | 47 |
| **Skrásett stráfóður økt %** | 71,5 | 18,8 | 25,8 | 19 |
| **% øking av skr. stráf./ %-øking av bønum** | 1,3 | 0,7 | 1,4 | 0,4 |

Tað vil siga, at hvørja ferð hesir 4 bøndurnir í miðal øktu sín bø við 1%, øktist teirra mongd av skrásettum stráfóðri við einum lítlum %. Vísitalið 0,645 sigur, at tað er eitt nøkulunda gott samsvar millum grundtølini og linjuna.

Talva 4.2 vísir eisini, at 2 av hesum bóndunum økja mongdina av stráfóðri nógv meira enn hinir, 0,4 til 1,4% fyri hvørt %, ið teirra bøur verður størri, ella 3 ferðir so nógv, og tað er ikki í lagi.

### 3.3.3. Stráfóður til hvørja mjólkkúgv

Størri fjósini eru, meira skal hvør einstakur bóndi hoyggja, fyri at hvørt einstakt neyt skal hava eins nógv stráfóður. Tað vísir seg, at størru bøndurnir í Føroyum hava næstan eins nógv stráfóður undir kúnna sum teir smærru. Sí 18. mynd.




**18. Mynd. m³ stráfóður/stuðulsneyt, 2002**

Sum tað sæst á 18. mynd, fáa bøndur, sum hava niðan fyri 5 stráfóðurneyt, skrásett væl meira stráfóður enn teir, sum hava fleiri neyt. Men viðmerkjast má, at sjálvt um teirra stráfóður er skrásett, hava teir ikki fingið stráfóðurstuðul fyri meira enn tað, ið reglurnar loyva.

Eftir hesum at døma klára tey størstu fjósini eins væl at fáa stráfóður til neytini sum tey minnu.

Vert er at geva gætur, at stráfóðrið verður skrásett um heystið, og er tað ætlað til vetrarfóður fram til fyrst í juni ella til fyrst í juli, t.e. til einar 9 mánaðir.

### 3.3.4. Fóðurvirknið og innflutningurin av fóðri

Fóðurtørvin, sum føroyskir bøndur ikki klára at nøkta við egnum stráfóðri, nøkta teir við innfluttum kraftfóðri og innfluttum hoyggi.

Seinni árini hevur innflutningurin av kraftfóðri verið 4-5.000 tons, og okkurt árið 5-6.000 tons, sí 5. talvu.

**5. talva**. Innflutt kraftfóður

| **År** | **A-bland.** | **Til seyð** | **Annað** | **Tils.** | |
|---|---|---|---|---|---|
| | **tons** | **tons** | **tons** | **tons** | **kr.** |
| **1992** | 3823a | 1.994 | | | |
| **1993** | 5936b | 1.596 | 1.373 | 8.904 | |
| **1994 c** | 4.280 | 1.833 | 1.215 | 7.328 | |
| **1995 c** | 5.113 | 1.816 | 212 | 7.141 | 11.646 |
| **1996 c** | 5.138 | 1.992 | 265 | 7.395 | 15.384 |
| **1997 c** | 6.434 | 2.518 | 374 | 9.326 | 33.580 |
| **1998 c** | 5.089 | 1.991 | 295 | 7.375 | 15.105 |
| **1999 c** | 4.471 | 1.412 | 1.729 | 7.612 | 15.403 |
| **2000 c** | 4.750 | 1.011 | 1.817 | 7.578 | 14.723 |
| **2001** | 6.074 | 1.293 | 2.324 | 9.691 | 28.654 |
| **2002** | 4.570 | 973 | 1.748 | 7.291 | 18.379 |

Sambært Hagstovuni hevur áður ikki verið skilt millum innflutningin av kraftfóðri til “neyt og seyð” og til “alifisk”, men tað verður tað nú. Hagstovan skilir ikki millum kraftfóður til neyt, seyð og onnur húsdýr.

Fyri at meta um hvussu nógv er innflutt/ selt av ymsu sløgunum, havi eg nýtt lutfallið millum ymsu sløgini MBM, ið hevur selt.

Men tað er ikki bara at skilja innflutningin at. Trupult er at siga, hvussu kraftfóðrið verður nýtt. Eingin vissa er fyri, at A-blanding ætlað til neyt ikki verður nýtt til seyð, ella at seyðafóður ikki verður nýtt til sleptar kýr, til ungneyt ella til tarvkálvar.

Um roknað verður við, at neytini hava fingið “A-blandingina” og seyðurin “seyðablandingina”, hava neytini í tíðarskeiðinum 1998-2000 í miðal fingið um 4.770 tons um árið, ella um 4,9 mió. FE av kraftfóðri (0,9% t.e. og 0,878 kg t.e./FE).

MBM innvigaði um 7 mió. litrar í 2001 og í 2002.

Sambært “Håndbog for driftsplanlægning 1988/89”, bls. 41-42, skal kúgv, sum letur 7.180 litrar av 4%-mjólk, hava 5.540 FE um árið og ársviðseting 1.500 FE. Tær útrokningarnar havi eg brúkt niðanfyri.
Seta vit sum fyritreytir: 1) fyri hvørja mjólkkúgv er 0,5 ársviðseting 2) at 85% av fóðrinum kemur til nyttu, t.e. 85% fóðurvirkni (da. fodereffektivitet), so verður heildarfóðurtørvurin 6.290 FE fyri kúgv við viðseting, ella 0,876 FE/l av mjólk. Heildarfóðurtørvurin hjá øllum mjólkneytunum við viðseting í Føroyum verður tá 0,876 * 7 mió. FE = 6,13 mió. FE.

Árini 2000-2002 vóru í miðal skrásettir 18.500 m³ av súrhoyggi, og 1.259 vaksin neyt í miðal.

Siga vit, at

- 90% av skrásetta stráfóðrinum 2000-2002 er nýtt til neytini
- Skrásetta stráfóðrið er til 9 mánaðir
- Øll skrásett neyt “> 2 ár” eru mjólkneyt
- Talið á tarvkálvum í skrásetingini er lítið í mun til kvígukálvarnar og at
- neytini fáa lutfalsliga eins nógv gras um sumrarnar, sum tey fáa hoyggj um vetrarnar
- 120 FE/m³

gevur skrásetta stráfóðrið 2,664 mió. FE. (0,9 * 18.500 * 120 * 12/9)

Samanlagt fáa neytini tá 7,56 mió. FE, sum er 1,43 mió. FE meira enn ástøðiligi tørvurin. Tað vil siga, at neytini fáa 23% meira fóður enn teimum tørvar, ella at onnur dýr fáa hetta fóðrið.

Men hetta úrslitið hongur nógv saman við, hvussu nógvar FE eru í hvørjum rúmmetri av súrhoyggi/ stráfóðri.

Í 6. talvu er eisini roknað við 100 og 110 FE/m³, og hvussu nógv hetta kostar bóndunum ov nógv árliga.

**6. talva**. Mett nýtsla av fóðri og ástøðiligur fóðurtørvur.

| FE/m³ av súrhoynum | 100 | 110 | 120 |
|---|---|---|---|
| Stráfóður, 90% til mjólkneyt, FE | 2,22 | 2,44 | 2,66 mió. |
| Kraftfóður, A-blanding, FE | 4,9 mió. | 4,9 mió. | 4,9 mió. |
| % av fóðrinum, sum er kraftfóður | 68,8 | 66,8 | 64,8 |
| Keypt hoyggj, FE | X | X | X |
| Fóður tilsamans, 85% fóðurvirkni, FE | 7,12 mió. | 7,34 mió. | 7,56 mió. |
| Ástøðiligur fóðurtørvur, FE | 6,13 mió. | 6,13 mió. | 6,13 mió. |
| Ovnýtsla av fóðri, FE | 0,99 mió. | 1,21 mió. | 1,43 mió. |
| Ovnýtsla í % av ást. fóðurt. | 16,2 | 19,7 | 23,3 |
| Meirprísur, 2,4 kr./FE, (kraftfóður), kr. | 2,38 mió. | 2,90 mió. | 3,43 mió. |
| Meirprísur fyri liturin, kr./l | 0,340 | 0,414 | 0,490 |

Eftir útrokningunum í 6. talvu at døma, eru 64,8-68,8% av fóðurnýtsluni hjá mjólkneytabóndum kraftfóður, og ovnýtslan av fóðri kostar millum 2,34-3,43 mió. kr. tilsamans, ella 0,34-0,49 kr. fyri hvønn latnan liturin av mjólk. **Í útrokningunum er ikki lagt upp fyri, at bøndurnir keypa nakað av hoyggi –** 7. talva vísir innflutningin av stráfóðri.

Fleiri grundir kunnu vera fyri, at útrokningin ikki passar: (**raðfylgjan niðanfyri er tilvildarlig)**

- Upplýstu hagtølini fyri innflutt fóður fata bæði um fóður til vanlig húsdýr og til alifisk
- Parturin av stráfóðrinum, sum mjólkneytini fáa, er skeivt mettur
- “A-blanding” verður partvíst nýtt til seyð ella annað
- “A-blanding” verður partvíst nýtt til tarvkálvar og tarvar
- “Seyðafóður” verður partvíst nýtt til kálvar og ungneyt
- FE í hvørjum rúmmetri av skrásettum stráfóðri er mett ov høgt
- Útrokningin er skeiv ella annar feilur

Innflutta stráfóðrið er ikki við í útrokningunum. Var tað gjørt, varð úrslitið enn verri. Grundgevingarnar fyri ikki at nýta innflutta stráfóðrið í útrokningini eru:

- Stór óvissa er um, hvussu stóran part mjólkneytabøndurnir nýta til neytini
- Stór óvissa er um, annaðhvørt tað er turt hoyggj ella súrhoyggj í rullum

Innflutningurin av hoyggi er so stórur, at hann **eigur heilt avgjørt** at verða havdur í huga, sí 7. talvu.

**7. talva**. Hoyggj, grasperlur og hálmur*, innflutt

| | Hoyggj | | Hálmur | | Tons tils. |
|---|---|---|---|---|---|
| **Ár** | **tons** | **1.000 kr.** | **tons** | **1.000 kr.** | **tons** |
| **1995** | 640 | 1.330 | 239 | 5 | 879 |
| **1996** | 430 | 800 | 588 | 3 | 1.018 |
| **1997** | 788 | 1.450 | 13 | 39 | 801 |
| **1998** | 739 | 1.225 | 7 | 23 | 746 |
| **1999*** | 1.132 | 1.966 | | | 1.132 |
| **2000*** | 802 | 1.485 | | | 802 |
| **2001*** | 907 | 1.630 | | | |
| **2002*** | 1.815 | 3.815 | | | |

***** tølini eru ikki greinað í hagtalsyvirlitunum

Fleiri viðurskifti ávirka fóðurvirknið (da. fodereffektiviteten):

| | Fóðurvirkni |
|---|---|
| 1.* Gott stráfóður | ↗ |
| 2. Dýrt stráfóður í mun til kraftfóðrið | ↘ |
| 3. Høgur mjólkarprísur í mun til marginala fóðurprísin | ↘ |
| 4. Neytini fáa lutfalsliga lítið av stráfóðri | ↘ |
| 5. Røkt | ↗ |

* Raðfylgjan er tilvildarlig. (Ole Aaes, Dansk Kvægs Kongres 2003)

Fáa neytini meira, enn teimum tørvar, lækkar fóðurvirknið. Fáa tey 1 FE meira enn tørvin um dagin, fellur fóðurvirknið 2,5%, fáa tey 2 FE, lækkar fóðurvirknið 6% og fáa tey 3 FE meira um dagin, enn teimum tørvar, lækkar fóðurvirknið við 11% (Ole Aaes, Dansk Kvægs Kongres 2003).

Yvirlitið omanfyri gevur eina ábending um, hví bøndurnir í Føroyum ikki fáa nógv burtur úr fóðrinum: 1) stráfóðrið er dýrt, 2) mjólkarprísurin er høgur í mun til marginala fóðurprísin (seinast givna FE = kraftfóður) og 3) neytini fáa lutfalsliga nógv kraftfóður. (Raðfylgjan er tilvildarlig)

# 4. Nýggj fjós og nývelting

## 4.1. Íløgutørvur komandi árini

MBM hevur innvigað um 6-7 mió. litrar seinnu árini og roknar ikki við, at kvoturnar økjast nakað munandi komandi árini (MBM, 2003).

Roknast kann tí við, at neytatalið komandi árini verður á leið tað sama, sum tað er nú.

Íløgurnar komandi árini koma tí ikki at økja um mjólkarmongdina, men at broyta bygnaðin: færri, størri, meira djóravinalig og arbeiðsligari fjós, betri og størri køstar, og meira og betri bøur. Tørvurin á handilstøðum verður heldur minni, tí meira nytta fæst úr tøðunum við nýggjum tøttum og taktum køstum.

## 4.2. Stráfóður og bøur

Einasta fóður, ið vit kunnu útvega okkum sjálv her í landinum, er gras og hoyggj, oftast súrt, restin má keypast.

Meiri ein kúgv mjólkar, meiri og betri fóður krevur hon. Er stráfóðrið vánaligt, kann bert lítil partur av fóðurtørvinum vera egið stráfóður, og bóndin kann eins tað sama keypa gott hoyggi úr útlondum. Tá sleppur hann frá øllum íløgunum í bø, brunnar, slóttuútgerð og annað. Men tá er ivasamt, um vit kunnu tosa um føroyska mjólk og enn minni um matvørutrygd.

Tí má fyrsta fyritreytin fyri, at bóndi sleppur at byggja nýtt fjós, vera:

- at nóg mikið av bøi er til neytini, sum kann verða arbeiddur við maskinum, ella
- at nóg mikið av egnaðum lendi er til staðar, sum kann veltast fyri rímiligar pengar uttan at náttúruprísurin verður órímiliga høgur
- og at nóg stórar víddir eru, har tøðini undan neytunum kunnu sprænast

Havast má í huga, at tøðini undan neytunum ofta krevja meira vídd enn bøurin er víður.

*Húsdýraáburður á bøin*

Áðrenn krøv kunnu setast til, hvussu stóra vídd av bøi skal vera til tøðini undan eini kúgv, kvígu ella øðrum, er neyðugt at vita, hvussu nógv tøð, ið bøurin klárar at taka ímóti. Eisini er neyðugt at vita, hvussu nógv gras hvør víddareind av bønum kann geva, uttan at áburðurin dálkar avlopsvatnið meira, enn tað kann góðtakast.

Norskar tilráðingar, Husdyrgjødsel, ISBN 82-90598-10-6, siga, at flottøð ikki eru nakað serliga væl egnað at breiða í beitilendi ella í hagan. Helst skulu ikki breiðast meiri enn 20 tons/ha árliga. Best er, um tøðini eru blandað 1:1 við vatni.

Á slóttubø kann (sama heimild) sprænast heldur meira, upp til 80 tons/ha í Noregi, sí talvu 7.1.

**Talva 7.1.** Rúmmetrar av húsdýraáburði, sum í mesta lagi kann breiðast á bøin, á beiti ella á nýlendi í Noregi. Tillagað e. talvu 26 í Husdyrgjødsel, Norsk Landbrukshøgskole et.al., ISBN 82-90598-10-6.

| | **Flottøð** | **Blandað við vatni, 1:1** | **Land** |
|---|---|---|---|
| **Eldri bøur** | 3+2* | 5+3 | 3+2 |
| **Beiti** | (2) | 2 | 2 |
| **Nýlendi, ikki upp úr nýggjum** | 2+(1,5)** | 4+(2) | 2+(2) |

** Har 2 tøl standa, er fyrra talið breiðing um várið og seinna breiðing aftan á 1. slótturin.*
*** Har klombur () standa um tølini, er betri ikki at breiða, ella nyttan ivasom.*

Talva 7.1. er fyri norskar umstøður, og hon sigur, hvussu nógv í mesta lagi kann breiðast. Men havast má í huga, at 1) meira lívrunnið tilfar er í jørðini, 2) kaldari veðurlagið er og 3) meira tað regnar, minni av flottøðum tolir bøurin av.

Eftir hesum meti eg, at vit í Føroyum í mesta lagi mugu nýta 40 m³/ha til hampiliga góðan bø. Roknast kann við, at í nógvum førum tolir bøurin minni.

Undan eini kúgv við viðseting koma 20-25 m³ av flottøðum fyri árið, ella 15-19 m³ fyri 9 mánaðir. Tað vil siga, at 1 ha tekur í allar mesta lagi ímóti flottøðunum undan tveimum mjólkneytum við viðseting.

*Hvussu nógv hoyggj fæst av bønum?*
Royndarstøðin prógvaði í 1988, at til ber at fáa 50 tons av súrhoyggi av hvørjum ha. Tað svarar til um 50-58 m³ ella um 6.000-7000 FE av súrhoyggi fyri hvønn ha. Roknað er við 5-7% svinni, 800 kg/m³, 120 FE/m³. Skal fáast bara nøkulunda so nógv av bønum árliga, má tað vera góður bøur, sum er væl veltur og væl røktur, sáddur við góðum grassløgum, væl taðaður og ikki fyrilitsleyst bitin av seyði. Hjá vanligum bónda ber ikki til javnan at fáa so nógv - men langt er niður til teirra, sum fáa um 25 m³/ha ella væl minni.

Bóndi fekk í 2000 um 10.000 FE av einum ha!

Mín meting er, at tað vanliga eigur at lata seg gera at fáa 4-5.000 FE, 32-42 m³ av hvørjum hektara hjá dugnaligum bónda.

Kann bøurin ikki geva meira enn um 20-25 m³/ha av súrhoyggi, gevur tað onga meining at nýta góðar pengar til at velta upp úr nýggjum, at gera vegir, súrhoysbrunnar o.a. - pengar, sum kunnu koma væl betri til nyttu aðrastaðni.

### 4.2.2. Prísurin fyri at velta upp úr nýggjum – eitt hugsað dømi

Hugsa vit okkum, at eitt nýtt fjós verður bygt, og at 60 ha av góðum bøi verða veltir úr nýggjum. Stykkið er ein javnsíðaður fýrkantur, 775 m á kant.

Fyri at kunna nýta nútímans landbúnaðaramboð, sum ofta eru tung, er neyðug við vegi rundan um stóran part av bønum, og við nøkrum stikkvegum gjøgnum stykkið. Siga vit, at í mesta lagi 200 metrar skulu vera millum vegirnar, mugu 3 vegir vera ígjøgnum stykkið og helst vegur við 3 síður. Sí 19. mynd.

Tað vil siga, at um 6 ferðirnar 775 metrar av vegi skulu gerast, 4,65 km tilsamans. Sambært royndum gravimaskinførara kostar ein metur av vegi um 500 kr. at gera ella tilsamans 2,3 mió. kr.

Prísurin á vegnum, roknaður upp á hvønn fermeturin av bøi, kostar í hesum døminum 3,833 kr. Liggur illa fyri, kosta vegirnir væl meira.

**19. mynd. Skitsa av fyrimyndarligum bøi**



At grava 1 fermetur av rímiliga góðum haga til bø kostar um 4 kr./m (Kaj Skibenæs, pers.). At saksa ein hektara og fræ kostar 5.500 kr. (Peter Haahr, stjóri á Royndarstøðini, pers.). Hvør fermetur av bøi, uttan vegir og uttan afturlagdar veitir kostar 4,55 kr., og 60 ha kosta tá 3,6 mió. kr.

60 ha av bø við 4,65 km av vegi, men **uttan afturlagdar veitir** kosta eftir hesum 5,9 mió. kr. (2,3 +3,6 mió.) ella 9,833 kr./m², sí 8. talvu.

Í hesum døminum er stykkið nógv regluligari, enn roknast kann við í náttúruni. Meira óregluligt stykkið er, meira kostar tað at fáa velt, og lutfalsliga meira vegur krevst.

**8. talva. Meting av prísinum at velta 60 ha av "sera góðum lendi" upp úr nýggjum – uttan afturlagdar veitir og stik.**

| | Eindir | prísur kr. | At fíggja aftan á stuðul, kr. |
|---|---|---|---|
| Veltingin tilsamans | 600.000 m² á 4,55 | 3.600.000 | |
| Stuðul fyri bø | 600.000 m² á 4 kr. | 2.400.000 | |
| At fíggja, bøur | | | 1.200.000 |
| Vegur, vegagerð | 4,65 km á 500 kr. | 2.300.000 | |
| Stuðul fyri veg | 4.650 m² á 300 kr. | 1.395.000 | |
| At fíggja, vegir | | | 905.000 |
| **Tilsamans** | | **5.900.000** | **2.100.000** |

Fær umrøddi bøurin almennan stuðul á sama støði sum í 2001, vil bóndin fáa 2,4 mió. kr. í stuðli fyri bøin og 1.620.000 kr. fyri vegin. Eftir at fíggja verða tá 2,1 mió. kr. **(600.000 * 4 kr./m²) (5.400 m² * 300 kr./m)**

At forrenta 2,1 mió. kr. kostar við 20 ára avdráttartíð við láni úr Búnaðargrunninum 3% p.a.141.153 kr. árliga. Við meira vanligari marknaðarrentu, 6,75% p.a., er árligi prísurin 194.652 kr. Prísurin fyri samfelagið er framvegis 6,3 mió. kr., og árligi kostnaðurin ávikavist 423.459 kr. við 3% p.a. og 593.170 kr. við 6,75% p.a., sí 9. talvu.

**9. talva**. Rentur og avdrøg fyri at velta 60 ha, 20 ára avdráttartíð.

| | Íløga | 3% p.a. | Banki, 6,75% p.a. |
|---|---|---|---|
| Við stuðli | 2.100.000 | 141.153 | 194.652 |
| Uttan stuðul | 6.300.000 | 423.459 | 583.170 |

*Veitir*

Í roknistykkinum omanfyri er ikki roknað við veitum, hvørki opnum ella afturlagdum. Tað kemur av, at rættiliga ymist er, hvussu stórur tørvurin er á veitum. Tí metti eg, at betri er at hava veitirnar í einum roknistykki fyri seg.

Flestu bøndurnir, sum nýta slangur, nýta 2” og 3” slangur til veitirnar, og tær kosta ávikavist 11,- og 21,- kr./m (Svend Krosstein, tlf.). Siga vit, at 2/3 av veitunum eru 2” og 1/3 er 3”, kostar meðal meturin 14,3 kr./m.

Fyri at slangurnar skulu taka betur ímóti og veitirnar halda longur, er best at hava skerv rundanum slangurnar. Eg havi roknað við 20 * 20 cm, ella 0,04 $m^3$/metur av veit. Skervurin kostar 139,2 kr./$m^3$ (www.landsverk.fo), ella 5,57 kr. meturin av afturlagdari veit.

Ein hampilig gravimaskina grevur um 100 metur um tíman og klárar at leggja nakað tað sama aftur um tíman, um roknað verður við, at eitt sindur av tíð fer til spillis. Ein gravimaskinutími kostar 350,- kr. (Kaj Skibenæs, tlf.). ella 7 kr./m av veit.

Tilsamans kostar ein metur av afturlagdari veit um 33,9,- kr./m ~ 34 kr./m, og tá er eingin arbeiðsløn roknað til bóndan (14,3+5,57+7+7). Bóndin má tá taka sær av:

1) flutningi av skervinum til bøin
2) flutningi av tilfari út í bøin og
3) arbeiðinum av fáa skervin í veitirnar

Eru 20 metrar millum veitirnar, og tí um 500 metrar av veitum í hvørjum hektaranum, kostar tær 17.000,- kr. Í talvu 9.1. sæst meting av, hvussu nógv veitirnar kosta, um frástøðan millum veitirnar er ávikavist: 5, 10, 20 og 30 metrar.

**Talva 9.1.** Prísurin fyri grevstur, skerv og slangur til afturlagdar veitir, tó ikki arbeiðsløn til bóndan og flutningurin av skervinum til bøin og heldur ikki út í veitirnar.

| Frástøða millum veitirnar | kr./ha | kr./$m^2$ | kr./60 ha |
|---|---|---|---|
| 5 | 51.000 | 5,10 | 3.060.000 |
| 10 | 34.000 | 3,40 | 2.040.000 |
| 20 | 17.000 | 1,70 | 1.020.000 |
| 30 | 11.333 | 1,13 | 680.000 |

Samanlagt kostar 1 $m^2$ av bøi við afturlagdum veitum og við 200 metrum millum vegirnar 9,51 – 13,48 kr. (4,55 fyri bøin + 3,833 fyri vegirnar + (1,13-5,1 hægsti og lægsti prísurin fyri afturlagdu veitirnar)

### 4.2.3. Stráfóður, so nógv neytini klára at eta

Ganga vit út frá somu fortreytum, sum eru settar upp á bls. 35, hava føroysku mjólkneytabøndurnir í miðal um 17,6 m³ av stráfóðri til hvørja kúgv við viðseting. (0,9 * 18.500/1.259)(12/9)

Útrokningar, ið eg gjørdi fyri Føroya Jarðarráð í 1994, "Stráfóður og stráfóðurstuðulsskipanir", vístu, at ein kúgv við viðseting, sum mjólkar 6.500 litrar árliga, í mesta lagi klárar at eta 24 m³ av góðum stráfóðri, um hon skal fáa fóður javnvigað til hennara tørv.

Tað vil siga, at bøndurnir í miðal skulu hava 6,4 m³ av stráfóðri afturat fyri hvørja kúgv fyri at hava so nógv, sum neytini klára at eta av góðum súrhoyggi aftur at neyðuga kraftfóðrinum. Tilsamans vanta sostatt um 8.000 rúmmetrar av stráfóðri. (1.259 * 4,6)

Sum tað sæst á bls. 39, kann ein hektari geva upp til 10.000 FE, ella 83 rúmmetrar. Men tað verður ikki javnan, og tí verður heldur roknað við ávikavist 25 og 40 m³/ha. Skulu øll neytini við viðseting hava so nógv stráfóður, sum tey kunnu eta aftur at neyðuga kraftfóðrinum, skulu bøndurnir hava 200-300 ha av bøi aftur, sí 10. talvu. (8.000/25 og 8.000/40)

**10. talva.** Tørvurin á bøi fyri at neytini skulu fáa tað av stráfóðri, tey klára at eta, um núverandi bøurin verður, sum er.

| Stráfóður, m³/ha | **25 m³/ha** | **40 m³/ha** |
|---|---|---|
| Mett vídd av bøi, ha | 320 | 200 |

Um nú fjós verða bygt til 40-60-100 neyt, kann roknast við, at ein partur av núverandi bønum verður burturlagdur sum ógnaður. Hvussu nógv verður lagt burtur, er ómøguligt at siga. Eg meti, at um 1/4-1/3 av núverandi bønum verður lagdur burtur, ikki er heilt av leið. Av teimum 18.500 m³ av stráfóðri, ið eru skrásettir seinnu árini, skulu sostatt 4.625-6.170 m³ (18.500/4 og 18.500/3) fáast av øðrum bøi. Við ávikavist 25 og 40 m³/ha, skulu 154 og 247 ha av bøi veltast afturat fyri at fáa tað stráfóðrið aftur, sí 11. talvu.

**11. talva**. Tørvurin at velta upp úr nýggjum fyri 1) núverandi bø, sum verður lagdur burtur, og 2) fyri at fáa tað, sum restar í, so neytini fáa tað, tey klára at eta av stráfóðri aftur at neyðuga kraftfóðrinum.

| Súrhoyggj, m³/ha | **25** | **40** |
|---|---|---|
| 1/4 av bønum burturlagdur, ha | 185 | 115 |
| 1/3 av bønum burturlagdur, ha | 247 | 154 |
| Fyri at nøkta fullan tørv, áðrenn burturlegging | 320 | 200 |
| Neyðugt at velta afturat, 1/3 burturlagdur | 505 | 315 |
| Neyðugt at velta afturat, 1/3 burturlagdur | 567 | 469 |

Tað vil siga, at millum 315 og 567 ha av bøi mugu brótast upp úr nýggjum fyri burturlagdan bø og fyri at neytini skulu fáa tað av stráfóðri, tey klára at eta aftur at neyðuga kraftfóðrinum.

Skal tað gerast komandi 20 árini, skulu millum 16 og 28 ha veltast árliga.

#### 4.2.4. Veltistuðul

Hesi seinnu árini, 1999-2002, hevur stuðulin til vegir verið millum 28-84% av veltistuðlinum, í meðal 32 %, sí 12. talvu.

**12. talva**. Lutfallið millum stuðul til bø og vegir 1999-2002.

| Ár | Bøur kr. | Vegir kr. | Lutfall b/v |
|---|---|---|---|
| 1999 | 277.844 | 358.800 | 0,58 |
| 2000 | 155.279 | 131.100 | 0,84 |
| 2001 | 507.226 | 162.570 | 0,32 |
| 2002 | 342.220 | 97.500 | 0,28 |
| **Tilsamans** | **1.282.569** | **749.970** | **0,58** |

Færri og færri fólk skulu taka sær av sláttrinum og tøbreiðsluni. Fyri at tað skal lata seg gera, verða amboðini størri og størri. Tí meti eg eftir bestu sannføring, at tørvurin á vegi verður størri komandi árini, enn hann hevur verið árini nú frammanundan. Eisini meti eg, at fleiri bøndur hava tørv á meira vegi í teirra núverandi bøi. Tí eigur stuðulin til vegir avgjørt ikki at verða avmarkaður meira, enn tað hann er í dag.

Sum dømi á bls. 40 vísir, kostar nýlendi ikki minni enn 4,55 kr./m², og vegurin 3,833 kr./m² av bøi, tilsamans 8,383 kr./m², og tá eru útreiðslurnar til afturlagdu veitirnar ikki við. Á bls. 41 er mett, at afturlagdar veitir kosta millum 1,13 og 3,4 kr./m², alt eftir hvussu tætt er millum teirra, og tá er eingin løn roknað til arbeiðið at fáa slangur og skerv upp á pláss í bønum og niður í veitirnar.

Tað vil siga, at hvør fermeturin kostar ikki minni enn 9,51-3,48 kr./m².

Í talvu 12.1 havi eg sett upp stuðulstørvurin í síni heild út frá hesum fyritreytum:

- veltistuðulin er 4, 5,5 ella 7 kr./m²
- lutfallið millum vegir og bø er tað sama sum í døminum á bls. 40
- vegstuðulin 2,325 ella 3,833 (300 kr./m og 500 kr./m)
- velt verður millum 16 og 28 ha árliga

**Talva 12.1. Mettur tørvur á veltistuðli, tá ið 16 ella 28 ha verða veltir árliga.**

| | Veltistuðul til bøin | | | Veltistuðul til vegir | |
|---|---|---|---|---|---|
| | mill. kr. | mill. kr. | mill. kr. | mill. kr. | mill. kr. |
| kr./m² | 4 | 5,5 | 7 | 2,325* | 3,833** |
| 16 ha | 0,64 | 0,88 | 1,12 | 0,372 | 0,613 |
| 28 ha | 1,12 | 1,54 | 1,96 | 0,651 | 1,073 |

** 300 kr./m ** 500 kr./m*

Verður stuðulin innan fyri karmarnar, ið eru settir upp í talvu 12.1., og 16 ha veltir árliga, verður stuðulin millum 1,012-1,733 mió. kr. árliga. Verða 28 ha veltir árliga við somu fyritreytum, verður stuðulin 1,77-3,03 mió. kr. árliga.

### 4.2.5. Hvør skal velta?

Tey fyrst árini aftan á at farið var at velta upp úr nýggjum við gravimaskinum, fingið bøndurnir aðrar at grava fyri seg. Restina gjørdu bøndurnir sjálvir. Seinastu árini hava nakrir bøndur sjálvir keypt sær graviútgerð.

Men tað sær út til, at bøndurnir oftast ikki sjálvir klára at fáa velt nýggjan bø. Arbeiðini steðga tíverri ofta upp, og gravimaskinurnar standa bara og farast.

Er tá ikki betur at aðrir taka sær av grevstrinum. Í samband við slík arbeiðir, er altíð nokk av øðrum hjá bóndanum at takast við.

### 4.2.6. Leiga øki ella makaskifta um hagalendi?

Um neytahaldið skal hava nakran møguleika at hóra undan komandi árini, er neyðugt, at tað, sum verður velt:

- er gott at velta
- víddirnar eru rímiliga væl samanhangandi og stórar
- bóndin hevur ræðisrættindi til økið, og
- at fíggjarliga ábyrgdin er greið

Føroya Landsstýri eigur sum er um helvtina av hagalendinum í Føroyum – restin er einskild ogn.

Ognin hjá Føroya Landsstýri er ikki javnt spjadd um alt landið. Lutfalsliga stórir partar eru savnaðir á ávísum støðum, t.d. í Streymoynni. Tað ger, at nógv góð øki, sum kundu verið støðið undir framtíðar mjólkneytahaldi, ikki eru atkomandi hjá núverandi bóndum. Eisini eru góð velt øki, ið eru egnað til nútímans amboð, fest út til smærri festi t.d. á Sandi, í Hvalbø. Ringt er hjá mjólkneytabóndunum at sleppa fram at hesum góða bønum.

Mjólkneytabóndur hava ikki roynt nógv at sleppa í óðalhagar at velta, og tær fáu royndirnar, sum eru gjørdar, hava ikki verið serliga góðar, tó undantøk eru.

Men skulu vit sleppa víðari við mjólkneytahaldinum í Føroyum, slepst ikki undan at nýta nøkur av hesum økjunum. Spurningurin er bara, hvussu skulu nýtiligar avtalur fáast upp á pláss?

Ein møguleiki er, at bøndurnir/ festini lata ein part at teirra høgum ella gamlan bø, sum ikki er nýtiligur til nútímans arbeiðsamboð afturfyri at fáa lendi at velta í øðrum høgum, ella fyri at fáa brúksrættindi til bø, sum í dag bert verður nýttur til beiti. Ein annar møguleiki kundi verið brúksbýti ella makaskifti.

### 4.2.7. Lendi at velta

Einki yvirlit er tøkt yvir, hvussu nógvur bøur er í Føroyum í dag, hvussu nógv lendi er farið og fer undir bygging ella asfalt. Heldur ikki er nágreiniliga kannað, hvussu nógv kann veltast. Tað er ikki nøktandi fyri eitt framkomið samfelag, sum helst skuldi lagt upp til eina burðardygga menning.

Skal toluliga kappingarførur og burðardyggur landbúnaður vera í landinum í framtíðini, er umráðandi, at øki, sum fyri rímiligan penga og náttúruprís kunnu veltast, verða vard og atkomandi, tá ið tørvur er teimum.

Við støði í máliborðsbløðum havi eg leystliga mett um, hvar øki eru, ið eru nýtilig og nóg stór til at velta til bø við 60 neytum við viðseting, sjá yvirlitið niðanfyri.

6 øki í Suðuroy
8 øki í Sandoy
9 øki í Streymoy
5 øki í Vágunum
11 øki í Eysturoy og
2 øki í Norðuroyggjum

tilsamans 42 øki í øllum landinum. Men hetta er bert ein leyslig meting, og hon má tí takast við fyrivarni. Smærru oyggjarnar eru ikki taldar við.

Tað er als ikki skilagott at binda øll hesi økini til framtíðar neytahald. Seyðahaldið stendur fyri stórum broytingum í framtíðini, sum helst koma at økja tørvin á bøi nógv.

Fyritøkan Spf. Munin, sum fæst við at seta teldutøkar kortloysnir (GIS) upp, metir, at tað ber til við teldu og røttu forritum út frá teldutøkum máliborðsbløðum at meta um, hvørji øki kunnu veltast til bø til neytahald.

Eigur tað almenna ikki at fáa kannað, hvussu stórur núverandi bøurin er, hvussu nógv verður bygt, og hvussu nógv kann veltast fyri rímiligan penga og fyri rímiligan náttúruprís?

Kanning av veltingarjørð

Hvussu ber einfalt, skjótt og álítandi til at meta um, um óvelt lendi er egnað at verða velt upp úr nýggjum? At gera tað við berum eygum og einum spaka, er heldur vágaligt, serliga um tað snýr seg um at byggja eitt nýtt brúk upp úr nýggjum fyri fleiri mió. kr.

Ymisk útgerð finst, sum ger tað lættari at meta um, um eitt øki er egnað at verða velt ella ikki.

Í greinum í Norsk Landabrug, nr. 20, 2001, bls. 12-13, og nr. 14, 2003, bls. 21-22 verður víst á útgerð at máta, hvussu bøur/ lendi er. Tað verður gjørt við at máta, hvussu væl jørðin leiður ravmagn 1½ metur niður. Útgerðin kann verður drigin aftur úr einum traktori ella einari 4-hjólaðari súkklu við upp til 30 km/t. Planteforsk Ap í Noregi ger mátingar fyri áhugað eftir rokning.

Sí meira á: http://www.planteforsk.no/dokumenter/tjenester/em38/em38.html

Í greinum í Norsk Landabrug í des. 2004, stóð grein um jarðradara. Útgerðin kann, á sama hátt sum omannevnda útgerð, verða drigin aftur úr einum traktori ella einari 4-hjólaðari súkklu. Radarin sendir radarbylgjur niður í jørðina, sum vísir jørðildi neyvari enn kanning av, hvussu jørðin leiðir ravmagn.

Eigur tað at verða kannað, um slík útgerð nýtast her?

### 4.2.8. Aðrir vegir og SEV

Aftur at vegnum í bønum, koma vegir til sjálvi økini, har bøurin og fjósini eru. Tað má vera ein nógv betri vegur, tí eftir honum kom tungir bilar at koyra. Hvussu og hvør skal fíggja slíkar vegir, er eitt mál, sum er uttan fyri endamálið við hesum áliti. Landsverk metir, at einbreytaður vegur við víkiplássum, fyrr kallaður “stuðulsvegur”, kostar um 1.400 kr./meturin. Asfalt kostar um 800 kr./m, tilsamans 2.200 kr./m. (Landsverk, Asbjørn Mortensen, teldubræv 13. des. 2004)

Er neyðugt at gera 1 km av vegi fyri at fáa gjørt nýtt fjós, skulu 2,2 mió. kr. til bara fyri at sleppa til og frá.

Møgulig nýggj fjós koma flestøll at verða bygd uttan fyri vanlig bygd øki, og tá verður neyðugt at fáa SEV lagt til fjósið. Prísurin fyri SEV hongur nógv saman við frástøðuni frá núverandi SEV-linju, og um tað snýr seg um vanliga SEV-linju ella um SEV-háspenningslinju, og um hvussu strekt SEV-kervið er.

Nær við verandi lágspenningskervi
Íbindingin 5.000,- + 200 kr fyri hvørt amp omanfyri 35 amp.

Upp til 500 metrar frá lágspenningskervi
Loysnin er ofta tann, at SEC letur kaðalin og setur kaðalskáp upp við fjósið – og bóndin grevur kaðalin niður. Roknast kann oftast við einum prísi um 15.000,- kr.

Fjósið stendur tætt við háspenningskervi
Neyðugt er at byggja spenningsskiftistøð (transformarastøð). Roknast má við 50.000 – 100.000 kr. Afturat hesum skal leggjast kaðal + kaðaveit frá spennisskiftisstøð til málaratalvu – bóndin kann sjálvur grava veitina.

Fjósið stendur tætt við háspenningskervi
Saman sum dømi beint omanfyri, men roknast má við kaðali, um 80 kr/m.

Dømi, fjós 1,5 km frá háspenningslinju og 1 km frá landsvegi.

| | |
|---|---|
| SEV íbindingin: | 130 – 180.000,- kr, + grevsturin av veitini og annað |
| Vegur, uttan asfalt | 1,4 mió kr. |
| Vegur, við asfalti | 2,2 mió kr. |

## 4.3. Fjósslag og stødd

Skulu nógv neyt við viðseting røktast nøktandi við minst møguligari arbeiðsmegi, er umráðandi, at fjósið er bygt á ein slíkan hátt,

- at neytini best møguliga fáa nøktað sín natúrliga tørv í fjósinum uttan av vera í vanda fyri at fáa skaða ella pínu, og
- at bóndin ella hansara arbeiðsfólk ikki verða sjúk av at arbeiða í fjósinum
- at byggiprísurin og útreiðslurnar til røkt eru lægst møguligar

Nógv bendur á, at besta loysnin fyri at náa hesum málinum, er at byggja væl innrættað óbjálvað leysgongufjós, sum eru væl størri og bíligari fyri hvønn básin, enn fjósini, ið vit eru von við.

### 4.3.2. Nýggj fjós

Bara 4 nýggj fjós er bygd í landinum seinastu 15 árini. Av teimum eru bert tvey í miðalstødd – hini eru smá fjós. Bert 2 leysgongufjós eru í landinum, annað er nýtt og rímiliga gott, hitt er 20-25 ár og vánaligt. Hini fjósini eru smá faststøðufjós, mett við dagsins stikku. Tað vil siga, at tørvur er á at byggja fjós til (næstan) øll neytini í landinum komandi 20-25 árini, ella fyrr.

Fleiri hættir eru at innrætta leysgongufjós. Eitt, sum ger flestu innrættingarhættirnar ónýtiligar hjá okkum, er tørvurin á hálmi ella øðrum tilfari at breiða undir neytini. Lars E.R. (NRF) metti í 2001, at leysgongufjós við legubásum við gummimottum ella madrassum eru best egnað til umstøðurnar í størsta partinum av Noregi. Hann metti eisini, at tað var frægasta loysnin í Føroyum.

Eg síggi onga grund til ikki at taka undir við honum.

Tvey sløg av gólvum verða nýtt í hesum fjósunum: 1) betonggólv við sóparum/ skavarum og 2) betongrimagólv. Í skrivandi løtu dugi eg ikki at siga fyrimunir og vansar við hesum sløgunum, uttan tað, at betongrimagólvini eru væl dýrari at gera og halda styttri.

Onnur gólv eru á royndarstigi, sum kunnu vísa seg at vera betri enn tey undannevndu. (Bondevennen 45, 2004, bls. 25).

Leysgongufjós eru arbeiðsligari enn faststøðufjós. Serliga er:

- léttari at mjólka nógvum neytum í leysgongufjósum
- léttari er at síggja, tá ið neytini eru til tarvs

men:

- ❖ tey eru dýrari at byggja, m.a. tí hvør kúgvin krevur væl størri vídd samanborið við faststøðufjós
- ❖ neytini eru oftari plágað av sjúkum kleyvum – tí kleyvarnar eru mest sum altíð skitnar og vátar
- ❖ neytini eta meira, tí tey flyta seg meira

Tað hevur nógv at siga fyri heilsustøðuna hjá mjólkneytunum, at tey hava tað gott og at tey fáa tað, teimum tørvar. Ikki minni týdning hevur tað, at kálvarnir verða væl føddir, og at kvígurnar hava tað gott í uppvøkstrinum.

Neyt, sum ganga leys, tá ið tey vaksa upp, roynast betur enn tey, sum standa á bási í uppvøkstrinum, og nógv betur enn tey, sum ganga og liva á betongrimagólvi í uppvøkstrinum, tey:

- vaksa skjótari bæði sum kálvar og kvígur
- eru minni sjúkar, bæði sum kálvar, kvígur og vaksnar
- kvidnast skjótari
- mjólka meira uttan at eta tað meira
- og tær liva longur

Men tað er ikki minni umráðandi við einum góðum bónda, tá ið talan er um leysgongufjós, tí neytini eru fleiri, tey ganga leys, og klára seg nógv sjálv. Hugsar bóndin ikki um at hava dagligt samband við neytini, serliga kálvarnar og ungneytini, gerast tey vill og vandamikil sum vaksin. Fyrr slapst ikki undan at vera í tøttum sambandi við neytini. Tað er ikki ein ókendur trupulleiki í stórum fjósum uttanlands, at neyt eru vill, tí tey hava verið í minna lagi í sambandi við fólk sum kálvar og ungneyt.

Nýggj tøkni

Menningin gongur skjótt. M.a. ber nú til at festa ein mátara á hvørja kúgv, kvígu ella á hvønn kálv, sum eru í samband við fjóstelduna. Við hesi útgerð ber til at skráseta, hvussu virkið hvørt dýrið er. Út frá teirri skrásetingini ber til at meta nøkulunda um, um kúgvin er til tarvs ella um okkurt er galið. Tá ið mjólkað verður við nútímans mjólkiútgerð, kann útgerðin kanna mjólkina á ymsan hátt og skráseta mátingarnar, hvørja ferð mjólkað verður.

Uttan iva verður útgerðin meira ment í framtíðini, og fleiri upplýsingar kunnu fáast inn á telduna.

Á henda hátt ber til at hava so neyvt eftirlit við hvørjum einstakari kúgv, sum vit ikki vildu droymt um fyri bert heilt fáum árum síðan. Men hetta eftirlit verður gjørt av telduni. Er okkurt áfatt við

onkrari kúgv, sigur teldan frá. Tá má røktarin hyggja at hesi kúgv og at skrásetingunum á telduni og gera niðurstøðu út frá tí.

Eisini er útgerð við at verða ment í Hálandi, har neyt kunnu fáa blandað fóður (da. fuldfoder) í smáum nøgdum úr eini sjálvtøku, har pláss er til 16 neyt (Bondevennen, 45, 2004, bls. 25).

Eydnast ætlanin, verður ikki neyðugt við dýra og tøkniliga bindandi fóðurbrettinum í framtíðini.

Øll henda nýggja tøknin kemur fult og heilt at broyta mátan, vit hava mjólkneyt uppá, og førleikakrøvini til bóndan verða ikki minni.

### 4.3.3. Óbjálvað, sjálvútluftandi leysgongufjós, rennigarðar – ella út um summarið

Samanborið við fjósini í londunum Suðurevropa, eru vanligu fjósini, ið vit kenna í Norðurlondum, rættiliga innistongd og tøtt. Ofta eru tey eisini bjálvað. Tískil kostaðu tey nógv, tá ið tey vórðu bygd, umframt at støðuga útluftingin er dýr.

Tað hevur vísti seg, at fjósini vóru meira háttað eftir, at bóndin skuldi hava tað fjálgt, tá ið hann var í fjósinum, heldur enn at neytini skuldu hava tað sum best. Fyri at minka um byggi- og rakstrarút-reiðslurnar var fyri árum síðan farið undir at byggja sjálvútluftandi óbjálvað leysgongufjós í USA og í Kanada, oftast bygd sum stórar hallir.

Hetta hevur víst seg at bera væl til. Byggihátturin hevur breitt seg um allan vesturheimin.

Men nú hava hálendingar ment eitt fjós, sum verður bygt eftir nøkulunda sama byggileisti sum vakstrarhúsini verða bygd eftir. Hesin byggihátturin er 30-50% bíligari at byggja enn hallirnar, sum hava verið og verða brúktar til óbjálvað leysgongufjós. “Vakstrarhús”-fjósini eru nógv lættari og bíligari at útbyggja, samanborið við hallirnar (Bart van Gool, Bondevennen, 44, 2004). Higartil eru 5 slík fjós bygd í Hálandi, men tey eru ikki roynd í støðum, har nógvur kavi legst.

Tá ið fjósini eru vorðin so stór, eru neytini minni og minni úti á beiti. Hetta merkist eisini í Føroyum, um enn í minni mun. Fleiri bøndur hava bert ungneytini úti um summarið, mjólkneytini standa inni alt árið – restina av lívinum!

Í flestum/ øllum Norðurlondum er tað lógarkravt, at neytini skulu sleppa út ein part av árinum. Ivasamt er, hvussu strangt eftirlit er við hesum – og hvussu nøktandi eftirlit kann havast við kravinum?

Tá ið fjósini eru heilt stór, ber ikki væl til bara at sleppa øllum neytum í bøin ella í hagan um summarið. Ein grund er, at tá ið so nógv neyt verða slept út, er skjótt at alt verður kleyvað upp, um ikki økini eru heilt stór. Og størri økini verða, truplari verður at hava neytini at ganga aftur og fram millum beitið og fjósið at verða mjólkað – tí ikki ber til at mjólka so nógvum neytum úti í bønum, og serliga ikki um neytini eru vand við sjálvvirkandi mjólkiskipan.

Tí er tað eitt gott hugskot at hava rennigarðar til neytini. Á tann hátt kunnu tey sleppa út hvønn dag á árinum. Spurningurin er, um rennigarðar ikki eru ein loysn? Tá kunnu neytini mest sum hvønn dag sleppa út fyri dyr.

Tað er ikki ókent í Føroyum at lata neytini av og á sleppa út í ánni ella í løkin at brynna um veturin.

Marin S. Hansen (f. 1930), Nólsoy, ættað úr Dali og Magnus Magnussen, Húsavík, 1928-2005: Neytini ótu og spældu eina løtu uttanfyri og komu síðan sjálv inn aftur. Var ein tíð gingin ímillum at tey sluppu út, leikaðu tey so í av gleði, at tey fóru av fótum.

Petur Hentze, f. uml. 1945, haldbóndi, Sandi. Bøndurnir í Trøðum á Sandi sleptu altíð neytunum út at brynna í ánni eina ferð um dagin allan veturin, og neytini høvdu fast brynnupláss, og klandraður ikki sørt um tey bestu plássini. Tey í Uttastovu góvust ikki við tí, fyrr enn tá ið nýggja fjósið varð bygt í 1963.

Erik Mortensen, f. 1930, haldbóndi, Øravík: Fyri hansara tíð sleptu teir neytunum útum í ánna at drekka.

Í øðrum bygdum lá ikki so væl fyri. Har var vanligt at lata tey sleppa útum tíðliga um várið. Í fyrstuni bert eina løtu, síðan longur og longur, til tey at enda gingu úti alt samdøgrið (Katrina Svarthamar (f. 1950), Skælingi).

Cornelius Reinert, f. uml. 1939, bóndi, Kaldbak: Fyrst hann minnist, bryntu teir neytini við spann, vatn var í kjallaranum. Men ein veturin loysti abbi hansara neytini út hvønn dag, og so fóru tey sjálv í ánna, og tá ið tey vóru liðug, komu tey niðan aftur.

Aksal á Bøgarði (f. uml. 1955), Kaldbak, hevur havt ein lítlan rennigarð til síni neyt í eini 10-15 ár. Hann heldur seg í dag ikki kunna hava neyt uttan rennigarðin. Ungneytini hevur hann úti alt árið. Hann hevur ikki havt eitt sjúkt ungneyt øll hesi árini, og tey hava ongar trupulleikar, tá ið tey kálva. Aksal sleppur eisini teimum vaksnu neytunum út av og á. Pláss er fyri umleið helvtini hvørja ferðina, og teimum dámar væl úti. Tá ið tey hava verið úti nóg leingi, fara tey "at larma og vilja sleppa innaftur". Ein partur av rennigarðinum er taktur. Tá ið tað er vátt, halda neytini til undir tekjuni, og har liggja tey um náttina. Í kava dámar teimum eins væl bara at liggja í kavanum.

Aksal metir, at tað er einki at ivast í, at hálvopnu fjósini, nú verða bygd í grannalondunum, eisini kunnu nýtast her hjá okkum. Rennigarðar eiga at vera ein partur av framtíðar fjósunum. Best er helst, um rennigarðurin er í tveimum ella trimum, tí neytini skulu helst kenna hvørt annað, tá ið tey sleppa at ganga leys saman (Aksal á Bøgarði, pers.)

### 4.3.4. Stødd á fjósum og prísur fyri hvønn básin

Stórur prísmunur er á, hvussu nógv eitt fjós kostar fyri hvørja mjólkkúgv. Tá ið eitt fjós verður bygt til smá 20 neyt, kostar hvørt neytapláss 3 ferðir so nógv, sum tá ið bygt verður til 60 neyt. (Lars Erik Ruud, Geno/NRF, á skeiði í 2001) Prísurin fyri hvønn básin hækkar ikki aftur, fyrr enn fjósstøddin fer upp um 120 neyt, sí 20. mynd, sum er eftirgjørd.

Uttan iva hækkar talið á neytum, sum ein maður kann røkta dagliga, so hvørt sum fjóstøknin broytist og mennist. Tað sama er helst eisini galdandi fyri prísin á básunum í mun til fjósstøddina. So hvørt sum tøknin mennist, verða fjósini helst størri og størri, áðrenn prísurin fyri hvønn básin er lægstur, og áðrenn hann aftur fer at hækka.




Tað finnast heimasíður, har til ber at finna ymsar upplýsingar t.d. prísir og skitsur fyri hvørja byggieind.

Dømi um slíkar heimasíður er:
http://www.lr.dk/applikationer/kate/viskategori.asp?ID=ka00400001000016000200

og

www.snd.no/kufjos

Eg havi tilvitandi valt ikki at gera meira við prísin á fjósunum her. Heldur skjóti eg upp, at Búnaðarstovan og Búnaðargrunnurin fíggja eina ráðstevnu um mjólkneytahaldið í Føroyum í heyst, sí hjáløgdu skjøl.

#### 4.3.6. Fyrireiking til fjósbygging

At byggja nýtt fjós er eitt rættiliga stórt tak, uttan mun til um tað er ein bóndi, ið letur fjós byggja, ella tað snýr seg um felagsfjós. Nógv er at taka støðu til.

Eitt tað fyrsta, støða takast má til, er hvat fyri tøkni skal nýtast til stráfóðrið, serliga hvussu stráfóðrið skal gevast, áðrenn farið verður undir at byggja nýtt fjós. Tað ber (mest sum) ikki til at broyta bygnaðin í fjósinum uttan órímiliga stóra og dýra umbygging. Er ein skipan vald, ja, so er hon vald.

Og eisini á hesum økini gongur menningin skjótt. Hálendingar er við at menna eina skipan, sum broytir mátan neytini fáa uppá heilt, sí bls. 47. Fæst tann skipanin at virka, kollveltir hon innrættingina av fjósunum.

Eisini er umráðandi, at innrættingin av fjósinum verður væl fyrireika, fyri at pláss er bæði fyri kálvum, ungneytum og mjólkneytunum, og at møguligt er at byggja út.

Fleiri møguleikar eru at fáa innlit í, hvussu nútímans mjólkneytafjós kunnu innrættast. Danska leiðbeiningin "*Indretning av stalde til kvæg, Tværfaglig rapport*", 3. udgave, ISSN 1395-8542, 2001, Landbrugets Rådgivningscenter er sera hent.

Um byggjast skulu hálvopin fjós við natúrligari útlufting er alneyðugt at heinta vitan aðrastaðni frá, t.d. úr Danmark, Noregi, Svøríki og/ ella Íslandi. Í Føroyum er ofta nógvur vindur og regn/ kavi í

senn. Tað sama er galdandi í Íslandi. Teir hava ikki enn bygt “hálvopin” fjós, og hugsa serliga um trupulleikan við “vatnrættum” regni”.

Fyri at bygningur og innrætting skulu hava eina livitíð, sum er nøktandi í mun til prís og endamál, er umráðandi, at bygt verður við skili, og at tær royndirnar, aðrir hava fingið, í mestan mun verða brúktar sum leiðbeiningar. Vanligt var at geva slíkar út á prenti, nú finnast tær eisini á alnótini, t.d. Landbrugets byggablade finnast á heimasíðuni: www.lr.dk.

### 4.3.7. Ráðgeving og royndir

Nógv færri fólk eru á gørðunum í dag samanborið við fyrr. Tað ger garðarnar nógv meira viðbreknar fyri hóttafalli av einumhvørjum slagi. Tá bert eitt vaksið fólk ella heilt fáa vaksin fólk eru á gørðunum, er beinanvegin, at neyðug vitan ikki er tøk á gørðunum, um hóttafall kemur á.

Snýr tað seg um felagsfjós, er hesin trupulleikin ikki so stórur.

Menningin á mest sum øllum økjum gongur skjótt fyri seg. Ikki kann á nakran hátt roknast við, at hvør einstakur bóndi sjálvur skal gera royndir av ymsum slagi. Tí er tørvurin á eini virkandi ráðgevingar- og royndarskipan størri enn nakrantíð.

Sum støðan er í dag, hava vit eina reint almenna ráðgevingar- og royndarskipan, har játtanin bert er til tað neyðturviliga, og bert nøkulunda til at halda bygningarnar í standi. Her má broyting koma í.

Best var, um bøndurnir á ein ella annan hátt sjálvir vóru við til at fíggja ráðgevingarskipanina, t.d. við at lata nøkur oyru av hvørjum litri av mjólk í ein grunn, og/ ella við at lata eitt ávíst gjald fyri hvønn áseyðin. Tað kundi eisini verið gjørt við brúkaragjaldi. Tá var helst størri møguleiki fyri, at bøndurnir vóru áhugaðir at fáa ráðgevingina og royndarvirksemið meira virkið. Almenna játtanin eigur tó altíð at tryggja tað grundleggjandi virksemið.

Grundleggjandi royndarvirksemið eigur eisini at verða fíggjað av tí almenna, eins og tað almenna eigur at vera við til at tryggja, at ráðgevar og onnur serkøn í skipanini kunnu dagføra sína vitan nøktandi.

Áhugafelagsskapir, felags royndir

Í Norðurnoregi skipaðu granskarar og ráðgevar fyri einum 3 árum síðan seg í ein áhugafelagsskap at savna vitan um, hvussu óbjálvað leysgongufjós kunnu byggjast har. Ikki ber til uttan nakað bara at nýta royndir aðrastaðni frá har, tí umstøðurnar eru heilt øðrvísi.. Eg havi verið í sambandi við bólkin, og hava teir lovað at veita okkum hjálp, tá ið teir eru komnir longri.

Nakað tað sama verður gjørt í Danmark, har “erfa”-bólkar verða skipaðir á teimum ymsu fakøkjunum. Í erfabólkunum eru bæði bøndur og ráðgevar.

Umhvørvið í Føroyum er ikki nóg stórt til slíkar felagsskapir fyri ráðgevarar. Einast møguleikin er at royna at hava gott samstarv bólkar og persónar aðrastaðni, men tað krevur, at støðið her í Føroyum er í lagi. Bóndurnir í Suðurstreymoy hava góðar royndir av at hittast óformliga av og á, tað skuldi eisini veri gjørt aðrar staðir í landinum.

Tá ið nýtt fjós skal byggjast, er umráðandi, at tað verður fyrireikað so væl, sum til ber. Ein part av fyrireikingini skal bóndin sjálvur gera, men hann má og eigur at søkja sær serkøna leiðbeining.

Ringt er at fáa nøktandi ráðgeving frá einum einstakum fólki, tí økini eru nógv: fyriskipan, bygging, fígging, umhvørvi, nútímans tøkni og innrætting av fjósum.

Donsk ráðgeving

Donsk kanning millum bøndur, sum nýliga hava bygt sær nýggj fjós, vísti, at 20% vóru ikki nøgdir við innrættingina, 30% vóru ikki nøgdir við ráðgevingina, og 38% hildu, at trupult er at finna ráðgevar, sum fevna um alt fakið (KvægInfo nr. 1166, Ole Kristensen og Erik Maegaard, sí heimasíðuna www.lr.dk).

At flyta í nýtt fjós

Eitt, sum vanliga tíverri ikki verður hugsað nóg nógv um, er, hvussu ein best ber seg at, tá ið flutt verður í nýtt fjós.

Fyri úrslitið 1. árið í nýggja fjósinum er umráðandi, at rætt verður farið fram, tá ið neytini verða flutt í nýtt fjós, har umstøðurnar als ikki eru tær, neytini eru von við. Bóndin eigur tí at fyrireika flytingina væl, áðrenn hann flytur neytini í nýggja fjósið. Verður skeivt framfarið, kostar tað bóndanum nógv bæði í stríði og í pengum, og tað kemur at taka honum væl longri tíð at fáa frið aftur í fjósið.

Leiðbeining stendur í “Indretning af stalde til kvæg”, bls. 40-41. Best var, um tann parturin varð føroyskaður og latin bóndunum, áðrenn fjósið var liðugt.

### 4.3.8. Mettur íløgutørvur

At meta um hvussu nógv eitt nýtt kalt sjálvútluftandi leysgongufjós til 60 neyt kostar í Føroyum, er ikki bara sum at siga tað. Aðrastaðni eru fjós bygd seinnu árini fyri niður móti 40.000 kr. fyri neytaplássið. Men tá eru køstur og súrhoysbrunnar ikki við.

Tað rætta var, um ein landbúnaðarfrøðingur, sum mest bara arbeiðir við byggiráðgeving, í t.d. Noregi ella í Danmark varð biðin um gera eina væl undirbygda meting av, hvussu nógv eitt nýtt tíðarhóskandi fjós kostar í Føroyum.

Fyri at geva ein hóming av, hvussu nógvar pengar tað møguliga fer at snúgva seg um, um farið verður undir at byggja nýggj fjós til øll neytini í Føroyum komandi 20 árini, havi eg saman við Sjúrði Knudsen sett eitt roknistykki upp. Fyritreytirnar eru:

- Øll fjósini eru eins
- Fjósini verða bygd komandi 20 árini, 1 um árið
- Fjósini eru til 60 mjólkneyt
- Køstur er við
- Pláss til viðseting er við
- **Íløgurnar í nýggjan bø er ikki tiknar við í útrokningunum**
- Roknað er við 3 prísum, ávikavist 4, 5 og 6 mió. kr. (66.666, 83.333 og 100.000 fyri hvørja vaksna kúgv) 25 ára avdráttartíð og 4,5% p.a.
- Roknað er við umvælingum, tá ið fjósið er 10 ár, 20% av nývirðinum, 10 ár avdráttartíð og 5% p.a.
- Roknað er við umvælingum tá fjósið er 20 ár, 25% av nývirðinum, 10 ár avdráttartíð og 5% p.a.
- Roknað er við, at nýggj fjós verða bygd, tá ið fjósini eru 30 ár, og roknað er við somu prísum og somu umvælingum

- Roknað er við, at um 40 mió. av núverandi skuldini, ið mjólkneytafjósini hava til Búnaðargrunnin, verða avskrivaðar, og at restin av skuldini verður goldin aftur yvir komandi 15 árini, gott 97 mió. kr.
- Allir bøndurnir halda sínar skyldur móti Búnaðargrunninum alla tíðina.
- Roknað er við, at Búnaðargrunnurin fíggjar fjósið 100%




Mynd 20.1 vísir, hvussu restskuldin hjá einum fjósi minkar frá tí, at lánið er tikið, til øll lánini eru goldin.




Mynd 20.2. Mett heildarútlán hjá Búnaðargrunninum til nýggj fjós, uttan gomlu skuldina.




Mynd 20.3. Mett heildarútlán hjá Búnaðargrunninum til nýggj fjós, við 10 og 20 árs umvæling og við gomlu skuldini.




Mynd 20.4.. Mett heildarútlán hjá Búnaðargrunninum til nýggj fjós við 10 og 20 árs umvælingum, og útlán til nýgg fjós, tá ið fyrru fjósini eru 30 ára gomul, eisini við 10 og 20 árs umvælingum. Gamla skuldin er við.

Myndirnar 20.1-20.4 vísa, at metta heildarútlánið hjá Búnaðargrunninum í mesta lagi kemur at vera 61,2 mió. kr., tá ið fjósini kosta 4 mió. kr. stykkið. Kosta fjósini 5 ella 6 mió. kr., verður mesta útlánið ávikavist 76,6 mió. kr. og 91,9 mió. kr.

Tað vil siga, mesta útlán er gott 20 mió. kr. størri, um fjósini kosta 6 mió. kr. stykkið, heldur enn 4 mió. kr. stykkið.

Útroknkingarnar framanfyri eru bert eitt dømi. Til ber sjávandi at stýra útláns- og afturgjalds-politikkinum, so heildarútlánið verður javnari enn tað, sum myndirnar framanfyri vísa.

Føstu útreiðslurnar hava ofta stóra ávirkan á lønsemið hjá nógvum fyritøkum. Hjá einum bónda er gjaldið til rentur og avdrøg av fjósinum oftast tann størsti posturin. Í døminum framanfyri er roknað við at 20 fjós lata alla mjólkina MBM tekur ímóti, um 7 mill. litrar, ella um 350.000 litrar/fjós. Fyri fjós, sum kostar 4 mill. Kr verður gjaldið til rentur og avdrøg 0,732 kr/l fyrstu árini og økist upp til 1,102 tá tað er uppá tað mesta. Sjá talvu 12.2 og mynd 20.5, sum vísa úrslitini um fjósini kosta 5 ella 6 mill.kr.

**Talva 12.2.** Gjaldið fyri liturin til rentur og avdrøg av fjóslánum, 1: byggilán, 2 og 3 umvælingarlán tá fjósini eru ávikavist 10 og 20 ár

| | Lán 1 | Lán 1 + lán 2 | Lán 1 + lán 3 | Restin av láni 2 |
|---|---|---|---|---|
| 4 mill.Kr. | 0,732 | 1,028 | 1,102 | 0,370 |
| 5 mill.kr. | 0,914 | 1,284 | 1,377 | 0,463 |
| 6 mill.kr | 1,097 | 1,541 | 1,652 | 0,555 |




**20.5. Mynd**. Rentur og avdrøg fyri hvønn liturin fyri fjós, frá tí at tað er nýbygt, við Umvælingum 10 og 20.

## 4.4. Súrhoysbrunnar, koyribrunnar ella rullur í plasti

Mátin at hoyggja er broyttur nógv seinnu árini. Til fyri gott 50 árum síðan var mest sum alt grasið í Føroyum hoyggjað. Síðan varð tað meira og meira vanligt at leggja grasið í brunn at súrga.

Fyri 25 árum síðan komu fóðurheystararnir, sum bøttu og lættu nógv um. Eingin ivaðist í, at tað var loysnin. Men so er ikki longur – nú verða rullubyrðar nýttar meira og meira. Aðrir nýta sjálvfyllandi vognar og leggja grasið í teir “gomlu” brunnarnar, og tað, sum ikki passar í brunnarnar, verður stúvað og pakkað í rullur.

Í nógvum londum hava koyribrunnar verið nýttir nógv, og verða tað enn, t.d. í DK. Tað er framvegis **nógv** tann bíligasti mátin, men hann setur stór krøv til “veður og vind” og góðan bø.

Tá lagt verður í koyribrunn, skal arbeiðið verða gjørt skjótt og væl. Tá ið farið er undir at fylla ein brunn, skal hann helst gerast liðugur sama dag.

Meginfyritreytin er, at útgerðin er klár, tá ið sláast skal, at væl liggur fyri at sláa, at væl liggur fyri at fáa grasið í brunn og at væl verður frágingið við at leggja útyvir og við fargi. Koyribrunnar eru bíligari at gera, men tað er treytað av, at lendið er vítt og slætt, og at brunnurin ikki skal tekjast.

Samanborið við tá ið lagt verður í/ tikið verður úr høgum brunnum, eru amboðini til koyribrunnarnar einføld og standard. Ongar serligar taljur, eingir serligir blásarar, eingin serútgerð og eingir høgir stigar.

Í Noregi hava koyribrunnar ikki verið so nógv nýttir. Teir hava nýtt vanligar brunnar á sama hátt sum her. Teir pakka nú nógv í rullubyrðar, men tosa meira um eisini at nýta koyribrunnar.

Í Íslandi hevur turt hoyggj verið nýtt nógv longur enn hjá okkum og í hinum grannalondunum. Tað mundi hava samband við teirra víða og harðvallaða bø og bíligan streym og bíligan hita úr undirgrundini. Rættiliga nógvir bøndur fóru beinleiðis frá turrum hoyggi til rullubyrðuhoyggj.

At siga, at tað ikki ber til við koyribrunnum í Føroyum, ber ikki til. Tað var eisini sagt um súrhoysbrunnarnar, fóðurheystaran og um rullubyrðarnar. Onkrir av brunnunum, sum føroyskir bøndur hava, eru so víðir í mun til neytatalið, at teir minna ikki sørt um koyribrunnar. Nakrir bøndur hava (havt) koyribrunn. Royndirnar, teir hava, eru misjavnar. Allir siga, at var tað í dag, høvdu teir viljað havt koyribrunnarnar undir taki. (Niels L.Thomsen og Jóan Pauli Andreassen, Norðadali, báðir pers.). Royndirnar aðrastaðni frá siga, at ein taktur koyribrunnur kostar eins nógv og ein vanligur brunnur, sí heimasíðuna: www.norgesvel.no/Default.asp?WCI=DisplayGroup&WCE=175&DGI=175.

Ein tann størsti vansin við koyribrunnunum hjá okkum er, at teir taka nógv pláss, bæði sjálvir brunnarnir og plásskrøvini rundanum. Harafturat er veðurlagið og jørðildið ikki við okkum, við skiftandi veðri og bøi, sum illa/ ikki tolir tunga ferðslu.

## 4.5. Køstar og tøðbreiðsla

Nógv fjós í Føroyum eru illa fyri viðvíkjandi køstum. Flestu fjósini hava køst til 4-6 mánaðir, og nøkur heilt fá til 9 mánaðir ella meira. Einstøk fjós eru, sum bert hava køst til gott og væl nakrar vikur ella sum at kalla ongan køst hava.

Tá ið tøð verða breidd, verður tíverri minni enn so altíð farið vandaliga um. Tað kemur fyri, at køstar standa og renna yvir í longri tíð oman í áir ella løkir og oman á vøtn. Ikki man tað vera einki, sum verður pumpað og koyrt út á sjógv, tá ið “umstøðurnar loyva tí”.

Ein miðalkúgv við viðseting letur um 16-19 $m^3$ av landi og tøðum í køstin teir 9 mánaðirnar, hon er inni. Aftur at hesum kemur annað frárensl, t.d. frá mjólkarrúmunum. Við øllum verður tað neyvan undir 20 rúmmetrar fyri teir 9 mánaðirnar, ið neytini eru inni.

Tað vil siga, at eitt miðalfjós í dag hevur uml. 400 tons av flottøðum, sum skulu hølast og fáast útum. Fyri alt landið verða tað gott 25.000 tons av flottøðum árliga.

Eru neytini inni alt árið, verða tað 22-25,5 m³/neyti av flottøðum, ella upp til gott 500 tons tilsamans fyri eitt miðal fjós í dag.

Hesi tøðini skulu fáast burtur á ein ella annan hátt. Tað heilt natúrliga er, at tøðini verða breidd á bøin. Mest sum ongar lógaravmarkingar ella reglugerðir eru í Føroyum fyri:

1) hvussu nógv tøð kunnu breiðast á eina ávísa vídd
2) nær breiðast kann
3) hvar breiðast kann
4) eingi tøknilig krøv eru fyri, hvussu ein køstur skal gerast, ella
5) hvussu nógv hann kann dálka á ymsan hátt ella
6) hvussu fjósið skal innrættast fyri at avmarka dálkingina við køvievni

Í okkara grannalondum eru fleiri avmarkingar fyri hvar, nær og hvussu tøðini kunnu breiðast. Eitt grundleggjandi krav er, at samsvar skal vera millum bøvíddina og talið av dýrum og hvat fyri dýr talan er um. Ikki er loyvt at breiða í skógin, í hagan ella á onnur tilsvarandi øki!

Nú gongur skjótt tann vegin í Danmark, at tað verður kravt, at køstarnir skulu verða taktir fyri at avmarka, hvussu nógv køvievni (ammoniakk) guvar burtur, og eisini verður talað um at avmarka mongdina av ammoniakki, sum guvar úr fjósunum! Leiðbeiningar og kanningar verða gjørdar av, hvussu gólvini skulu gerast fyri at avmarka ammoniakkguvanina. Tað vísir seg, at umráðandi er, at gólvini eru sløtt við passandi halli, og at avrenningarmynstur er í gólvinum. Lidnar betonggólv-eindir við hesum eginleikunum verða nú seldar.

Ein máti at minka um køvievnisguvanina er at lata nakað av svávulsýru í tøðini, 5 kg/tons av flottøðum. Fyri at svávulsýran skal virka best, er umráðandi at hava røttu útgerðina. (Arne Grønkær Hansen og Svend Morsing. 2003. Ammoniakfordampning fra kvægstalde. Landbrugets byggeblad nr. 102.17-19. Ny KvægForskning, nr. 3, 1. årgang, juni ).

Tankar eru eisini frammi í Danmark um at taka ammoniakkguvuna úr luftini, sum verður blást úr fjósunum, og tøknin er rættiliga klár – talan er helst mest um svínafjós – skipanin kemur ikki at hóska væl við sjálvútluftandi óbjálvaðum mjólkneytafjósum.

### 4.5.2. Innflutningurin av áburði

Mongdin av innfluttum áburði hevur ligið um 1.562-1.896 tons árliga tilsamans, tó bert 1.375 tons í 1997, sí 13. talvu.

**13. talva. Innflutt handilstøð, NPK og annað**

| | NPK | | Annað enn NPK | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Ár** | **tons** | **1.000 kr.** | **tons** | **1.000 kr.** | **tons tils.** |
| **1992** | 1.443 | 2.648 | 105 | 404 | 1.548 |
| **1993** | 1.056 | 1.797 | 494 | 961 | 1.550 |
| **1994** | 1.232 | 2.182 | 592 | 974 | 1.824 |
| **1995** | 1.087 | 1.783 | 650 | 1.122 | 1.737 |
| **1996** | 1.546 | 2.511 | 388 | 910 | 1.934 |
| **1997** | 1.184 | 2.066 | 191 | 557 | 1.375 |
| **1998** | 1.527 | 2.344 | 212 | 512 | 1.739 |
| **1999** | 1.220 | 1.992 | 342 | 747 | 1.562 |
| **2000** | 1.370 | 2.359 | 526 | 1.242 | 1.896 |
| **2001** | 1.513 | 2.434 | 698 | 698 | 2.211 |
| **2002** | 1.785 | 2.806 | 620 | 108 | 2.405 |

Mest vanliga seldu tøðini frá MBM eru NPK 17-4-13. Í útrokningunum niðanfyri verður gingið út frá, at øll NPK-tøðini eru 17-4-12.

Ikki ber til í skrivandi løtu at greina sundur, hvussu stóran part av innflutninginum mjólkneyta-bøndurnir eiga. Men um skrásett stráfóður fyri somu ár verður sett inn í myndina, sæst, at eitt ávíst samsvar er millum innflutta handilsáburðin og skrásettu mongdina av stráfóðri, um enn samsvarið minkar móti endanum, sí mynd 20.1.




Teir bøndur, sum hava mjólkneyt, kundu spart nakað av handilstøðunum, teir keypa, um teir fingu fulla nyttu úr flottøðunum.

Tað letur seg ikki gera at nøkta tørvin hjá gróðrinum við berum flottøðum frá neytunum, um tøðini skulu hóska væl til tørvin hjá gróðrinum. Tí mugu handilstøð verða nýtt afturat.

Vit hava mær vitandi ongar vísindaligar kanningar av, hvussu nógv taðvirði er í flottøðunum. Tað besta, eg dugi at finna, sum kann samanberast við føroysk viðurskifti, eru kanningar á Vestur-landinum í Noregi. Í einum miðaltonsi av flottøðum á Vesturlandinum eru 3,6 kg **N**, 0,6 kg **P** og 3,6 kg **K**. (Husdyrgjødsel, Norges Landbrukshøgskole o.a., 119 pp, ISBN 82-90598-10-6, 1993)

Verða tey tølini nýtt, skulu 36 tons av handilstøðum til, fyri at eins nógv av kalium skal vera í teimum, sum tað er í einum tonsi av NPK 17-4-13. Sí 14. talvu. Fyri N og F skulu ávikavist 47,2 og 66,6 tons nýtast. Í fyrra førinum verður í meira lagi av kalium og í seinna førinum í meira lagi av bæði kalium og av køvievni (nitrogeni).

**14. talva**. Samanburður millum NPK og flottøð frá neytum innihaldinum av taðsøltunum í tøðunum, N, P og K

| | N | P | K |
|---|---|---|---|
| Handilsáburður, kg | 170 | 40 | 130 |
| Flottøð, kg | 3,6 | 0,6 | 3,6 |
| Tons flottøð/1 tons NPK | 47,2 | 66,6 | 36 |

Breiður ein bóndi flottøð í bøin, til bøurin hevur fingið nóg mikið av kalium, má hann breiða handilstøð, fyri at bøurin skal fáa nóg mikið av nitrogeni og fosfori eisini.

Um metingin á bls. 57 er røtt, lata neytini um 25.000 tons av flottøðum. Kaliumvirðið í flottøðunum svarar til kaliumvirðið í 694 tonsum av NPK, ella um 32% av innflutta NPK-num. 694 tons av NPK kosta um 0,7 mió. kr. (miðalprísurin 1997-2000: 2,19 mió. kr.) Tað vil siga, at 1 tons av flottøðum í køstinum er vert uml. 28 kr.

Ongar kanningar eru gjørdar, sum siga, hvussu stórur partur av tøðvirðinum í flottøðunum ella í handilstøðunum koma til nyttu hjá okkum, ella nær flottøðini verða breidd. Tað, sum verður breitt seint á heysti ella um veturin, kemur ikki gróðrinum til nyttu..

Mannatrekkur sum áburður

Rættiliga nógv taðvirði er í tí, sum kemur frá fólki. Størri partur av taðvirðinum er í landinum og minni í skarninum. Minni av óynsktum evnum eru í landinum samanborið við í skarninum. Men einfaldari er at fara við skarninum enn landinum við núverandi vesum og rørskipanum. Megintrupulleikin er, at so nógv vatn verður blandað uppí. Tøkni er tó ment, sum ger tað møguligt at minka heilt munandi um nøgdirnar av vatni, sum skulu nýtast í kummunum. Eisini eru loysnir mentar, har tað fasta og tað flótandi tilfari fer við hvør síni rørskipan (Jacob Magid, “Visioner for fremtidens jordbrug” bls. 181 – 202, ‘ISBN 87-12-03782-6, GAD 2002).

Føroyar:

Flestøll sethús í Føroyum hava egnan rottanga, sum verða regluliga tømdir av IRF e.ø. Tá verður bert tað fasta tilfarið tikið til høldar. Skarnið verður blandað við kálki fyri at fáa pH-virðið upp á 11, og verður síðan lagt á goymslu, har tað skal liggja í ásetta tíð til at búnast.

Tað mesta av tilfarinum verður síðan nýtt at tyrva við á tyrvingarplássunum. Ein partur hevur verið breiddur í einum haga, men treytin var, at stykkið varð frástikað í minst eitt ár. Sambært IRF noyðast teir at leggja tøðini tjúkt útum, heldur enn at breiða tey natúrliga tjúkt, tí krøvini um stik eru strong, og ringt er at fáa nakað lendi. IRF hevur um 1000 m³ av rottangatilfari um árið – og tá er Tórshavn ikki við (Ingvard, IRF 9.92003).

Danmark:

Sambært Landbrugsavisen (áður Landsbladet) bls. 6, 19. sept. 2003 vísir frásøgn frá Dansk JordbrugsForskning, at einki vísir seg at forða fyri at nýta “spildevandsslam”, t.e. marru, í bønum. Tað snýr seg um marru, sum er sóttreinsað við hita, og sum í aðrar mátar heldur markvirðini fyri tungmetal ella annað. Marra er bæði rottangatilfar, tilfar úr savnibrunnum og frá reinsiverkum.

Feløg/ felagsskapir í Danmark, sum keypa landbúnaðarvørur, t.d. epli og ertrar, avmarka nýtsluna av marru, so ávís tíð skal ganga frá tí at marra komið í bøin, til sátt verður ella sett verður niður. Eingi heilsufrøðiligir trupulleikar hava verið av at nýta marru til korn í Danmark.

Kortini hevur dansk-svenska mjólkarvirkið Arla avmarkað nýtsluna av marru til, at ikki er loyvt at geva mjólkneytum fóður av lendi, har marran hevur verið breitt seinastu 3 árini. Vísindafólk meta, at hetta kravið er langt við síðuna av nøkrum rímiligum og ávara ímóti at lata kenslurnar ráða ov nógv í slíkum førum – tí tá er skjótt at alt fer á glið (Landbrugsavisen, Agro bls.9, 3.okt.2003).

Noreg:

Í Noregi verður ein partur av marruni frá bygdum og býum nýtt í jarðarbrukinum, men tó við fleiri avmarkingum. Bert er loyvt at spræna væl viðgjørda marru tíggjunda hvørt ár á akrar, og tá skal marran fáast skjótt niður í jørðina. Ikki er loyvt at spræna marru á bøin, í eplaveltur o.a..

Trupulleikin við tungmetalunum er minkaður nógv í Noregi seinastu árini, og minkar enn. Mett verður, at tað nú koma eins nógv tungmetal við handilstøðunum, sum við marru.

Hjá *Vestfjordens* Avløpsselskap (Oslo og nakrar grannakommunur) eru eingir trupulleikar eru at fáa bøndurnar at taka ímóti viðgjørdu marruni – heldur er bíðilisti! (Norsk landbruk 2, 2004, bls. 36 – 39).

Gagnnýtsla av viðgjørdari marru:
Fyrsta treytin fyri at gagnnýta rottangatilfarið er, at heilsufrøðiligu viðurskiftini eru heilt í lagi, og at breitt verður skynsamt. Eitt er, hvat heilsufrøðiligu myndugleikarnir góðkenna, eitt annað er, hvat nýtararnir/ viðskiftafólkini siga um vøru, sum kemur av økjum breidd við rottangatilfari. Neyðugt er fyrst at fáa tøðini frá húsdýrunum breidd út á ein skilagóðan hátt, áðrenn farið verður at breiða rottangatilfar. Og neyvan kemur upp á tal at breiða rottangatilfar á bø hjá mjólkneytabóndum í Føroyum, tí teir hava meira enn nóg mikið av tøðum til sín bø bara frá neytunum.

Skulu vit í framtíðini breiða rottangatilfar, ella bæði land og skarn í hagar og innangarðs, er neyðugt at fyrireika hetta væl. Fólk mugu kunnast væl um ætlanirnar, áðrenn nakað verður gjørt. Bæði er neyðugt at fáa fólk at ansa eftir, hvat fer í vesið, og at venja tey við tankan um, at rottangatilfar fer at verða nýtt sum tøð. Eisini er neyðugt, at røtt krøv verða sett, tá ið hús verða bygd/ umbygd, og tá ið búrennur (kloakkir) verða lagdar.

Tilfar frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni vísir, at tað er ikki meiri av óynsktum evnum í rottanga-tilfarinum í Føroyum, enn at tað kann góðtakast sum áburður.

### 4.5.3. Nýggir køstar

Neyvan fer at bera til at bíða við at fáa skil á køstarnar, til nýggj fjós verða bygd fyri øll tey núverandi fjósini. Neyðugt verður, at nakrir bøndur við lutfalsliga nýggjum fjósum byggja køst/-ar, fyri at fjósini skulu halda nøkur av krøvunum í framtíðini. Fíggjarlig fyrilit kemur helst at gera, at nøkur av eldru fjósunum noyðast at byggja felags køst.

Verða fleiri fjós um ein køst, verður næstan altíð neyðugt at pumpa ella at koyra tøðini fyri at fáa tey í køstin. Vanligt er aðrastaðni, at øll tøðini verða pumpað úr fjósinum í køstin.

Felags køst til eldri fjós

Um vit hugsa okkum eina bygd við 5 fjósum, sum í miðal hava 18 neyt við viðseting. Hvørt av hesum fjósum skal hava uml. 350 m³ køstarúmd. Hava tey 1 køst hvørt, kostar hvør rúmmeturin av køsti 735 kr., og hvør køsturin um 260.000 kr. hvør, sí 17. talvu.

Tilsamans kosta teir 5 køstarnir uml. 1,3 mió. kr. **uttan** flutning úr uppskipingarhavnini til fjósið og **uttan** uppseting.

Bøndurnir kundu eisini valt at bygt ein stóran felagskøst upp á 1.750 m³. Tann køsturin kostar stívliga 700.000 kr., eisini uttan flutning úr uppskipingarhavn og uttan uppseting. Tað vil siga, at teir 5 køstarnir kosta eitt sindur minni enn dupult so nógv, sum ein, ið tekur tað sama, sí 15. talvu.

**15. talva**. Køstaprísur uttan flutning til garðin og uttan uppseting .

| | 5 á 350 m³ | ein á 1.750 m³ . |
|---|---|---|
| elementir | 811.000 | 410.000 |
| tekja/-ur | 175.000 | 175.000 |
| planering | 300.000 | 120.000 . |
| samanlagt | 1.286.000 | 705.000 |
| kr./m³ | 735 | 403 |
| munur tilsamans | | 581.000 . |

Tað, sum ger valið við teimum smáu køstunum enn verri, er, at tey 5 gomlu fjósini fáa hvør sín køst, sum **ikki hevur nakað søluvirði**, tá ið fjósið fer úr nýtslu um nøkur ár, tí kosturin er so lítil. Fyri at tann einstaki bóndin skal kunna brúka ein felagskøst, verður neyðugt við einum góðum tøðvogni. Tað kostar bæði í rakstri og í arbeiðstíð og **er ikki tikið við í metingini her**.

Veruligt dømi

Í 2003 fekk bóndi nýggjan 600 rúmmetra stóran betongkøst, taktan við betongplátum. Við upp-seting og flutningi kostaði hann 327.660,37 kr. Tað gevur ein prís upp á 546 kr./m³, men tá vóru byggibúning og smálutir ikki við. Eg vil meta, at tá alt er við, kostar rúmmeturin 600 kr., sum er heldur meira enn mett, 471,- kr./m³. (371 kr. + 100 kr.). Mín meting er tó uttan flutning úr Tórshavn til fjósið og uttan uppseting. Og verður tað tikið við, at mín meting er við heldur bíligari tekju (presending), meti eg, at mín meting er uml. 20% ov lág fyri støddina 500-1000 m³.

Tað finst einki yvirlit yvir, hvussu støðan er við køstum til mjólkneytafjós. Eg vil tó meta, at miðalbóndin klárar at høla um helvtini av tøðunum í 9 mánaðir. Av hesum fjósum fer uttan iva ein partur av fjósunum úr nýtslu um ikki so nógv ár. Fer samfelagið at seta krøv til størri køstar og til nær og hvar sprænast kann, rokni eg við, at neyðugt verður at gera køstur til helvtina av heildartørvinum komandi árini, ella køstar til 12.500 m³.

Íløgustuðulin til køstar hevur verið um 300 kr./m³. Um nýggju køstarnir til gomlu fjósini skulu fáa tilsvarandi stuðul, krevur tað eina játtan upp á 3,75 mió. kr. tilsamans. Verða køstarnir gjørdir yvir t.d. 10 ár, krevur tað eina játtan upp á uml. 0,375 mió. kr. árliga. Køstastuðulin hevur verið partur av veltistuðlinum.

#### 4.5.4. Køstatak

Fyrsta grundgevingin fyri at fáa køstarnar taktar her hjá okkum verður ikki at minka mongdina av køvievni, sum guvar burtur. Heldur verður grundgevingin tað nógva regnið. Tað er í dýrara lagi at byggja stórar og kostnaðarmiklar køstar, sum verða meira enn hálvfyltir við regnvatni um veturin. Í flestum bygdum regnar 1000-2000 mm.

Køstarnir verða vanliga í dag taktir við betongelementum ella við sergjørdari presending.

Ein presendingstekja til 1.500 m³ stóran køst kostar 138.700 kr. uttan MVG í Danmark. (Landsbladet, Agro 5. apr. 2002, bls. 15), ella um smáar 100 kr./m³.

Í hesi frágreiðing havi eg roknað við, at køstatekja kostar um 100 kr./m³, væl vitandi at tað er ov lítið, tá ið tað snýr seg um smærri køstar.

4.5.5. Køstaprísurin

Danska fyritøkan, AS Spæncom í Ålborg var so beinasom at senda okkum eitt tilboð upp á køstaprís. Við beinasamari hjálp frá Pf Skipafelagnum Føroyum og byggifyritøkuni Pf Articon hevur borið til at roknað prísin á køstum nøkulunda, tá ið teir standa á keiini í Tórshavn, og tá ið útgrevstur og betong til botnin er goldið. Eg havi ikki mett um, hvussu nógv flutningurin út til garðin og uppseting kostar.

Størri køstarnir eru, minni kostar rúmmeturin. Teir smæstu køstarnir kosta meir enn 900 kr. fyri m³, men prísurin fellur skjótt niður móti 300 kr./m³. Tá ið køstarnir verða størri enn 1.000 rúmmetrar, fellur prísurin niður ímóti 200 kr./m³. Sí 21. mynd og 16. talvu.

**16. talva**. Køstaprísur á keiini í Tórshavn, uttan uppseting, útgrevstur og tak, men við botni. Tillagað av GB. AS Spæncom, DK og aðrar heimildir.

| | m³ | kr. | kr./m³ |
|---|---|---|---|
| 3 metrar høgar byggieindir | 110 | 99.296 | 903 |
| | 310 | 162.195 | 523 |
| | 510 | 210.205 | 412 |
| | 700 | 251.314 | 359 |
| | 885 | 287.725 | 325 |
| 4 metrar høgar byggieindir | 590 | 215.375 | 365 |
| | 1.075 | 298.634 | 278 |
| | 1.505 | 365.878 | 243 |
| | 2.015 | 436.503 | 217 |
| | 2.600 | 514.824 | 198 |
| | 3.000 | 562.915 | 188 |



### 4.5.6. Útgerð at breiða tøðini við

Sum gongdin er í vesturheiminum, verða tað neyvan nógv ár afturat, til ikki verður loyvt at spræna tøðini út í luftina á tann hátt, ið vit kenna tað. Kravt verður meira og meira, at tøðini verða løgd niður á jørðina við slangum, sum verða drignar aftan á traktori, ella at tey verða sprænd beint í jørðina, sum er tann dýrasti og besti mátin.

Vit kunnu neyvan rokna við, at støðan við ongum krøvum, um nær, hvar og hvussu tøð kunnu breiðast, varir leingi afturat. Aðrir borgarar hava ilt við at góðtaka, at hildið verður fram við at breiða flottøð uttan avmarkingar.

Útgerðin at breiða tøðini við broytist støðugt. Áðrenn avgerðir um avmarkingar og treytir verða tiknar um, hvussu, hvar og nær tøð skulu breiðast, er umráðandi, at nøktandi vitan er á økinum, bæði frá umhvørvissjónarmiði og fíggjarligum sjónarmiði.

Ein loysn kundi verið, at t.d. Meginfelag Búnaðarmanna ella annar felagsskapur hjá bóndunum hevði ein ella 2 tøðtangar um 20 m³ hvør at seta upp á lastbilar. Teir kundu so verið brúktir runt landið at breitt tøðini við. Tá hevur bóndin minst tveir møguleikar. Annar er at lata bilin spræna av vegnum, og hin er at spenna traktorin fyri sprænara, sum gjøgnum slangu fær tøðini frá lastbilatanganum.

Har fjósið er mitt í bønum, ella tætt við bøin, ber til at spræna beinleiðis úr køstinum gjøgnum rør/ slangur til ein traktor, t.e. á sama hátt, sum nevnt er omanfyri. Tað ber til at grava rør/ slangur niður í bøin, og á tann hátt sleppa undan at leggja ein part av slangunum, hvørja ferð breiðast skal.

Var tøðbreiðslan nøkulunda samskipað fyri alt landið, hevði tað gjørt, at:

- ikki var neyðugt hjá hvørjum einstøkum bónda at hava stóran traktor at draga tøðvognin – <u>sum hann noyðist at nýta til annað lættari arbeiði eisini</u>
- ikki var neyðugt, at hvør Hanus og Janus hevði tanga at breiða tøð við
- bøndurnir høvdu spart nógva koyring við traktori
- betri nytta fekst burtur úr tøðunum samanlagt – og tað hevði minkað um tørvin á handilstøðum
- bíligari var at fingið tøðini í bøin
- bøndurnir høvdu fingið betri nyttu úr tøðunum

<u>Lastbil til at spræna flottøð</u>
Tangi til lastbil hevur verið/ er í landinum, og hann hava bøndurnir nýtt eitt sindur. Men viðurskiftini hava ikki verið/ eru ikki í lagi, so lítast kann fult á skipanina.

Danskar útrokningar og royndir hjá maskinfeløgum vísa, at tað kostar maskinfeløgunum um 15 kr. fyri tonsið at fáa flottøðini breidd út, og tey taka 25 kr. fyri tonsið. Tann prísurin vísti seg at vera í minna lagi. Samanumtikið vísti tað seg, at bíligast er, at bøndurnir fáa tøðini út við vanligum tøðvognum! – Men vit skulu minnast til, at donsk fjós eru rættiliga stór í mun til okkara, og at umstøðurnar eru góðar at sleppa til og í bøin.

Seinni hevur staðið í Landsbladet, at nógvir danskir bøndur hava kleyrað sær bøin við traktorum og tungum tøðvognum, meira enn teir hava hildið. – Tað vísir, hvussu neyðugt tað er at vera tilvitandi um trupulleikarnar við tungum amboðunum í bønum.

Fyritreytirnar fyri at fáa meira nyttu úr tøðunum, minka um dálkingina og breiða við lastbili eru, at:

- bøndurnir hava nóg **stórar køstar**, minst til 3/4 ár
- gjaldskipan er avtalað frammanundan, bæði millum teir einstøku bøndurnar og millum tangaeigaran og bøndurnar
- koyrandi er út í bøin við stórum og tungum lastbilum/ tøðvognum
- bøndurnir hava góða útgerð at røra køstin og pumpu at fylla lastbilin við (møguliga kann slík útgerð nýtast av fleiri fjósum)
- at bøndurnir fara skynsamliga fram, bæði móti náttúruni og restini av samfelagnum, tá ið teir breiða tøðini út

# 5. Annað

Mjólkneytahaldið er annað enn bøur, neyt, fjós og køstar, m.a. innheinting av mjólkini, mjólkarvirki, søla, flutningur út til handlarnar, eftirlitsskipanir og tilgongd av nýggjum bóndum. Viðurskiftini hjá bóndunum skulu eisini vera í lagi, og har er nógv at hugsa um: útbúgving og dagføring av henni, trivnaðurin hjá bóndunum, og ikki minst ein nøktandi eftirlønarskipan.

Verða fleiri felagsfjós, kann hugsast, at aðrir inntøkumøguleikar verða meira áhugaverdir, t.d. røktarlandslagið, kornvelting, rossahald (rossavistir, -gøtur og -túrar) og gomul føroysk húsdýrasløg.

Eg havi valt at gjøgnumganga hesi evnini eitt sindur, tó ikki sjálvt mjólkarvirkið.

Til seinast í havi eg valt at skriva eitt sindur um vistfrøðiligan landbúnað.

## 5.1 Flutningur av mjólkini til mjólkarvirkið

Møguleikin hjá bóndunum við mjólkneytum og hjá mjólkarvirkinum at hóra undan her í landinum framyvir, hongur nógv saman við, hvussu:

- kappingarførir bøndurnir eru í prísi
- góða mjólk bøndurnir kunnu lata
- støðugt mjólk verður latin og
- hvussu kappingarført sjálvt mjólkarvirkið er

Størri munurin er millum tað, ið tað kostar at hava mjólkneyt og mjólkarvirkið í landinum, og tað, ið tað kostar at keypa mjólkina úr øðrum londum, verri verður at hava haldgóðar grundgevingar fyri at hava mjólkneyt her í landinum.

Tí er m.a. neyðugt at hugsa um, hvar nýggj fjós verða bygd í mun til hvar mjólkarvirkið er, og hvussu umstøðurnar eru fyri nýggjum fjósi, og hvussu hvør einstakur mjólkarbilur verður brúktur.

Talið á fjósum og hvar tey eru hevur stóra ávirkan á, hvussu nógv tað kostar mjólkarvirkinum at savna mjólkina. Tað, ið tað kostar mjólkarvirkinum ov nógv at heinta og viðgera mjólkina, og síðan at fáa hana út til nýtararnar, fáa bøndurnir minni fyri mjólkina, og nýtarin má gjalda restina við einum heldur høgum prísi.

*Svínoy, Kalsoy, Nólsoy og Hestur*
At flyta ein litur av mjólk úr Svínoy kostar mjólkarvirkinum nógv í beinleiðis flutningsútreiðslum. Harafturat koma útreiðslur av íløguni og viðlíkahald av serligu tangunum. Somuleiðis er við mjólk, sum kemur úr Hesti og úr Nólsoy. Og tá ið so mjólkin er komin á virkið, er hon ikki eins góð, sum mjólk, sum er fingin beinleiðis upp í mjólkarbilar. Tað ringasta, sum kann henda við slíkari mjólk, er, um hon spillir frá sær undir viðgerðini á MBM.

Skal mjólkneytahald framvegis vera á hesum oyggjunum, ella takast uppaftur, eigur tað ikki at vera til mjólk, sum skal flytast til Hoyvíkar á mjólkarvirkið har. Heldur eigur mjólkin at verða viðgjørd á staðnum til annað enn drekkimjólk. Tað ber til í øðrum londum, so hví ikki eisini her?

*Suðuroy*
Mjólkin úr Suðuroynni kostar eisini nógv. Kvoturnar til samans í Suðuroynni eru um 370.000 litrar. Mjólkin verður heintað 3 ferðir um vikuna. Tað vil siga, at bilurin í miðal tekur smáar 2.500 litrar við hvørja ferðina við norðurum.

Ein nútímans mjólkarbilur, ið tekur 12-14 rúmmetrar av mjólk, kostar umleið 1,2 mió. kr., og hann heldur í umleið 10 ár (Upplýsingar frá buss- og tangabilaeigara, pers.).

Við 10 ára avdráttartíð kostar ein mjólkarbilur 167.000 kr. um árið í rentum og avdráttum. Flutningurin av mjólkarbilunum við Strandferðsluni er fyri vanligan prís. Millum Suðuroynna og Tórshavn kostar bilurin 610 kr. hvønn vegin. Við 3 túrum hvønn vegin um vikuna, verður tað til uml. 186.660 kr. árliga.

Rakstrarútreiðslurnar til ein mjólkarbil av hasum slagnum eru: 30.000 kr. í trygging og vegskatti, 20.000 kr. í olju, og røktin kostar um 50.000 kr. Arbeiðslønin fyri ein mann er 230.000 kr. við øllum. Tilsamans 330.000 kr. árliga.

Bilurin kann nýtast helvtina av tíðini norðanfyri, og tí skulu bert um helvtin av íløgu- og rakstrarútreiðslunum skuldskrivast mjólkini úr Suðuroynni. Sí 18.  talvu. Tað vil siga, at tað kostar MBM 1,176 kr. fyri liturin at fáa mjólkina norðurum.

Men hevði bilurin 10 rúmmetrar hvønn túrin úr Suðuroy – heldur enn 2,3-2,5 m³ sum nú – kemur hann at flyta 30 rúmmetrar um vikuna, ella 1,56 mió. litrar um árið. Tað passar nøkulunda til 4 fjós við 60 neytum hvørt. Tá hevði flutningurin kostað 0,284 kr. fyri liturin, sí 17. talvu.

**17. talva**. Flutningsútreiðslurnar av mjólk úr Suðuroynni við núverandi kvotum, og um 4 stór fjós vóru í oynni. (Egnar metingar).

| | Suðuroy | |
|---|---|---|
| | Núverandi støðan | v. 4 stórum fjósum |
| Mjólk um árið, kvota, litrar | 370.000 | 1.530.000 |
| Avskrivingin av útgerð, kr. | 83.500 | 83.500 |
| SL, kr. | 186.660 | 186.660 |
| Rakstrarútreiðslur + løn, kr. | 165.000 | 165.000 |
| Tilsamans, kr. | 435.160 | 435.160 |
| Fyri liturin, kr. | 1,176 | 0,284 |

Tað vil siga, at rættiliga nógv meira fæst fyri pengarnar, um mjólkarbilurin hevur meira mjólk at flyta.
Um hugt varð at flutninginum av mjólk úr Svínoy, Kalsoy, Hesti og úr Nólsoy, varð helst komið til sama úrslit, men har verður partvíst nýtt serlig útgerð, sum er ring at meta um í prísi.

Flutningsútreiðslurnar úr Sandoynni eru um 0,373 kr. fyri liturin (920.000 litrar um árið, og 310 kr. hvønn vegin um Skopunarfjørð)  (Egin meting).

Flutningsprísirnar havi eg fingið úr ferðaætlanini hjá Strandfaraskipum Landsins.

Um øll mjólkin kom av meginøkinum!

Hugsa vit okkum, at øll mjólkneytafjósini vóru á meginøkinum við føstum vegasambandi, hevði ein stórur mjólkarbilur klárað at koyra alla mjólkina inn, uml. 140.000 litrar um vikuna –  28.000 litrar um dagin – tað skuldi kunna latið seg gera, ikki minst um viðfestivognur var at pumpa uppí aftur at vanliga bilinum.

Rakstrarútreiðslurnar meti eg at verða 660.000 kr., og tá ið litratalið er uml. 7 mió. litrar, verða mettu flutningsútreiðslurnar um 0,1 kr. fyri liturin. Tað vil siga, at nógvir pengar eru at vinna við eisini at hugsa um, hvar fjósini verða í framtíðini í mun til, hvar mjólkarvirkið er.

## 5.2. Áhugin fyri landbúnaði og útbúgvingar

*Áhugin fyri landbúnaði*

Neyðugt er at hava dugnaligar bøndur fyri at fáa garðarnar at klára seg – tað vísir seg aftur og aftur. Tí er umráðandi, at tey røttu fólkini yvirtaka garðarnar. Tað er ikki bara sum at siga tað, tí røsk fólk eru umbiðin allastaðni fyri góða løn, góð og skipaði arbeiðsviðurskifti og avbjóðandi arbeiði.

Skal neytahaldið í Føroyum vera nøkulunda kappingarført komandi árini, er rættiliga umráðandi, at ungir, ágrýtnir og dugnaligir bøndur koma framat fyri teir, sum gevast, og at teir, sum sleppa framat, hava ein møguleika at vísa síni evni, og at teir trívast í teirra arbeiði, **og at teir, sum ikki klára seg, gevast**.

*Útbúgvingar og skeið*

Besta trygdin fyri at fáa teir røttu at taka við er at krevja, at teir, sum taka við, eru skúlaðir og hava royndir hjá dugnaligum bónda/-um.

Royndarstøðin fór saman við Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúla undir at skipa fyri stuttum landbúnaðarskeiði fyri nøkrum árum síðan. Veturin 2002-2003 var undirtøkan so stór, at kvøldskúlin í Klaksvík eisini skipaði fyri einum tilsvarandi skeiði. Árið eftir varð eisini skipað fyri skeiði í Runavík. Hóast øll hesi skeiðini sluppu ikki øll við. Tað bendur ið hvussu so er á, at áhugi er til staðar. Fyrsta skeiðið var dagskeið, og seinnu skeiðini hava verið kvøldskeið.

Eg meti, at hesi skeiðini einsamøll **als** eru ikki nóg gott grundarlag hjá nýggjum komandi bóndum. Undirvísingin má hava eitt gott støði. Eitt hugskot er at skipa eina landbúnaðar- og umhvørvisdeild á Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna í samstarvi við Royndarstøðina í Kollafirði.

Ein stórur partur av ástøðinum fyri eina landbúnaðar- og umhvørvisdeild er tann sami, sum fiskivinnudeildin longu hevur. Tað hevði stuðlað væl undir, at frálæran var á føroyskum, og ikki minni um ein partur av tilfarinum hevði støði í heimliga umhvørvinum.

Ein slíkur skúli eigur eisini at hava samstarv við landbúnaðarskúlar í øðrum londum. Men avgerandi neyðugt er, at komandi bøndur fáa sær royndir, áðrenn teir seta seg niður fyri seg sjálvar, serliga teir, sum ætla sær at yvirtaka stórar garðar, eitt nú við mjólkneytum.

Men tað er ikki nóg mikið. Eg meti eisini, at neyðugt er javnan at skipa fyri stuttum skeiðum, meira miðvís enn núverandi skeiðini, eitt nú skeið um tøð og taðing, grasgróður, skeið fyri seyðamenn um: Bit og jarðriv, fóðurtørv hjá seyði, reinføri og hjálp undir lembing.

### 5.2.2. Áhugin fyri landbúnaði í Danmark

Ymist bendir á, at áhugin fyri landbúnaði í Danmark er fallin seinastu árini. Í 2001 ella 2002 vórðu 200 ung fólk millum 16 og 18 ár spurd um teirra áhuga fyri ymiskum arbeiði, og serliga fyri arbeiði, sum hevði samband við landbúnað.




Tað vísti seg, at áhugin hjá danska ungdóminum at arbeiða við landbúnaði er lítil. Grundgevingarnar hjá teimum vóru: ringur luktur, kropsliga tungt og bindandi, sí 22. mynd. Danski greinskrivarin metir, at ein stór orsøk til lítla áhugan er, at árgangirnir av ungdómi eru lutfalsliga smáir, og tí stendur ungdóminum nógv í boði.

## 5.3. Einsemi

Fyrr var nógv fólk á hvørjum garðinum, men tað er langt síðan søga. Nú í nógv ár hevur bert húskið á garðinum verið um arbeiðið. Men tað er eisini við at verða søga. Nú er tað oftast bert annar hjúnafelagin, sum er heima á garðinum, makin er í aðrari vinnu og børnini í barnagarði, í skúla ella til ítróttarvenjing í aðrari bygd.

Ein partur av núverandi fjósunum eru savnað í nøkrum bygdum við fleiri fjósum í hvørji bygdini. Tað hevur gjørt, at eitt ávíst mjólkabóndaumhvørvi hevur verið í hesum bygdunum. Har bert ein bóndi hevur verið í eini bygd, hevur hetta umhvørvið ikki verið. Tað hevur ikki gagnað einsamøllu bóndunum.

Verða tað nógv færri fjós, koma bøndurnar at verða enn meira einsamallar og enn longri verður til næsta bóndan, sum hevur mjólkneyt. Fyri at bøta eitt sindur um einsemið og hjálpa bóndunum at dagføra sín førleikan verður meira neyðugt, at bóndafeløg, mjólkarvirkið ella aðrir felagsskapir skipa fyri, at bøndur koma saman á ymsan hátt og í ymsum samanhangum. Á sama hátt er neyðugt, at tað almenna skipar fyri skeiðum og ráðgeving, møguliga saman við undannevndu feløgum.

## 5.4 Annar studningur til bøndur

Beinleiðis framleiðslustuðul hevur ofta óhepnar avleiðingar við sær, serliga um stuðulin er nógvur. Hann avlagar kappingina og framleiðsluna á ymsan hátt.

Vøran, sum nýtarin/ skattagjaldarin fær aftan á at hava goldið stuðulin, er landbúnaðarvøra, sum eina tíð er heldur bíligari at keypa. Tað, sum vinnan fær burturúr, er, at hon verður fastløst í einum ikki kappingarførum bygnaði, sum ikki lagar seg til støðugt broytandi umstøður. Tá ið ein tíð er frá liðin við nógvum framleiðslustuðli, er vøran eins dýr – um ikki dýrari – og kappingarførið er versnað uppaftur meiri.

Við ymsum grundgevingum og skiftandi hepni royna nógv lond nú at minka um beinleiðis framleiðslustuðulin til landbúnaðin og heldur lata íløgustuðul ella stuðul til annað virksemi, sum hoyrir til garðin. Nú eru lond, sum lata ein part av stuðlinum, sum er heilt leysur av, hvussu nógv bøndurnir lata av vørum, USA og ES.

Játtanin til landbúnaðarstuðul á løgtingsfíggjarlógini fall 2 mió. kr. frá 2002 til 2003, og 0,2 mió. kr. 2004. Ikki verður lætt at fáa stuðulin uppaftur, um stuðulin bara skal vera eitt framhald av tí, sum var. Verður stuðulin hækkaður aftur, verður tað uttan iva við øðrum treytum.

## 5.3. Eftirløn til bøndurnar

Tað er ikki sjálvsagt í dag, at børn hjá bónda hava hug at taka yvir. Tá ið tað er støðan, má bóndin taka støðu til, hvussu og hvat hann skal gera seinnu árini á garðinum. Í Føroyum kunnu fæstu bøndur selja sínar garðar, og á tann hátt fáa vinning av sínum arbeiði ella fáa tað aftur, sum hann hevur virðisøkt garðin við sínum arbeiði og nærlagni.

Tá ið bóndi ikki kann selja sín garð, er vandi fyri, at bóndin, sum hann eldist og ongan hevur at taka eftir seg, missir áhugan fyri at gera nýíløgur í garðin og bara ger tær mest neyðugu umvælingarnar.

Tá ið bóndin at enda fer frá, stendur Búnaðarstovan/ Føroya landsstýri eftir við einum niðurslitnum garði, sum er dýrur at fáa aftur í gongd. Oman á allar teir trupulleikarnar kann tað ganga long tíð við uppslítandi rættargongdum, áðrenn nýggi bóndin situr trygt á garðinum. Tann langa bíðitíðin kann heilt gera enda á mjólkneytahaldinum á festinum.

Ein møguleiki at lætta um hjá eldri bóndum at fara frá er, at myndugleikarnir saman við bóndunum skipa fyri eini eftirlønarskipan. Ein slík skipan hevði eisini eggjað bóndunum at halda garðin í standi, til teir fara frá. Tað hevði verið til fyrimunar hjá bæði bóndunum og myndugleikunum við eini slíkari eftirlønarskipan.

Men ein slík skipan má eisini hava við sær, at bóndin kann verða kravdur eftir endurgjaldi, um garðurin er misrøktur, tá ið hann fer frá.

Av tí at spurningurin um, hvussu ein slík skipan kann fíggjast, er uttan fyri endamálið við hesum áliti, verður evnið ikki viðgjørt nærri her.

## 5.5. Gomul húsdýrasløg og gróðurseting av trøum

Nú verða partar av landbúnaðarstuðlinum latnir til "Føroysk húsdýr" og til "Træplanting". Hetta eru stuðulsskipanir, sum ikki vóru til fyri nøkrum árum síðan, og stuðulsmál, sum eingin hevði hugsað sær, at stuðul fór at verða latin til.

Skal gomlu húsdýrasløgunum vera lív lagað, serliga rossunum og neytunum – um nakað er eftir av teimum – er eingin vegur uttan um bøndurnar. Fyri at fáa teir at hava áhuga í hesum húsdýrasløgum, er neyðugt, at teir fáa onkran fyrimun av at hava hesi dýrini fram um onnur dýr.

## 5.6. Røktarlandslagið

Nógv skal haldast, fyri at ein bygd skal standa fram sum ein heild. Og ein partur av hesum er gamli bøurin, sum ikki er nýtiligur til størri amboð og heldur ikki til beiti.

Meginparturin av gamla bønum í Føroyum, sum ikki er farin undir bygging og asfalt, er lagdur saman, og eisini lagdur í fløtt. Hann hevur tí mist síni sereyðkenni. Á sama hátt er við gørðum og markum, nógv er ruddað burtur. Fyrimunurin við at leggja saman í fløtt, var at motoramboð kundu

nýtast at arbeiða bøin. Prísurin var, at bøurin gjørdist minni áhugaverdur at síggja, og at stórir partar av honum endaðu sum heimabeiti til seyð, ella í ringasta føri sum partur av haganum.

Bøndurnir í dag hugsa ikki um at sláa við hond, og teir vilja helst sleppa undan at nýta tvíhjólaðan motorlíggja. Nøgdirnar av grasi, ið teir nýta til neytini, eru so stórar, at tað munar lítið og einki at sláa smá stykki við motorlíggja. Tí hava teir lagt bøin saman, har tað letur seg gera, ella teir hava velt upp úr nýggjum, har umstøðurnar eru til at arbeiða bøin við stórum maskinum. Ótøkini lata teir liggja, ella nýta tey til beiti. Somuleiðis er við smáu stykkjunum, har traktorur ikki kann nýtast.

Og nú, tá ið nýggi útgerð verður nýtt til slótturin, verður meira og meira farið frá gomlum brøttum bøi, sjálvt um hann er lagdur í fløtt.

Fyri at eggja bóndunum og jarðareigarunum til at halda jørðina á ein ávísan hátt, er eitt hugskot at lata jarðareigarunum nakað av endurgjaldi. Hetta er ikki óvanligt í t.d. Noregi, har jarðareigarar fáa stuðul fyri, at teir skulu:

- lata vera við at leggja bøin saman,
- lata trø og runnar standa ella lata vera við at rudda grót burtur,
- lata afturlagdar veitir/ áir uppaftur, sum áður hava fingið stuðul fyri at verða lagdar aftur/ undir heilt.

Eitt hugskot er at nýta ein part av landbúnaðarstuðlinum til at halda røktarlandslagið, ella til at fáa ein part aftur í gamlan stand.

Uppgávurnar eru fleiri: bøgarðarnir, teigalendini, at halda og seta í stand gomul gróthús og onnur úthús, halda bygdagøtur o.a. Møguliga eigur onkur grótgarður at verður laðaður aftur fyri onkran, sum er tikin niður.

Fyri ferðavinnuna hevði tað helst loyst seg, at størri partur av røktarlandslagnum varð hildin í standi.

## 5.7. Bygg

Ein annar møguleiki var at latið nakað av stuðli til bøndur fyri at velta føroyskt korn, bæði á gamlan hátt í teigalendum og í nýggjum bøi við nútímans amboðum. Kornið kundi verið nýtt til fóður, matgerð og/ ella at bryggja við. Kornveltingin kundi uttan iva verið við til at betra um røktina av bønum, og givið føroysku bryggjaríunum eina serliga vøru. Íslendingar hava góðar royndir við at kornvelting hevur betrað nógv um røktina av bønum (Rikharð Brynjólfsson, Freyr nr. 8, 2003). Bæði hetlendingar og orknoyingar eru farnir royndir at velta heldur meira av korni, m.a. at nýta til at bryggja whisky ella til ølbrygging.

## 5.8. Rossavist og rossagøtur

Tað er vælumtókt av nógvum býarfólkum um mest allan heim at hava ross. Tað er eisini galdandi í Føroyum. Borgarar í Tórshavn eiga uttan iva meginpartin av rossunum í Føroyum í dag uttan at eiga jarðarteigin.

Nógv av teimum hava rossini í fjósum í Havnardali og í Flatnahaga. Um summarið ganga nógv í høgum runt um landið.

Um nýggj stór mjólkneytafjós verða bygd, koma nøkur/ fleiri mjólkneytafjós at standa tóm. Onkur av hesum gørðunum koma helst eisini at hava avlop av rímiliga góðum bøi, sum ikki er nýtiligur til neyt. Hendan bøin kundu rossaeigarar møguliga røkt og hoyggjað fyri eina ávísa leigu, og bøndurnir

kundu boðið gomlu tómu fjósunum fram til rossini aftur fyri eitt ávíst gjald. Sum ein part av gjaldinum kundi bóndin brúkt rossini í møguligum fyriskipaðum túrum, tá ið eigarin ikki brúkti tey.

Fyri at kunna skipa fyri regluligum túrum á fjøllunum á rossabaki er neyðugt við góðum rossagøtum, sum tola nógva nýtslu. Vanligu gøturnar halda neyvan til nógv regluligt rossatraðk.

Kundu bøndurnir/ hagarnir fingið stuðul at laga gøturnar nakað til slíka nýtslu og gera nakrar nýggjar, so betri varð at ferðast á rossabaki? Eisini kundu teir fingið stuðul at hildið gøturnar í standi.

Uttan iva mugu nógvar forðingar fáast av vegnum, fyri at fáa slíka skipan at virka. Neyðugt verður at fara um fleiri hagar og um bygdamørk, og uttan iva vilja hagarnir onkursvegna hava gjald frá fólki, sum koma at nýta slíka rossagøtu.

## 5.9. Vistfrøðilig mjólk

Í flestøllum londum í vesturheiminum er ein partur av landbúnaðinum umlagdur til vistfrøðiligan landbúnað. Vistfrøðilig vøra er ikki ein vøra við serligum eginleikum, men ein vøra, sum er framleidd á ein serligan hátt, sum ikki troytir náttúruna heilt so nógv, sum vanlig framleidd vøra.

Fyri at sleppa at kalla seg vistfrøðiligan bónda skulu ymisk krøv fylgjast. Avmarkað er:

- hvørji tøð, bóndin kann nýta
- hvat fóður, bóndin kann nýta
- hvussu heilivágur kann nýtast
- hvussu fjósini skulu innrættast

Ikki er loyvt vistfrøðiligum bóndum at nýta eiturevni móti illgresi ella at geva húsdýrunum hormonir.

Góðkendar reglur eru fyri, hvussu umleggjast skal frá vanligum landbúnaði til vistfrøðiligan.

Tað ger, at vistfrøðiligi bøurin kemur at geva minni gras, enn væl røktur bøurin nú gevur. Tí verður neyðugt at hava heldur víðari bø, og tað verður helst **neyðugt** at vetrarfriða vistfrøðiliga bønin.

Vistfrøðiliga góðkendir bøndur hava fingið heldur betri prís fyri vørurnar og hava fingið eitt sindur meira stuðul frá statunum.

Ein grundgeving hjá myndugleikunum í øðrum londum fyri at stuðla vistfrøðiligum landbúnaðinum heldur meira er, at teir á henda hátt verja viðbrekna drekkivatnið heldur betur. Drekkivatnið verður pumpað upp úr jørðini. Verður drekkivatnið dálkað, ganga nógv ár, áðrenn tað verður reint aftur. Alla ta tíðini mugu so pengar nýtast til at reinsa vatnið.

Eftir hondini eru felags evropeiskar reglur fyri hesi framleiðsluni, og eftirlitið er væl skipað.

Marknaðurin fyri vistfrøðiligum vørum í Norðurlondum vaks til fyri umleið 3-4 árum síðan. Nógvir norðurlendskir bøndur løgdu um til vistfrøðiliga framleiðslu. Seinnu árini hava teir latið heldur meira vørur, enn marknaðurin hevur borið, m.a. er nógv vistfrøðilig avlopsmjólk farin til vanliga framleiðslu. Tað hevur gjørt, at prísurin á vistfrøðiligu mjólkini er fallin og nærkast prísinum á vanligari mjólk. Ein partur av bóndunum leggur tí garðin um aftur til vanligan rakstur.

Fyri at tryggja, at mjólkin er vistfrøðilig, verður hon hildin burtur frá hini mjólkini. Mjólkarbilarnir, sum heinta vistfrøðiliga mjólk, heinta bert vistfrøðiliga mjólk, og hon verður viðgjørd á egnum linjum á mjólkarvirkjunum og verður sjálvandi pakkað í serligar pakkar.

Í Íslandi verður nakað av vistfrøðiligari mjólk latið til mjólkarvirkini seinnu árini. Har eru serligir bilar, sum heinta mjólkina, og serligar linjur á virkjunum til vistfrøðiligu mjólkina.

Íslendingar meta, at neyðugt er við serligum bili fyri at tryggja, at bland ikki kemur í. (Gunnar A. Gunnarson, leiðari á TÚN, góðkenningar- og eftirlitsstovnur, pers.).

Í Føroyum er marknaður fyri vistfrøðiligum vørum, serliga fyri grønmeti, mest gularótum. Sambært Føroya Keypssamtøku er marknaðarluturin ikki stórur, og í løtuni stendur hann í stað. Uttan iva er eisini marknaður fyri vistfrøðiligari mjólk her, sigur Keypssamtøkan (pers. 2003).

Sambært Eiriki Thorvaldssyni er mjólkarvirkið hjá MBM eitt pinkalítið mjólkarvirki samanborið við mjólkarvirki í øðrum londum, og MBM letur nógv fleiri ymiskar úrdráttir, enn onnur virkir í somu støðd. MBM hevur avgjørt áhuga í at kunna taka ímóti og lata vistfrøðiliga mjólk, men tað krevur nógv av MBM. E. Thorvaldsson metir, at tangabilarnir, sum nú eru, møguliga kundu tikið bæði sløgini av mjólk, tí fleiri tangar er í bilunum. Uttan iva er neyðugt at avmarka vistfrøðiligu mjólkina á einum øki, har ein mjólkarbilur vanliga koyrir.

Fyri at kunna viðgera vistfrøðiligu mjólkina á MBM-virkinum er neyðugt at gera íløgur og tillagingar. Neyðugt verður við einum móttøkutanga afturat. Tøkniligu trupulleikarnir kunnu best lýsast við einum dømi: Bara til at fylla rørini til pakkaran, er neyðugt við 750 litrum av mjólk!

Ein annar møguleiki er at pakka vistfrøðiliga mjólkina fyrst um morgunin, tá ið linjan er nývaskað, og síðan at fara yvir til vanliga mjólk. (Bjørn Patursson frá íslend. Gunnari Gunnarsyni)

Nakrir av størstu trupulleikunum hjá mjólkneytabóndum við at leggja um til vistfrøðiligt neytahald eru:

- trongi bøurin
- vantandi siðvenja við at hava grøs í bønum, sum savna køvievni, m.a. smæru
- um seyður framhaldandi verður á bønum um veturin og langt út á várið, og serliga um aðrir hava rættindini til vetrarbitið
- at neyðugt helst verður at hava serligan bil at heinta vistfrøðiligu mjólkina, og
- at meira enn ein mjólkneytabóndi/eitt fjós má leggja um, fyri at mjólkin kann viðgerast fyri ein rímiligan prís á mjólkarvirkinum

Samanlagt má sigast, at tað enn er langt á mál, til at nakar bóndi kann lata vistfrøðiliga mjólk til mjólkarvirki.

# 6. Niðurstøða

## 6.1. Álitið

Eg hava eftir bestu sannføring roynt at greina gongdina í mjólkneytahaldinum, bæði í altjóða og føroyskum samanhangi. Eisini havi eg roynt at lýsa gongdina í altjóða handli. Út frá hesum havi eg sett fram tankar um, hvussu fram kann farast, áðrenn Búnaðarstovan og Búnaðargrunnurin: (raðfylgjan niðanfyri er tilvildarlig)

1. fíggja ella geva byggiloyvi til nýggj fjós
2. fíggja ella geva loyvi til størri velting úr nýggjum,
3. avgera hvar nýggj mjólkneytafjós skulu byggjast, ella hvør sleppur at byggja
4. seta krøv til køstar og tøðbreiðslu.

Harafturat havi eg sett fram nakrar tankar um aðrar møguleikar, t.d. um vistfrøðiligan landbúnað, rossvist og rossagøtur, og tankar um eina eftirlønarskipan til bøndur.

## 6.2. Føroyska mjólk?

Gongdin í øllum vesturheiminum er ikki at taka feil av, prísurin á mjólkin, eins og flest allar aðrar matrvørur fella í mun til lønina hjá fólki, at tað verða færri og færri fjós, og tey verða størri og størri. Tað setur stór krøv til bøndurnar, politisku skipanina og til umhvørvið.

Flutningsmøguleikarnir í dag gera, at tað letur seg væl gera at flyta feska mjólk úr næstan hvørjum landi í Evropa tað skal vera regluliga til Føroyar. Tað kann gerast, uttan at mjólkin kostar okkum meira enn egin mjólk.

Skulu vit hava mjólkneyt í Føroyum í framtíðini, mugu myndugleikarnir heilt greitt taka støðu til, hví vit skulu hava føroyska mjólk, og undir hvørjum treytum tað verður.

## 6.3. Dugnaligir bøndur

Tað, sum fyrst avger, um eitt fjós ber seg ella ikki, eru evnini og arbeiðshugurin hjá bóndanum. Tí er umráðandi, at bøndurnir sleppa at menna seg, og at teir fáa eina holla ráðgeving. Okkurt bendir á, at sum nú er, nýta teir ov nógv fóður til neytini. Ovnýtslan av fóðri gongur út yvir allar partar, og hon kostar eftir míni meting millum 0,34-0,5 kr./l.

Tað, sum næst avmarkar møguleikarnar at koma undan, er skuldin. Tí er tað avgerandi fyri møguleikarnar í framtíðini hjá mjólkneytahaldinum, at dugnaligir bøndur sleppa framat, og at teir minnu dugnaligu gevast og fara av garðinum, áðrenn alt steðgar upp. Gevast teir ikki sjálvir, tá ið teir hava rent seg fastar, eigur møguleiki at vera fyri at fáa teir av garðinum á sama hátt, sum gjørt verður í øðrum vinnum.

## 6.4. Nýggj fjós

Fjósini mugu sleppa at menna seg tøkniliga og mugu sleppa fram at lendum, sum eru egnað til dagsins amboð og arbeiðslag.

Fleiri viðurskifti avmarka, hvussu stór fjós ráðiligt er at byggja og hvar, og hvar veltast kann:

1) Landslag
2) Vegakervi og flutningsmøguleikar
3) Frástøða til SEV, tlf., vatn og aðrar veitingar
4) Ognarviðurskifti í sambandi við bygningar, bø/ innangarðs og haga, m.a. vetrarbit
5) Jørðildi og veðurlag
6) Evnini hjá bóndunum
7) Viljin hjá bóndum at arbeiða saman, t.d. við samarbeiði ella felagsfjósi

Um fjós verður bygt til undir 20 neyt, kostar neytaplássið ikki minni enn 3 ferðirnar tað, ið neytaplássið kostar í nýggjum fjósi, sum er til 60-120 neyt.

MBM væntar ikki, at kvoturnar økjast nakað serligt komandi árini. Tí koma nýggi fjós ikki at økja um mjólkina, men heldur at betra um arbeiðsumstøðurnar og trivnaðin hjá neytunum, og – um rætt verður atborið – at betra um kappingarførið.

Um vit megna at menna føroyska neytahaldið skilagott, meti eg, at um 20 ár verða

2 fjós til 100-120 neyt
2 fjós til 80 neyt
13 fjós til uml. 60 neyt og
3-6 ella færri fjós til restina av teimum stívliga 100 neytunum.

Tilsamans 20-23 fjós, og største parturin felagsfjós.

Í flestum Norðurlondum er tað eitt krav, at neytini skulu sleppa út ein part av árinum. At fáa hetta at bera til er ikki bara sum at siga tað, tá ið neytini verða so nógv. Tað verður ikki lættari, um sjálvvirkandi mjólkiútgerð kemur í fjósini. Ein møguleiki at bøta um vantandi beiti er at byggja fjósini við rennigarðum, har neytini kunnu sleppa útum mest sum hvønn dag.

### 6.4.2. Hvussu skal hoyggjast?

Ikki er lætt at gera eina niðurstøðu, um hvør skilabesti hátturin at hoyggja er. Skal grasið í vanligar súrhoysbrunnar, í koyribrunnar ella í rullur? Skal eg gita, sær tað út til at ringt verður at finna eina skipan, sum kann kappast við stórar rullur. Væl liggur fyri brádliga at fara út at stúva og pakka nógv gras, tá ið umstøðurnar loyva tí. Men treytin er, at útgerðin at stúva og pakka við verður nýtt nóg nógv, so íløgan ikki verður ov stór fyri hvørja rulluna.
At leggja grasið í koyribrunn er bíligasti hátturin, men tað er treytað av, at brunnarnir ikki eru taktir. Skulu koyribrunnar nýtast, skal bøurin vera sera góður. Tískil er ivingarsamt, um koyribrunnarnir eru loysnin í Føroyum.

### 6.4.3. Køstar

Í sambandi við nýggj fjós slepst ikki undan at gera nýggjar køstar, ið hóska til talið á neytum og til hvussu langa tíð tað skal taka at fylla køstin við fullum fjósi.

Um mest møgulig nytta skal fáast úr mykjuni frá neytunum, skal hon helst breiðast í tíðarskeiðinum mai-august. Skal tað lata seg gera, er neyðugt at hava køstapláss til minst 9 mánaðir,

Ikki slepst undan eisini at gera íløgur í køstar til nøkur av teimum eldru fjósunum. Tað fer neyvan at bera til framyvir bert at hava køstarúmd til ein minni part av vetrinum. At bíða við køstunum til nýggj fjós verða bygd, verður heldur leingi.

Um neyðugt verður at gera køstar til um helmingin av neytunum, sum koma at vera í gomlu fjósinum, og tað verður gjørt yvir 10 ár, krevur tað eina játtan upp á uml. 0,375 mió. kr. árliga. Ein partur av hesum køstunum kann uttan iva flytast til nýtt størri fjós, tá ið tað er komið so langt.

Um farið verður undir at byggja nýggj fjós, fara tað helst at ganga 20 ár, frá tí at tað fyrsta er bygt, til øll tey núverandi fjósini eru skift út. Ilt er at meta um, hvussu stórur tørvur er á køstum, tí nakrir av nýggju felagskøstunum (sí omanfyri) kunnu flytast til nýggju fjósini.

Um allir “felagskøstarnir” kunnu nýtast umaftur, skulu 3,75 mió. kr. í køstastuðli í 20 ár nýtast til nýggjar køstar í sambandi við nýggj fjós, ella 187.500 kr. árliga í dagsins pengum.

#### 6.4.4. Fígging og veðhald

Um núverandi eigaraviðurskifti og festireglur koma at halda fram, koma trupulleikar framhaldandi at vera við fíggjarligu ábyrgdini og við hvussu gerast skal, tá ið nýggjar íløgur skulu gerast.

Hvussu skal bygging og velting fyriskipast í framtíðini, frá tí at bóndin/ bøndurnir kemur/ koma við ætlanini til liðugt er? Og hvussu skal gerast, tá ið trupulleikar vera við gjaldskyldunum og ella við røktini?

Stórar íløgu skulu gerast í mjólkneytagarðarnar, um teir skulu hava ein nøkulunda møguleika at standa seg móti innfluttari mjólk. Tí má ábyrgdarbýtið verða greitt, hvør hevur ábyrgdina fyri hvørjum.

Nógvir trupulleikar hava verið við núverandi festiskipanini. Tað hevur víst seg, at tað ongar ella bert smávegis avleiðingar hevur havt við sær, at bøndur ikki hava hildið sínar skyldir. Tað hevur so havt við sær, at Føroya Jarðarráð í nøkrum førum ikki hevur fingið mjólkneytabøndur, sum hava rent seg rimmar fastar, nóg skjótt av festinum. Bøndurnir eru slopnir at slita alt niður, bæði fjós, bø, neyt, útgerð og seg sjálvar.

Tað hevur verið dýrt at fáa alt aftur at virka, bæði peningaliga og menniskjaliga.
Enn standa nøkur festi bert og bíða, til bøndurnir fara frá. Tað vil siga, at tað standa rættiliga stórar rokningar fyri framman, sum bert hava eina áskrift: Búnaðargrunnurin.

Um nýggju lógirnar “um landsjørð” og Búnaðargrunnin ikki minka um hesar trupulleikarnar, eigur Búnaðarstovan at fáa eina aðra avtaluskipan við bøndurnar í staðin fyri festiskipanina. Tað má og skal bera til framyvir at fáa bónda frá festinum, um hann ikki heldur sínar skyldur á nøktandi hátt. Eisini eigur Búnaðarstovan at kunna reisa endurgjaldskrav móti bóndanum, um hann misrøkir ella hevur misrøkt garðin.

Um tað ikki verður gjørt, er tað ein háðan móti teimum, sum hava hildið sínar skyldur.

Fyri at fáa meira samsvar millum ræðisrættindini og fíggjarligu ábyrgdina, kundi Búnaðargrunnurin í sambandi við stóra íløgu kravt, at:

- festisáttmálin varð umlagdur til leigusáttmála, og/ ella
- Búnaðargrunnurin fekk veðhald í øllum framleiðsludýrunum á festinum, í amboðunum, og transport í inntøkunum frá mjólkini og/ ella
- bóndin leggur ein ávísan %-part av byggikostnaðinum og/ ella av umsetninginum á eina kontu sum trygd, sum seinni kundi verið nýttur sum partur av pensjónsskipan hjá honum
- at bóndin undirskrivar eina treytaða uppsøgn, sum kemur í gildi, um hann ikki megnar at halda sínar skyldur móti Búnaðargrunninum/ Búnaðarstovuni ella á annan hátt kemur illa fyri
- Ella annað

### 6.4.5. Fyrireiking av fjósbygging

Mjólkneytahaldið mennist skjót í vesturheiminum, og einki bendir á, at steðgur er í.

Í Føroyum mennist mjólkneytahaldið eisini. Men okkara støði er nógv lægri, enn har nógv mjólkneytahald er. Tørvurin at byggja nýggj fjós til mjólkneytini í Føroyum trokar á. Her er eingin, sum hevur førleika at fyriskipa bygging av fjósum, tí langt er ímillum, at nýggj fjós verða bygd her á landi. Fjósini verða færri í framtíðini, og longri tíð verður millum, tá ið nýggj verða bygd. Tí gevur onga meining støðugt at hava fulla fakliga byggivitanina her.

Betur er at samstarva við stovnar, fyritøkur/ ráðgevar uttanlands, sum fáast við slík arbeiði. Ein loysn kundi verið, at útlendskur serfrøðingur saman við fakfólki úr Føroyum verða sett at fyriskipa, ráðgeva og hava eftirlit við bygging av nýggjum fjósum.

### 6.4.6. Bøgrundarlagið og tøðbreiðslugrundarlagið

Ikki ber til at byggja stór dýr fjós, sum ikki verða nýtt til fulnar í fleiri ár, tí bøurin og ella kvota eru lítil.

Einasta fóðrið, ið vit í rímiligan mun sjálv kunnu fáa neytunum, er gras og hoyggj, oftast súrt. Dýrt er at velta upp úr nýggjum, og rættiliga avmarkað er, hvat kann veltast. Tí er umráðandi, at øki, sum eru egnað at verða velt, verða skrásett, og at núverandi bøurin í mestan mun verður vardur móti bygging, og at myndugleikarnir hjálpa til, so møguleikar verða at fáa nýggju fjósini spjadd skilagott út um landið.

Skal hetta lata seg gera, verður neyðugt at fara aðrar vegir. Millum annað við at leggja festi saman, at bøndur byggja felagsfjós við nóg víðum bøi, og við at skipa so fyri, at festi kunnu makaskifta lendi við aðrar hagar, og/ ella gera leigusáttmálar við óðalshagar.

Áðrenn umsókn frá bónda/-um um fígging av nýggjum fjósi ella størri veltiætlan **á nakran hátt verður viðgjørd**, eigur hann/ teir, sum ætla sær at byggja mjólkneytafjós at:

1. leggja eina fíggjarætlan fyri árini rundan um íløguna
2. ávísa bø og øki at velta, sum hann/ teir hevur/ hava ræðisrættindini til, m.a. við kortum og veltiætlan

Er ætlanin at velta inni á øðrum, eigur leigusáttmálin at verða lagdur til góðkenningar hjá Búnaðarstovuni og Búnaðargrunninum.

Neyðugt verður at tryggja, at almenn jørð, sum hevur fingið veltistuðul, framhaldandi verður nýtt til mjólkneytahald ella annað virksemi, sum Búnaðarstovan kann góðtaka.

Í nøkrum bygdum, har neyt eru, er stórur partur av tí, sum kann veltast, longu veltur, og í øðrum eru fleiri neyt í dag, enn pláss er fyri frá umhvørvis- og náttúrusjónarmiði. Har má tað vera eitt mál, at felagsfjós verða bygd, ella at neytahaldið verður skorið niður ella lagt heilt niður, tá ið tíðin er búgvin.

### 6.4.7. Hvar skal byggjast og veltast

Fyri kappingarførið hjá føroysku mjólkini er umráðandi, at lætt og gott er at koma til fjósini við stórum bilum, og at flutningurin um firðir og sund verður so væl brúktur, sum til ber. Ikki ber til at binda mjólkarbilar stóran part av tíðini til bert at taka 2-3.000 litrar í hvørjum umfarinum. Tí má avgerð takast um, hvussu nógv mjólkneyt skulu vera í Suðuroynni ella ikki, og somuleiðis við smærru oyggjunum og kanska Sandoynni við. Flutningsprísurin má og skal niður.

Fyri at sleppa undan stórum íløgum í langar bilavegir er umráðandi, at komandi fjósini verða bygd rímuliga tætt við landsveg ella góðan bygdaveg. At fáa samband við kervið hjá SEV kostar ikki so nógv, at tað skuldi volt teir stóru trupulleikarnar, um ikki talan verður um fleiri km.

### 6.4.8. Sáttmálar fyri felagsfjós

Verða fjósini nógv størri enn tey nú eru, verður neyðugt við fleiri felagsfjósum. Tá er umráðandi við væl umhugsaðum samstarvssáttmálum, sum eiga at verða góðkendir av fíggingarstovninum, áðrenn teir verða undirskrivaðir. Helst eigur Búnaðarstovan at hava uppskot til sáttmála/-r liggjandi.

### 6.4.9. Bjóða fjós út at byggja og lendi at velta?

Mær vitandi hava bøndur ikki boðið arbeiðir út fyri at fáa arbeiðir gjørd. Eigur tað ikki at verða gjørt framyvir?

Komandi fjósini verða rættiliga stór, og spurningurin er, um tað ikki eigur at verða kravt, at arbeiðini verða boðin alment út.

Tað kann gerast á ymsan hátt, t.d. við at bjóða alt út undir einum, ella við at bjóða ymisku handverksyrkini út hvørt fyri seg. Eisini er møguligt at bjóða arbeiðini frítt út millum allar fyritøkurnar, sum eru á marknaðinum, ella millum nakra útvaldar.

At byggja eitt fjós er neyvan eitt so stórt arbeiði, at tað gevur fulla meining at bjóða tað út í smáum. Skilabest er at bjóða tað út í einum, og síðan lata tað standa til byggifyritøkuna, sum fær arbeiðið, at hava ábyrgdina av teimum ymsu handverksyrkjunum.

Ein annar møguleiki er at bjóða t.d. 3-4 fjós út undir einum. Tá liggur betur fyri at bjóða arbeiðini út fak fyri fak og møguliga at bjóða tey út í útlandinum eisini.

Hetta er gjørt við heilt góðum úrsliti í Noregi, har 4 fjós í 2002-2003 vórðu boðin út undir einum – bøndurnir hildu seg fáa tað 4. fjósið fyri einki!

Spurningurin er, hvør skal standa sum byggiharri og hava eftirlitið við arbeiðinum. Best er helst um bóndin/ bøndurnir sjálvur/-ir leggur/-ja pengar í fjósið, og á tann hátt sjálvir koma at veðhalda væl meira fyri váðanum og koma at standa sum byggiharrar?

### 6.4.10. Eftirlit

Búnaðargrunnurin eigur og skal fylgja væl við, tá ið bygt ella útbygt verður í framtíðini. Búnaðargrunnurin má hava møguleika at steðga arbeiðinum fyribils ella heilt, um alt fer av lagi.

At byggja eitt nýtt fjós er eitt arbeiði, sum ein vanligur bóndi ikki fær hildið fult skil á. Bóndi við mjólkneytum hevur dagliga nóg mikið at gera. Bóndin skal vera bóndi, ikki handverkari, verkfrøðingur ella gravimaskinuførari.

Umráðandi er tí, at fólk við neyðugum førleika hava eftirlit við arbeiðinum. Ein møguleiki er at hava samstarv við eftirlitsfólk, sum frammanundan fáast við slíkt.

Ein góður máti at skjalfesta ymist, sum gongur fyri seg undir byggingini, er at taka myndir. Tað ber til at avmynda alt - útgrevstur, stoyping, tá ið kaðlar og/ ella rør verða tyrvd, ella tá ið óhapp henda. Bóndin kemur uttan iva dagliga at ganga á byggiplássinum. Hansara besta eftirlit var, um hann mest sum dagliga tók myndir og merkti ymist niður um myndirnar so hvørt. Hvussu tað skal skipast, má vera avtalað millum eftirlitið, byggimeistaran og bóndan.

### 6.4.11. Velting

Tað hevur víst seg seinnu árini, at tað gongur seinni og seinni hjá bóndunum at fáa stykkini, ið teir velta úr nýggjum, liðug. Uttan iva eru fleiri grundir fyri at so er, m.a. er stuðulin fallin í virði, nakrir bóndir hava fingið sær egna gravimaskinu og hava helst undirmett arbeiðið, økini, sum nú vera velt, eru ikki so væl egnaði.

Hugsað eigur at verða um, um tað ikki var rættari at fingið byggimeistarar at gera alt arbeiðið frá at grava um til at sáa og stika. Eisini eigur sama eftirlitsskipanin at hava eftirlit við veltingini, sum tilmælt er frammanfyri, og roynt eigur at vera at fáa hækkað játtanina til veltistuðul á løgtingsfíggjarlógini til bø og vegir.

## 6.5. Undirvísing, ráðgeving, royndir og gransking

Bøndurnir hava størri og størri tørv á royndum, ráðgeving og undirvísing so hvørt sum:

- bøndurnir verða færri
- fjósini størri
- mjólkarprísurin støðugt lækkar
- bøndurnir verða meira og meira einsamallir á gørðunum
- longri og longri verður til nakran granna, sum hevur mjólkneyt, um somu tíð sum
- yrkisligu krøvini eru størri enn nakrantíð

Nógvir av núverandi bóndunum fáa alt ov lítið av grasi av bønum. Skipað eigur at verða fyri royndum og fyri einum kunningarátaki.

Arbeitt eigur at verða fyri, at Royndarstøðin kann gerast meira virkin í at menna landbúnaðin á ymsan hátt.

Fyrsta fyritreytin er, at myndugleikarnir játta meira pening til Royndarstøðina. Eitt hugskot er at seta ein altjóða stýrisbólk ella ráðgevingarbólk við umboðum úr grannalondunum at stuðla undir fakliga rakstrinum av Royndarstøðini. Tað hevði gjørt, at vit fingu eitt meira formligt samband úteftir til granskingar- og ráðgevingarstovnar í grannalondunum, og tað hevði lætt um møguleikarnar hjá fakfólki í Føroyum at dagført sína vitan og at fingið royndir uttanlendis.

Skulu vit byggja óbjálvað sjálvútluftandi leysgongufjós, er neyðugt at vit fáa vitan um, hvussu tey best kunnu tillagast til viðurskiftini her. Í tí arbeiðinum eigur Royndarstøðin at vera megintátturin. Tað arbeiðið hevur skund. Skjótast møguligt eigur eitt lítið kalt/ opið fjós/ hús at verða bygt, har ymiskir hættir til útlufting verða royndir, og skrásetingar verða gjørdar. Roynast mugu meira ella minni opnir veggir, veggir við dúkum, timburrimum ella øðrum.

Eg meti, at vit sleppa ikki undan at keypa okkum vitan og ráðgeving aðrastaðni frá til hetta.

Seinastu vetrarnar hava kvøldskúlarnir runt landið skipað fyri landbúnaðarundirvísing ymsastaðni í landinum. Eg meti ikki, at hesi skeiðini nøkta framtíðar tørvin. Ein skilagóð loysn hevði verið at lagt landbúnaðarundirvísingina undir Fiskivinnuskúlan í Vestmanna í samstarvi við Royndarstøðina í Kollafirði.

## 7. Tilmæli

Mítt tilmæli er at:

1) Búnaðarstovan og Búnaðargrunnurin seta nakað av peningi og arbeiðstíð av, so okkurt av starvsfólkunum kann fylgja við og dagføra teirra vitan um mjólkneytahald.
2) Búnaðarstovan og Búnaðargrunnurin fíggja at frásagnir verða skrivaðar, har fakfólkum leggja fram sína meting av:
   a) hvussu nógv tað kostar at byggja og tillaga eitt kalt sjálvútluftandi leysgongufjós til føroysk viðurskifti til ávikavist 60 og 120 mjólkneyt.
   b) Hvussu nógv tað kemur at kosta føroyska samfelagnum at hava egna mjólk í mun til innflutta mjólk, um mjólkneytahaldið verður skilagott útbygt.
   c) hvussu vit best skipa mjólkneytahaldið í Føroyum, alt frá Royndarstøðini, ráðgeving og til hvar fjósini skulu vera, og til mjólkarvirkið
   d) (Meting av hvussu bíliga eitt mjólkavirki kann rekast, sum tekur ímóti 7 mió litrum og letur passandi úrval av vørum út til nýtararnar)
3) Búnaðarstovan og Búnaðargrunnurin fíggja at eina ráðstevnu í Føroyum, har frásagnirnar nevndar í 2) verða lagdar fram saman við hesum álitinum. Sjá fylgiskriv.
4) Av umsóknunum um loyvi/ fígging at byggja nýggj fjós, verður ein umsókn vald, sum fær loyvi at byggja treytað av, at:
   a) bóndin/ bøndurnir, fyri at tryggja íløguna
      i) kunnar/-a Búnaðargrunnin um síni/ teirra einskildu fíggjarviðurskifti og/ella
      ii) setur/-a einskilda ogn í veð minst 10% (ella annað tal) av íløguni og/ ella
      iii) gevur/-a Búnaðargrunninum veðhald í øllum framleiðsludýrunum á garðinum og/ ella
      iv) gevur transport í parti av søluinntøkunum og/ ella
      v) skrivar/-a undir uppsøgn av festinum/-unum, sum er treytað av, at lániskyldurnar ikki verða hildnar, at røktin er farin av lagi og/ ella annað, sum partarnir eru samdir um.
   b) Garðurin hevur ræðisrættindi til so stóran bø og dyrkilendi, sum gevur so nógv gras, at tað nøktar 65% av fullum stráfóðurtørvi og 100% av stráfóðurtørvinum 10 ár eftir, at fjósið er liðugt. Børøktin skal vera skynsamlig og náttúruvinalig.
   c) Um trupulleikar verða við at fáa nóg mikið av grasið, skulu Búnaðarstovan og ella Búnaðargrunnurin kunna krevja, at seyður ikki sleppur á bøin – um festið eigur vetrarbitið – og í ringasta føri krevja, at áseyðatalið verður sett niður.
   d) Skal veltast inni á øðrum fyri at nøkta 3:b, skal leigusáttmáli, makaskiftisskjal ella annað, sum prógvar, at bóndin hevur ræðisrættindi til økið, leggjast fyri Búnaðarstovuna og Búnaðargrunnin til góðkenningar, áðrenn nøkur umsókn verður viðgjørd.
   e) Skal nógv veltast afturat fyri at nøkta stráfóðurtørvin, sí 3:b og 3:c, skal veltingin verða løgd til rættis, áðrenn byggiloyvi og ella fígging av fjósinum verður játtað. Veltast skal eftir eini av Búnaðarstovuni og Búnaðargrunninum góðkendari ætlan við kortum og tíðarætlan. Bøurin skal kunna veltast uttan ov stóran náttúrukostnað.
   f) Búnaðargrunnurin kann seta fólk at hava eftirlit við veltingini, sí 3:b, 3:c og 3:d.
   g) Fjósið hevur eina kvotu, sum hóskar til 85% fult fjós, sum við skynsamligum rakstri kann tryggja, at garðurin klárar sínar fíggjarligu skyldur uttan stóran almennan rakstrarstuðul

h) serlig byggirenta verður nýtt í byggitíðini.

i) Í minsta lagi fyrsta árið, ið fjósið er í nýtslu, og 5 fyrstu árini, ið bøurin verður brúktur, skulu Búnaðarstovan og Búnaðargrunnurin kunna gera ymsar viðkomandi skrásetingar. Hetta arbeiðið eigur helst at verða gjørt saman við Royndarstøðini. Búnaðarstovan og Búnaðargrunnurin skulu lata endurgjald fyri eykaútreiðslur av skrásetingini, ella sjálv standa fyri, at skrásetingarnar verða gjørdar.

j) Ymiskar royndir, t.d. við ymiskum sløgum av "opnum" veggjum, skulu kunna gerast í samstarvi við viðkomandi fakfólk, Royndarstøðina og bónda upp til 5 ár eftir, at fjósið er liðugt. Bóndin skal bert gjalda fyri endaliga úrslitið og skal hava endurgjald fyri ómak og eykaútreiðslur.

k) Fjósið verður bygt:

   i) Eftir tekningum og fyrireiking, sum er gjørd av viðkomandi fakfólki, góðkend av Búnaðarstovuni, Búnaðargrunninum og bóndanum
   ii) Eftir tøkniligum byggileiðbeiningum, sum Búnaðarstovan og Búnaðargrunnurin hava góðkent
   iii) Undir eftirliti frá byggifrøðingi ella øðrum við viðkomandi førleika og útbúgving
   iv) Av byggimeistara og/ ella handverkarum, sum skrivligur sáttmáli er við
   v) har lætt er at koma til og frá hjá umboðum fyri Búnaðargrunninum og Búnaðarstovuni
   vi) so tað fellur best møguligt inn í lendið
   vii) úr so náttúruvinaligum tilfari, sum til ber
   viii) til minst 60 mjólkneyt, óbjálvað, sjálvútluftandi og sum leysgongufjós
   ix) hevur taktan køst, sum rúmar landi, tøðum og øðrum flótandi sevjum frá mjólkneytahaldinum, sum ikki slepst undan við natúrligari røkt, frá fullum fjósi í 9 mánaðir
   x) innrættað so tað í mestan mun tryggjar, at neytini kunnu bera seg mest natúrliga at
   xi) soleiðis at arbeiðsumstøðurnar hjá bónda og øðrum, sum koma at arbeiða í fjósinum, vera góðar og tryggar

5) Tá ið hetta royndarfjós hevur verið í nýtslu í eitt ár, eiga Búnaðarstovan og Búnaðargrunnurin at taka støðu til framtíðar neytahaldið í Føroyum við støði í:

a) frágreiðing um raksturin av royndarfjósinum 1. árið

b) útgreinaðum rakstrarroknskapi fyri royndarfjósið 1. árið

c) útgreinaðum byggiroknskapi fyri royndarfjósið

d) niðurstøðunum frá ráðstevnuni

e) og aðrari vitan um mjólkneytahaldið

Gongur illa við at fáa týðandi part av royndarfjósinum at virka, eigur avgerðin, um at geva loyvi og/ella fígging til annað nýtt fjós, at verða útsett, til fjósið virkar nøktandi.

6) Um niðurstøðan í 4) er jalig, eiga komandi byggiloyvi og fígging av nýggjum fjósum at verða givin við somu treytum sum nevnd undir 3) tó ikki 3:i og 3: k,v.

7) Um niðurstøðan í 4) er jalig, skal Búnaðarstovan søkja Løgtingsið um at hækka landbúnaðar-stuðulin, so stuðulin hóskar meira til dagsins prísir og til ognarviðurskiftini, serliga stuðulin til at velta úr nýggjum vegir í bønum og til køstar.

8) Búnaðarstovan skal virka fyri, at gomlu fjósini, sum ikki verða útskift fyrr enn um (10) 15-20 ár, koma at hava tíðarhóskandi køstar innan fyri rímiliga tíð. Um nakað talar fyri tí, skal tað vera felagskøst/-ar, og teir skulu vera so stórir, at teir kundu verið fluttir til eitt nýtt fjós við 60 neytum ella meira.

9) Ætla bøndur at byggja felagsfjós ella á annan hátt at samstarva, á ein hátt, sum kann ávirka ognir ella annað, sum Búnaðargrunnurin hevur fíggjað, skal samstarvssáttmáli skrivast og góðkennast av Búnaðargrunninum og/ ella Búnaðarstovuni.

10) Arbeitt verður fyri at skipa eina eftirlønar- og tryggingarskipan til bøndurnar. Møguliga eigur hon at vera treytað av, at endurgjaldskrav kann reisast móti bóndunum fyri misrøkt av festunum.

11) Ráðgevingarskipanin fæst at virka betur. Best er, um bøndurnir beinleiðis eru við til at fíggja ein part av ráðgevingini.

12) Royndar- og granskingarskipan fæst at virka, møguliga sum partur av hægri lærustovni, ella við einum stýribólki mannaður saman við fakfólkum úr grannalondunum

13) Landbúnaðar- og umhvørvisútbúgvingar verður skipaðar saman við miðnámsskúla, helst saman við fiskivinnuskúlanum í Vestmanna í samastarvi við Royndarstøðini í Kollafyrði.

14) Umstøður verða fyriskipaðar, so Royndarstøðin regluliga kann hava meira málrættaði skeið, bæði fyri festarar og onnur, m.a. ymisk skeið fyri seyðamonnum, t.d. um reinføri og hjálp undir lembing.

15) Búnaðarstovan og Búnaðargrunnurin heita á Vinnumálaráðið at fáa fíggja eina kanning av:
    a) hvussu stórur núverandi bøurin er
    b) hvussu nógvur bøur fer undir bygging árliga
    c) hvar øki eru og hvussu stór, sum kunnu veltast fyri rímiligan penga og náttúruprís til góðan bø, egnaður til nútímans amboð

í Tórshavn 18.05.2005

Gunnar Bjarnason

# 8. Áhugaverdar heimasíður

www.snd.no/kufjos

www.planteforsk.no

www.hint.no/prosjekt/melkesamdrift/

www.norgesvel.no/Default.asp?WCI=DisplayGroup&WCE=175&DGI=175

www.lr.dk

www.lr.dk/applikationer/kate/viskategori.asp?ID=ka00400001000016000200

www.lr.dk/applikationer/kate/viskategori.asp?ID=ka004000010000155